# Aðalfundur
## 2026



# Innihaldsyvirlit

Tú alfagra land mítt 3
Starvsnevnd, starvsfólk og umboðsting 4
Sersambondini 5
Menningarsambond og nevndaryvirlit 6
Forsetafrágreiðingin hjá ÍSF 2025 7
Býtið, grafar 18
Umboðstingið 19
Starvsnevndin 19

**SERSAMBOND:**
Badmintonsamband Føroya 20
Bogaskjótisamband Føroya 22
Borðtennissamband Føroya 24
Flogbóltssamband Føroya 26
Fótbóltssamband Føroya 28
Frælsur Ítróttur Føroya 30
Føroya Fimleikasamband 32
Hondbóltssamband Føroya 34
Judo Føroyar 36
Kurvabóltur í Føroyum 38
Parasport Føroyar 40
Ríðisamband Føroya 42
Róðrarsamband Føroya 44
Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon 46
Skjótisamband Føroya 48
Svimjisamband Føroya 50

**MENNINGARSAMBOND:**
Billardsamband Føroya 52
Boksisamband Føroya 54
Dartsamband Føroya 56
Golfsamband Føroya 58
Klintrisamband Føroya 60
Poolsamband Føroya 62
Seyðahundasamband Føroya 64
Føroya Styrkisamband 66
Taekwondosamband Føroya 68
Tennissamband Føroya 70

Ársroknskapur hjá ÍSF 72
Uppskot til býti 2026 91

**MYNDIR:**
Gilli Brend í Hoyvík
Ólavur Fredriksen
Ann-Mari B. Mouritsen
Sverri Egholm
Finnur Justinussen
Anze Malovrh, Kolektiff

**UPPSETING / SNIÐGEVING:**
Loysnir

**TEKSTUR FORSETAFRÁGREIÐING:**
Eydna Skaale

**RÆTTLESTUR:**
Leivur Frederiksen



# Aðalfundur
## Ársfrágreiðing 2025

### Tú alfagra land mítt

**1.** Tú alfagra land mítt, mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt, á sumri við logn,
tú tekur meg at tær so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar, Guð signi tað navn,
sum menn tykkum góvu, tá teir tykkum sóu.
Ja, Guð signi Føroyar, mítt land!

**2.** Hin roðin, sum skínur á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna, sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

**3.** Eg nígi tí niður í bøn til tín, Guð:
Hin heilagi friður mær falli í lut!
Lat sál mína tváa sær í tíni dýrd!
So torir hon vága – av Gudi væl skírd –
at bera tað merkið, sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

# Starvsnevnd, starvsfólk og umboðsting

### Starvsnevnd

Elin H. Joensen,
Forseti

Magnus Tausen,
Varaforseti

Kerstin Laksáfoss,
Nevndarlimur

Eva Vilhelm
Nevndarlimur

Anna Maria Toftegaard
Nevndarlimur

Edna Maria Debes
Nevndarlimur (Íðkaranevndin)

### Starvsfólk

Petur Mittún,
Aðalskrivari

Andras Nolsøe,
Ítróttaráðgevi

Katrin á Neystabø,
Ráðgevi breiddarítróttur

Finnbjørg Nattestad,
Skrivstovuólk

Solby A. Christiansdóttir,
Oyggjaleikir 2027

Signar Hilmarsson
Samskipari úrval

Poula Michelsen
Oyggjaleikir 2027


Elin H. Joensen,
Forseti


Magnus Tausen,
Varaforseti


Kerstin Laksáfoss,
Nevndarlimur


Anna Maria Toftegaard,
Nevndarlimur


Eva Villhelm,
Nevndarlimur


Edna Maria Debes,
Nevndarlimur (Íðkaranevndin)


Katrin Jacobsen,
Badmintonsamband Føroya


Fróði Heri Poulsen
Bogaskjótisamband Føroya


Fróði Fríðason Jensen,
Borðtennissamband Føroya


Pól Esper Hansen,
Føroya Fimleikasamband


Peter Holm,
Flogbóltsamband Føroya


Christian F. Andreasen,
Fótbóltsamband Føroya


Gunnvá Wardum,
Frælsur Ítróttur Føroya


Gunn Ellefsen,
Hondbóltssamband Føroya


Petur Sigurð Johannesen,
Judo Føroyar


John N. Thomsen,
Kurvabóltur í Føroyum


Petur Elias Petersen,
Parasport Føroyar


Brandur í Dali,
Ríðisamband Føroya


Petur Hansen,
Róðrarsamband Føroya


Esmar Joensen,
Skjótisamband Føroya


Arnfinnur Helmsdal,
Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon


Rókur í Jákupsstovu,
Svimjisamband Føroya


Ingi Samuelsen,
Umboð fyri Menningarsambond



# Sersambondini

### Badmintonsamband Føroya
Katrin Jacobsen, forfólk
Mariann Øster, næstforfólk
Dia Lamhauge, nevndarlimur
Sofía Olsen, nevndarlimur/aðalskrivari
Johnny í Grótinum, nevndarlimur
Gunnar Gregoriussen, eykalimur

### Bogaskjótisamband Føroya
Fróði Heri Poulsen, forfólk
Jógvan Niclasen, næstforfólk
Nikkel Petersen, nevndarlimur
Pernille Krogh, varalimur

### Borðtennissamband Føroya
Fróði Fríðason Jensen, forfólk
Elinborg C. Mortensen, næstforfólk
Teitur H. Albinus, kassameistari
Pætur H. Albinus, skrivari
Hallur Thorsteinsson, nevndarlimur

### Flogbóltssamband Føroya
Peter Holm, forfólk
Guðrun L. Joensen, næstforfólk
Jóhan á Mýruni, nevndarlimur

### Fótbóltssamband Føroya
Christian F. Andreasen, forseti
Róin Schrøter, varaforseti
Anja Rein, nevndarlimur
Maria J. Joensen, nevndarlimur
Heri á Rógvi, nevndarlimur
Jóannes A. Prestá, nevndarlimur
Sólrun H. Sørensen, nevndarlimur

### Frælsur Ítróttur Føroya
Gunnvá Wardum, forfólk
Jorie Josephsen, kassameistari
Karin Kirke Petersen, skrivari
Jóhanna Vang, nevndarlimur

### Føroya Fimleikasamband
Pól Esper H. Hansen, forfólk
Heri S. Lamhauge, næstforfólk/breiddin
Jákup Svøðstein, amboðsfimleikur
Tinna Johannesen, fimleikagalla/fagnaðurin
Jóna Kristin Thomsen , estetiskur fimleikur

### Hondbóltssamband Føroya
Gunn Ellefsen, forfólk
Jógvan Emil Nielsen, næstforfólk
Heini Ellingsgaard, nevndarlimur
Durita Thomsen, nevndarlimur
Kristian Østergaard, nevndarlimur
Høgni Vilhelmsen, varalimur
Birgir Kass, varalimur

### Judo Føroyar
Petur Sigurð Johannesen, forfólk
Kristianna Solberg á Túgvu, næstforfólk
Sofus Debes Johannesen, kassameistari
Sanna Nolsøe Djurhuus, skrivari
Andrias Sumberg, nevndarlimur
Myrna Edmundsdóttir Fjallsbak, tiltakslimur
Magnus Pauli Glerfoss, tiltakslimur

### Kurvabóltsamband Føroya
John Norðbúð Thomsen, forfólk
Anna Jakobsen, skrivari
Sára Isfeldt Nes, kassameistari
Jesper D. Christoffersen, nevndarlimur
Magnus Jakobsen, nevndarlimur

### Parasport Føroyar
Petur Elias Petersen, forfólk
Hans Karl Højgaard, næstforfólk
Jóhan Lervig, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

### Ríðisamband Føroya
Brandur í Dali, forfólk
Zacharias R. Jacobsen, næstforfólk
Alexandra Kjeld, nevndarlimur
Kristian Krosstein, tiltakslimur
Andrias Nielsen, tiltakslimur

### Róðrarsamband Føroya
Petur Hansen, forfólk
Vár G. Hansen, næstforfólk
Rebekka Jacobsen, nevndarlimur
Mira Winther Klit, nevndarlimur
Unn Eldevig Petersen, nevndarlimur
Henrik Rahbek, nevndarlimur
Unn Eldevig Petersen, nevndarlimur
Jógvan S. Midjord, eykalimur
Elias Zachariassen, eykalimur

### Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon
Arnfinnur Helmsdal, forfólk
Andrass Joensen, næstforfólk
Súsanna Skylv, nevndarlimur

### Skjótisamband Føroya
Esmar Joensen, forfólk
Jón Jacobsen, nevndarlimur
Jónstein Johannesen, nevndarlimur
Jógvan Egholm, nevndarlimur
Tórur Fløtt, nevndarlimur

### Svimjisamband Føroya
Rókur í Jákupsstovu, forfólk
Alvi Hjelm, næstforfólk
Bjørg O. Jensen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Annika J. Olsen, nevndarlimur
Signhild Joensen, íðkaraumboð
Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur

# Menningarsambondini

### Billardsamband Føroya
Marius Thomassen, forfólk

### Boksisamband Føroya
Johannes Klein, forfólk

### Dartsamband Føroya
Petur Bláberg, forfólk

### Golfsamband Føroya
Ingi Samuelsen, forfólk

### Klintrisamband Føroya
Absalon Eysturoy, forfólk

### Poolsamband Føroya
Shehan Andrew Wanniya Bandara, forfólk

### Seyðahundasamband Føroya
Jónstein Petersen, forfólk

### Føroya Styrkisamband
Heini Hátún, forfólk

### Taekwondosamband Føroya
Noomi Kunoy Heradóttir, forfólk

### Tennissamband Føroya
Ingi Højsted, forfólk

# Nevndaryvirlit

### Olympiska nevnd Føroya
Elin H. Joensen, forseti
Magnus Tausen, varaforseti
Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur
Eva Vilhelm, nevndarlimur
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Edna Maria, nevndarlimur Íðkaranevndin

### Íðkaranevndin
Edna Maria Debes, forfólk
Torkil Veye, varafólk
Hávard Vatnhamar, nevndarlimur
Gunnva K. Jacobsen, nevndarlimur
Sára Maria Johansen, nevndarlimur

### Fíggjarnevndin
Elin H. Joensen, forfólk
Eva Vilhelm, nevndarlimur
Ólavur Ólavsson, nevndarlimur

### Ungdóms- og menningarnevndin
Kerstin Laksáfoss, forfólk
Guðrun Jacobsen, nevndarlimur
Magnus Debess Madsen, nevndarlimur

### Spf. Ítróttavedding
Magnus Tausen, forfólk
Rói Poulsen, varaforfólk
Hjørdis Gaard, nevndarlimur
Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, nevndarlimur
Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur
John Kjær, nevndarlimur
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Elin H. Joensen, stjóri

### Ítróttadómstólur
Anna Rein, forfólk
Sissal Kjartansdóttir Kristiansen, nevndarlimur
Heðin Joensen, nevndarlimur
Jóhan Lamhauge, nevndarlimur
Magnus Dam, nevndarlimur
Jóhan E. Simonsen, varalimur
Andrass Thomsen, varalimur
Anja Kristina Øster, varalimur

### Dopingnevndin
Jónfinn Thomsen, forfólk
Jóhanna Arge, nevndarlimur
Pál Weihe, nevndarlimur
Majbritt Lamhauge, varalimur

### Antidopingnevndin
Jónas Tór Næs, forfólk
Katrin Rubek Nielsen, nevndarlimur
Jóannes Guttesen, nevndarlimur

### Føroya Ítróttasavn
Palli Ziskason, kassameistari
Andrass Mortensen, nevndarlimur
Marjun Hanusardóttir, nevndarlimur
Helena Dam á Neystabø, nevndarlimur
Kristian Johansen, nevndarlimur

### Úrval
Ragnar Joensen, forfólk
Jóhanna á Bergi, nevndarlimur
Katrin Olsen, nevndarlimur
Rannvá Sólheim, nevndarlimur (MMR)
Páll Isholm, nevndarlimur
Signar Hilmarsson, skrivari

### Heiðursskjal Poul E. Petersen
Anna Rein
Heðin Mortensen
Marjun Kalsø
Signar á Brúnni
Gunvá við Keldu



# Forsetafrágreiðing hjá ÍSF 2025

**- frá apríl 2025 til aprí 2026**

## Ítróttur er meira enn bara ítróttur

**Hetta var yvirskipaða heitið á ítróttaráðstevnuni, sum ÍSF og Setrið í felag skipaðu fyri á triðja sinni í februar 2026. Hetta var eisini yvirskriftin á áheitanini til politisku flokkarnar í sambandi við valið. Og hetta kann eisini standa sum ein væl prógvað staðfesting, nú føroyskur ítróttur í felag hevur arbeitt við eini felags strategi fram ímóti 2026**

Tað, vit dagliga fáast við kring landið, snýr seg um so óendaliga nógv meira enn bara ítrótt.
Tað snýr seg um felagsskap, samanhangsmegi og trivnað. Tað snýr seg um vitan og menning. Tað snýr seg um møguleikar, sum ikki áður hava verið troyttir í Føroyum.

Aftur hetta farna árið hava vit sett fokus á børnini, breiddina og tey bestu. Vit hava verið til Oyggjaleikir, og vit eru av álvara farin undir at fyrireika Betri Oyggjaleikirnar í Føroyum.

Tað er tí við røttum ryggi, at vit í ÍSF hyggja aftur á hendingaríka ítróttaárið 2025/26.

### 1.0 Børnini

**»Børnini vilja bara sleppa at vera ein partur av felagsskapinum og hoyra til«. Nakað soleiðis segði Synnøva av Rana, samskipari av Barnaverkætlanini, á Ítróttaráðstevnuni í februar 2026. Í Barnaverkætlanini eru føroysk børn sloppin til orðanna, og fremsta ynskið er, »at hoyra til«.**
**Tað er eisini høvuðsmálið við barnaítrótti hjá ÍSF - at skapa góðar felagsskapir fyri øll**

### 1.1 Skúlaleikir 2025/26

Aftur í 25/26 skipaðu vit fyri Skúlaleikum. Hetta er nú vorðið eitt fast og væl skipað tilboð, sum børn og lærarar síggja fram til. Enn sum áður er høvuðsmálið ikki at vinna, men heldur at børnini hava tað stuttligt og fáa ein fevnandi felagsskap fyri øll. Slagorðið “Felagsskapur og rørslugleði fyri øll” er framvegis kjarnin í øllum.
Fleiri enn 2500 næmingar, ið eru omanfyri 90% av øllum bodnum skúlaflokkum, tóku lut í ár. Hetta prógvar, at Skúlaleikir er eitt bæði viðkomandi og væl dámt tilboð. Eftirmetingarnar siga tað sama: Allir lærarar – 100% – svara, at teir eru “sera væl” ella “væl” nøgdir.
Tá ið Skúlaleikir vórðu sett á stovn fyri fimm árum síðani í samstarvi við Betri samtakið, var málið greitt: At skapa eitt ítróttatiltak, sum kveikir rørslugleði, styrkir felagsskap og byggir brýr millum skúla og ítróttafeløg.
Vit meta, at hetta hevur hepnast til fullnar, og øll hava tikið sera væl ímóti leikunum.
Ársins Skúlaleikaflokkar 2025/26 vóru:
Fyri 4. flokkar: Skúlin á Fløtum
Fyri 5. flokkar: Vestmanna skúli
Fyri 6. flokkar: Skúlatrøð
Fyri 7. flokkar: Skúlin á Fløtum
Skúlaleikir vórðu skipaðir við undanumførum fyri miðdeild kring landið. Síðani var ein stórur finaludagur í Havn. Endabresturin var, tá ið stóri ítróttadagurin fyri 7. flokkar var á skrá.
Næmingarnir sluppu at royna seg í heili 21 ymiskum ítróttagreinum, og lagið var í topp.




Ein lærari tók soleiðis til eftir dagin: “Hesin dagurin var so góður – heilt perfektur. Tað var so frítt, og so nógvar ymiskar ítróttagreinar. Hetta MÁ vera komið fyri at vera!”
Vit kunnu ikki annað enn vera samd.
Stuðlar og samstarvspartnarar eru Betri samtakið, sum øll árini hevur verið høvuðsstuðul, Nordea grunnurin, sum eisini stuðlar, og Mentamálaráðið, Kommunufelagið, Heilsustýrið og Fróðskaparsetur Føroya.
Tað er við stórari gleði, at vit kunnu staðfesta, at Skúlaleikir halda fram fyri sættu ferð skúlaárið 2026/27!

### 1.2 Hvussu ávirka snús og nikotin barnaheilan?

Í 2025 skipaðu Heilsustýrið og Ítróttasamband Føroya (ÍSF) fyri einum felags átaki um nikotinnýtslu millum ungar íðkarar. Endamálið var at seta fokus á eina vaksandi avbjóðing, har snús og e-sigarettir síggjast í alsamt størri mun í ítróttaumhvørvinum. Vørurnar verða ofta framleiddar við smakkum og sniði, sum minna um bomm, hóast tær innihalda vanabindandi nikotin. Samstundis eru framvegis uppfatanir um, at nikotin kann bøta um avrik, hóast vísindaligt grundarlag ikki er fyri hesum.




Á tiltakinum legði lækni og granskari, Charlotta Pisinger, fram um heilsuligar avleiðingar av nikotini. Snorri Patursson frá Heilsustýrinum greiddi frá rákum í nýtslu og innflutningi, og Signar Hilmarsson frá ÍSF hevði fleiri framløgur um sambandið millum nikotin og ítróttaravrik. Har vísindin er púra greið, nikotin betrar ikki ítróttalig avrik.
Átakið vendi sær til venjarar, leiðarar, foreldur og íðkarar, og áhugin var stórur.

## 2.0 Breiddin

**Breiddin er grundarlagið undir øllum føroyskum ítrótti. Tað er í breiddini, vit grundleggja sterka felagsskapin. Tað er har, vit fáa rørsluføri og sosiala menning. Og er ikki ein rúgvismikil breidd, ja, so verður heldur ikki ein sterk elita. Breiddin fevnir jú bæði um tey, sum eru við, tí tað er stuttligt og samanhaldið er gott. Men hon fevnir eisini um øll tey, sum við tíðini kunnu fara at skara framúr.**

### 2.1 Breiddarpuljan

Breiddarpuljan hevur virkað í nærum tvey ár.
Íalt eru komnar 30 umsóknir inn og 697.509 kr. eru latnar til spennandi verkætlanir, sum hava til endamáls at styrka ítróttatilboðini kring landið og skapa meira fjølbroytt og breið tilboð.
Umsóknirnar spenna víða og hesar greinar eru umboðaðar: Tennis, Badminton, Fimleikur, Boksing, Judo, Pool, Fótbóltur, Borðtennis, Flogbóltur, Kappróður, Hondbóltur, Svimjing. Eisini er eitt nýtt ítróttafelag sett á stovn í samband við stuðul frá breiddarpuljuni.
Hetta er júst endamálið við breiddarpuljuni, sum hvørt ár kann stuðla við tilsamans 500.000 kr.
Breiddarpuljan skal gera tað møguligt hjá feløgum og sambondum at bjóða fleiri við, skapa trivnað og inklusjón og leggja upp til nýgg samstørv tvørtur um feløg og greinar.

### 2.2 Tryggur Ítróttur

Ítróttaráðgevingin www.trygguritróttur.fo hevur virkað í nærum tvey ár.
Í mars í ár byrjaði Eyðvør Klakstein sum nýggjur ráðgevi við ábyrgd av ráðgevingini, og saman við henni fer Eydna Danielsen eisini at taka sær av ráðgevingini og verkstovum fyri sambondum.
Fyrstu verkstovurnar verða settar á skrá í mai 2026. Endamálið við verkstovunum er, at sambond taka leiðreglur um tryggan ítrótt til sín og orða sínar egnu. Sum sambondini fara at gera egnar leiðreglur, fer ráðgevingin at gerast meira sjónlig. Saman fara vit at virka fyri øktari tilvitan um, hvussu vit øll eru við til at tryggja, at ítróttaumhvørvini kring alt landið eru trygg - og hvussu vit handfara sárbærar støður í sambondum og feløgum.

### 2.3 Hjálp til limagjald og ítróttaútgerð

Øll skulu kunna taka lut í ítróttaliga felagsskapinum - uttan mun til sosiala støðu. Tí hava ÍSF og Barnabati gjørt eitt samstarv. Tey, ið ikki hava ráð til limagjald, kunnu venda sær talgilt til Barnabata, og Barnabati vendir sær síðani til ítróttafelagið við áheitan um at útvega barninum frípláss.
Eisini ber til at fáa ískoyti til ítróttabúnar ella útgerð.

### 2.4 Tennissambandið við í Evropeiska tennisfelagsskapinum

Á ársaðalfundi í Belek í Turkalandi staðfestu limalondini í Tennis Europe, at føroyska tennisítróttin hoyrir heima í evropeiska tennisfelagsskapinum.




Umsóknin hjá Tennissambandi Føroya varð einmælt samtykt, og 1. januar 2026 bleiv Tennissambandið partur av Tennis Europe.
- Vit hava arbeitt miðvíst fyri at gerast limir í Tennis Europe í eina tíð, og at tað nú eydnaðist,
er ótrúliga gleðiligt og eitt týdningarmikið stig fyri at menna tennis í Føroyum, segði Ingi Heinesen Højsted, formaður í Tennissambandinum.
Limaskapurin merkir, at føroyingar kunnu luttaka í evropeiskum kappingum sum
einstaklingar og landslið - og umboða Føroyar. Tennis hevur havt stóra framgongd í Føroyum síðstu árini, og hetta er enn eitt stórt fet rætta vegin.
Tennis er ein av ítróttagreinunum á Skúlaleikunum í ár, og tennis verður ein av ítróttagreinunum á Oyggjaleikunum, sum vera í Føroyum í 2027.

## 3.0 Tey bestu

**Eingin ivi er um, at føroyskur ítróttur er í stórari menning. Størstu ítróttagreinarnar standa seg støðugt betri og fáa altjóða úrslit, sum vit bara kundu droymt um fyri fáum árum síðani. Men eisini í smærru greinunum síggjast góð úrslit og stinnir íðkarar. Tað er, sum føroyskur ítróttur í síni heild er lyftur á eitt annað stig, har vit geva teimum bestu góðar treytir at mennast.**

### 3.1 Ítróttafagnaðurin 2025

Leygarkvøldið 7. februar 2026 var Varpið í Klaksvík karmur um ÍtróttaFAGNAÐIN, sum ÍSF skipaði fyri. Tey, ið vórðu tilnevnd og heiðrað, eru bæði úrmælingar innan sína ítróttargrein og fólk, ið eru savnandi og mennandi fyri føroyska ítróttarlívið. Sjey heiðursløn vórðu latnar, og sum nakað nýtt slapp Føroya fólk at velja ársins ítróttaløtu 2025.
Høvuðsstuðar hjá ÍtróttaFAGNAÐINUM 2025 vóru: SMS, MBM, Bakkafrost, Betri, Atlantic Airways, Smyril Line og Klaksvíkar Kommuna

### 3.1.1 ÍtróttaNAVNIÐ 2025: Jana Mittún, hondbóltur

Við sínum avrikum hevur 22 ára gamla Jana Mittún gjørt vart við seg og verið ein berandi styrki í einum søguligum ári fyri føroyskan hondbólt. Jana gjørdi 32 mál og 29 málgevandi avleveringar, og hon skeyt avgerandi mál móti bæði Spania og Serbia. Eisini var hon við til at tryggja Føroyum ein sigur móti Íslandi í undankappingini til EURO 2026.
Hini tilnevndu vóru A-landsliðið í fótbólti hjá monnum og Vár Guriardóttir Hansen, røgving.




### 3.1.2 STJØRNUSKOTIÐ 2025: U21 mannslandsliðið í hondbólti

Ungu U21 menninir skrivaðu føroyska ítróttarsøgu og gjørdust fyrsta føroyska ungdómslið at vinna heiðursmerki til eitt endaspæl, tá teir vinnu bronsu til HM-endaspælið.
Hóast teir komu við upp á eitt sokallað “wildcard”, endaðu teir við at verða tað liðið, sum gjørdi flest fólk bilsin. Í bólkaspælinum fingu dreingirnir tveir sigrar og ein javnleik.
Hini tilnevndu vóru Marin Danielsen, fimleikur, og Pauli Danielsen, røgving.




### 3.1.3 ÍtróttaELDSÁLIN 2025: Jórun Frimannsdóttir Jacobsen og Jórun Biskupstø, KÍ

Í 30 ár hava Jórun og Jórun brúkt nógv av sínari frítíð uppá KÍ. Tær taka sær av venjingar- og dystarklæðum hjá bæði kvinnum, monnum og 1. deild. Ofta eru tær fleiri ferðir um dagin í vaskikjallaranum fyri at fáa stóra arbeiðið liðugt. Eisini baka tær til frásøgufólk, dómarar, vaktarfólk og innkrevjarar, tá ið KÍ hevur heimavøll.
Hini tilnevndu: Andrias Sumberg, Suðuroyar Judo, og Anna Dam, H71.




### 3.1.4 ÍtróttaVENJARIN 2025: Hjalti Mohr Jacobsen og Djóni Gaard Joensen – U21-landsliðið í hondbólti

Venjararnir hjá U21 manslandsliðnum, sum vann bronsu í HM fyri U21, venja dagliga nógvar evnaríkar leikarar í Kyndli og H71.



Við avrikinum í Póllandi vístu teir, at føroyskir venjarar eisini kunnu gera seg galdandi millum heimsins bestu. Smáu tillagingarnar, teir gjørdu til hesa kappingina, høvdu eyðmerktan virknað og týdning.
Hini tilnevndu: Sámal Jákup Djurhuus, Stjørnan og Durita Knudsen Poulsen, Støkk.

### 3.1.5 ÍtróttaFELAGSSKAPURIN 2025: Hósvíkar Róðrarfelag

Hósvíkar Róðrarfelag hevur ein savnandi leiklut í bygdini og í Sundalagnum. Felagið telist millum størstu róðrarfeløg í landinum, og úrslitini hava verið góð bæði til FM-róðurin – og til FM, NM, EM og HM í inniróðri.
Við mongu sjálvbodnu kreftunum skipar HVR javnan fyri ymiskum tiltøkum, tí trivnaður og felagsskapur er eitt av høvuðsøkjunum í Hósvíkar Róðrarfelag.




### 3.1.6 ÍtróttaSÓLSTRÁLAN 2025: Hansina Nesá – Fimleikafelagið Flog

Innan ítrótt fevnir Hansina breitt. Í fimleiki er hon venjari og íðkari hjá bæði Flog og Støkk, umframt at hon spælir fótbólt við Víkingi og á U17 landsliðnum.
Vit kenna hana tó best sum venjara og samskipara hjá Flog, har Hansina altíð er fyrikomandi, blíð og fitt í síni tilgongd. Hon er dugnalig at læra frá sær, tolin og ótrúliga kreativ.
Hóast sín unga aldur, stóð Hansina á odda fyri framførsluni hjá Flog til fimleikafagnaðin 2025.




### 3.1.7 Ítróttaløtan 2025: Sigursrúsur eftir HM-sigur á Spania - A-landsliðið í hondbólti við kvinnum

Spania hevði yvirvág meginpartin av dystinum, men føroysku kvinnunar góvust ongantíð, og móti endanum av dystinum komu vit eitt mál fram um.
Spania kempaði fyri at javna, men føroysku kvinnurnar tóku sakina í egnar hendur, øktu upp í tvey máls leiðslu og tryggjaðu sær siðurin.



### 3.1.8 Heiðursskjal Poul E. Petersen: Jústines Justinussen

Jústines Justinussen hevur ótroyttiliga arbeitt fyri StÍF í ein mansaldur. Hann hevur mestsum búð í ítróttahøllini á Skála í nógv Harrans ár, og er framvegis framvið í høllini hvønn dag. Hann hevur fylgt børnunum - og nú ræður um at taka sær av abbabørnunum, helt hann fyri á pallinum. Hann er framvegis venjari hjá U8-liðunum við dreingjum og gentum hjá StÍF.
Jústines Justinussen hevur spælt við Neistanum, har hann vann sítt einasta FM-heiti, StÍF og eisini á føroyska landsliðnum.
Fyri henda heiðurin fekk Jústines eisini gullnál ÍSF.



### 3.2 Úrvalsstuðulin fær 1,725 millión í 2025

Átta sambond fingu úrvalsstuðul í 2025. Í alt vórðu 1,725 mió. kr. býttar til sambond, sum hava prógvað høgt ítróttaligt støði og arbeiða miðvíst við at menna úrvalsíðkarar og landslið.



Endamálið við stuðlinum er at betra um karmarnar hjá føroyskum íðkarum og styrkja teirra møguleikar at røkka altjóða úrslitum. Sambært nevndini í Úrvali flytur føroyskur ítróttur seg støðugt fram á hægri stig, við vaksandi dygd og ágrýtni.

**Stuðulin fyri 2025 varð býttur soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Bogaskjótisamband Føroya: | 181.000 kr. |
| Fimleikasamband Føroya: | 30.000 kr. |
| Fótbóltssamband Føroya: | 125.000 kr. |
| Føroya Styrkisamband: | 168.000 kr. |
| Frælsur Ítróttur Føroya: | 105.000 kr. |
| Hondbóltssamband Føroya: | 784.000 kr. |
| Svimjisamband Føroya: | 276.000 kr. |
| Taekwondosamband Føroya: | 56.000 kr. |

Eftirspurningurin eftir stuðli var stórur, við umsóknum fyri yvir 10 mió. kr. Nevndin metir, at føroyskur úrvalsítróttur er í góðari menning, við fleiri sambondum, sum arbeiða miðvíst við at styrkja síni altjóða úrslit.

### 3.3 Nýggj úrvalsskipan

Úrvalsstuðulsskipanin varð endurskoðað í 2023, góðkend á aðalfundi í 2024 og sett í verk 1. januar 2025.
Stuðul verður nú veittur til sambondini í staðin fyri beinleiðis til íðkarar og lið. Sambondini hava sostatt ábyrgdina av at luta stuðulin víðari til síni úrvalslið og -íðkarar. Hetta gevur størri smidleika og tryggjar, at stuðulin verður brúktur har tørvurin er størstur.
Broytingin merkir eisini, at stuðul kann flytast, um íðkarar t.d. verða skaddir, og at minni peningur fer aftur til skipanina óbrúktur.
Umframt fíggjarligan stuðul fáa sambondini atgongd til úrvalstænastur, ið eitt stig á leiðini at skapa eina føroyska úrvalsmiðstøð.

### 3.4 Úrvalstænastur

Úrvalstænastur veita sambondum fakliga grundaðan stuðul til úrvalsítrótt við tí endamáli at styrkja menning og avrik.
Tænasturnar fevna um serfrøði innan ítróttafysioterapi, læknafrøði, kostráðgeving, sinnisvenjing og kropsliga venjing.
Endamálið er at tryggja samanhangandi og dygdargóðan stuðul til íðkarar.
Sambond kunnu søkja um tænastur og mæla til nýggjar serfrøðingar, sum eisini kunnu søkja um at verða partur av skipanini.
Tænasturnar eru fyrst og fremst ætlaðar úrvalsíðkarum, men eru eisini tøkar fyri onnur – tó uttan fíggjarligan stuðul.
Úrval fíggjar 50% av kostnaðinum fyri tænasturnar.
Meira kunning: https://isf.fo/urvalstaenastur
Úrvalssamskipari: Signar Hilmarsson

## 4.0 Oyggjaleikir 2025

**Summarið 2025 vóru 20. oyggjaleikirnir hildnir í Orknoyggjum. Í allarfagrasta summarveðri alla vikuna vunnu Føroyar leikirnar við 41 gull, 31 silvur og 23 bronsu - tilsamans 95 heiðursmerkjum.**



Oyggjaleikirnir í Orknoyggjum vórðu settir leygardagin 12. juli á Bignold Park í Kirkwall. Teir gjørdust einir leikir, ið føroyingar seint fara at gloyma. Orsøkirnar til tað eru fleiri. Ongantíð áður hevur eitt so lítið oyggjasamfelag hýst leikunum og sum okkum er sagt hevur tað næstan ikki verið betri veður í Orkoyggjum enn dagarnar upp undir, undir og eftir oyggjaleikirnar. Og so sjálvandi eisini tí, at tey um 100 ítróttafólkini, sum umboðaðu Føroyar avrikaðu so væl, at vit vunnu leikirnar.
Hetta er aðru ferð, at Føroyar hava vunnið oyggjaleikir. Fyrru ferð var í Álandi í 2009. Við tilsamans 95 heiðursmerkjum vunnu Føroyar sannførandi, Jersey gjørdist nr 2 við 75 heiðursmerkjum og Guernsey nr 3 við 59 heiðursmerkjum.
Føroyar kappaðust í bogaskjóting, badminton, fimleiki, svimjing, frælsum ítrótti, súkkling og triatlon.



### 4.1 Vatnberin, Oddvør Alberta Kimsdóttir

Tá ið Oyggjaleikirnir verða settir, er siðvenja, at hvør oyggj hevur sítt egna vatn við heimanífrá, og í Føroyum er siðvenja, at

yngsta ítróttarfólkið ber vatnið.
Til hesar leikirnar var tað 13 ára gamla Oddvør Alberta Kimsdóttir, ið ger amboðsfimleik, ið var yngsta ítróttarfólkið í føroyska hópinum. Tí fekk hon heiðurin at bera vatnið til Oyggjaleikasetanina.



### 4.2 Flaggberin, Róland Toftum

Føroyski flaggberin var 27 ára gamli Róland Toftum. Hann hevur svomið, síðani hann var barn. Hann hevur kappast á fleiri oyggjaleikum og øðrum altjóða kappingum fyri Føroyar - og vunnið fleiri heiðursmerki.
– Tað er ein øgiliga stórur heiður at fáa hetta álitið. Og eg eri sera spentur til bæði setanina og leikirnar, sigur føroyski svimjarin, venjarin og flaggberin Róland Toftum.



### 4.3 Annika Lindenskov vald í altjóða Oyggjaleikanevndina

International Island Games Association - IIGA - hevði aðalfund í Orknoyggjum, og Føroyar fingu umboð valt í nevndina.
Annika Lindenskov hevur drúgvar royndir í føroyskum ítrótti. Hon hevur arbeitt í Ítróttasambandi Føroya og verið á fleiri oyggjaleikum síðan 2008. Annika fer at brúka sínar royndir oyggjaleikum og IIGA at frama.
– Annika er ein fongur fyri IIGA, og vit gleða okkum til samstarvið, segði Andrew Inkster, formaður í IIGA, á aðalfundinum.



### 4.4 Føroyar kunna um Betri Oyggjaleikir

Á aðalfundinum hjá IIGA kunnaðu Føroyar eisini um Betri Oyggjaleikir, sum verða í Føroyum í 2027.
Teitur Samuelsen, formaður í føroysku oyggjaleikanevndini, og Solby Christiansdóttir, oyggjaleikasamskipari, greiddu frá fyrireikingunum til Betri Oyggjaleikir 2027 í Føroyum.
Undir framløguni kom millum annað fram, at leikirnir verða hildnir um alt landið, og at Føroyar vænta einar 2.500-3.000 luttakarar.
Í hesum sambandi varð nýggja heimasíðan hjá leikunum í Føroyum almannakunngjørd. Síðan er at finna á www.faroeislands2027.fo
Tað er samskiftisfyritøkan Sansir, sum hevur ment føroysku oyggjaleikaheimasíðuna.

## 5.0 Betri Oyggjaleikir 2027

**Fyrireikingarnar til Betri Oyggjaleikir hava av álvara tikið dik á seg hetta farna árið, og støðugt fleiri viðurskifti verða skipað og koma undir land.**
**Hóast fepurin ikki av álvara hevur rakt oyggjarnar enn, er greitt, at tað fyri nógv ítróttafólk er ein risa gularót at sleppa at kappast á heimavølli. Og almenningurin vísir eisini leikunum stóran áhuga.**
**Betri Oyggjaleikir eru í Føroyum 3. til 9. juli 2027. Vit vænta um 3.000 íðkarar úr 24 ymsum oyggjasamfeløgum.**

### 5.1 Fyrireikingarnar

Allar staðsetingar eru komnar upp á pláss, og sambondini kýta seg í góðum samstarvi við kommunurnar fyri at fáa leikvøllir og útgerð tilreiðar.
14 ítróttagreinar eru við. Tær eru: badminton, bogaskjóting, borðtennis, fimleikur, flogbóltur & sandflogbóltur, fótbóltur, frælsur ítróttur, judo, kurvabóltur, skjóting, súkkling, svimjing, tennis og triatlon. Kappast verður á 30 ymsum leikvøllum um alt landið.
Arbeitt verður áhaldandi við gisting, matveiting, flutningi og tilbúgving, eins og hol eisini er sett á arbeiðið at skelta leikirnar.
Í februar kom marknaðarføringsætlanin fyri leikirnar upp á pláss. Tvey høvuðspunkt eru í henni: at fáa sjálvboðin og at branda leikirnar í Føroyum. Átakið “Vit hava brúk fyri tær” fer í gongd í apríl ella mai 2026, har øll í Føroyum kunnu skriva seg upp til at vera sjálvboðin. Mett verður, at vit hava brúk fyri um 1200 fólkum.
Føroyar lótu altjóða oyggjaleikanevndini IIGA virksemisfrágreiðing í mars 2026. Tað er frágreiðing, sum vísir gongdina við fyrireikingunum, har Føroyar skulu greiða frá gongdini í fyrireikingunum. Hvat er avgreitt og hvat manglar. Hendan frágreiðingin er partur av fyrireikingini til undanvitjanina á sumri 2026, tá ið umboð fyri allar oyggjarnar koma á vitjan í Føroyum.

### 5.2 Maskotturin Klipp avdúkaður

Maskotturin hjá Betri Oyggjaleikum er eitt tjaldur, sum eitur Klipp.
30. mars 2026 varð tiltak á Torginum í SMS, har maskotturin Klipp varð avdúkaður og kom at heilsa uppá. Torgið var stúgvandi fult av fólki, og maskottarnir hjá samstarvsfeløgunum møttu eisini fyri at bjóða Klipp vælkomnum.
Uppskotið til Klipp hava Gunn Sloan Muller og sonurin, Finn Ólafur Gudmundarson, teknað. Tvey børn høvdu uppskot til navnið - tey vóru Frida Bogadóttir og Brandur A. Bárðarson.




Klipp er gjørdur í Føroyum á klæðnaatstøðisdeildini á Glasi. Arbeiðið fór í gongd í november í fjør.
Tey vórðu øll heiðrað á tiltakinum í SMS.
Á vári 2025 var teknikapping til maskottin, og heili 481 tekningar komu inn.
Tey seks samstørvini hjá Betri Oyggjaleikum og ÍSF lótu hvør sítt gávukort upp á 2.000 krónur. Samstørvini eru Betri, Smyril Line, SMS, Bakkafrost, MBM og Atlantsflog.

### 5.3 Poula er ítróttafyriskipari

Poula Michelsen úr Havn er ítróttafyriskipari á Betri Oyggjaleikum. Tað vil siga, at hon fer at standa á odda fyri ítróttaliga partinum av leikunum. Saman við 14 sambondum í Ítróttasambandi Føroya er høvuðsuppgávan hjá henni at tryggja, at allir hentleikar og kappingar eru í samsvari við reglugerðina hjá IIGA. Betri Oyggjaleikir verða størsta tiltak í Føroyum higartil, og afturat ítróttinum eru ein ørgrynna av øðrum uppgávum, sum skulu loysast. Alt frá gisting til tilbúgving og frá sjálvbodnum til setan og endahátíð. Poula Michelsen umsitur eisini sjálvbodna økið og alla marknaðarføringina av leikunum.




Poula Michelsen tók við starvinum sum ítróttafyriskipari 1. september. Starvið var 0,4 fram til ársskiftið, og frá 1. januar 2026 er starvið fulla tíð. Hon er 49 ár, úr Havn og útbúgvin marknaðarføringsøkonomur, HD í organisatión og leiðslu og MA í lóg, og hevur arbeitt við marknaðarføring, leiðslu og samskipan síðani 2006.

### 5.4 Koddar og flytigóðs

Til Betri Oyggjaleikir 2027 koma væntandi millum 2.700 og 3.000 gestir til Føroya. Nú eru góðir lunnar lagdir undir, at gestirnir fara at fáa góðan svøvn hesar næturnar. Hotel Brandan skiftir nevniliga koddarnar á hotellinum út í hesum døgum, og tey hava latið Betri Oyggjaleikum 2027 koddarnar.
- Koddarnir á Hotel Brandan skulu skiftast út. Vit eru eitt fýra-stjørnu green-key hotell, góðskan skal vera í hásæti, og vit skulu fylgja ávísum reglum um viðlíkahald, sigur Jónina Tegeder, housekeeping-leiðari á Hotel Brandan.
Hotellið hevur áður latið stovnum í landinum ymist, tá ið tað verður skift út. Hesa ferð gjørdist tað Betri Oyggjaleikir 2027.
Í sambandi við oyggjaleikirnar eru lutir, sum verða brúktir umaftur og umaftur - og sum tí verða fluttir ímillum vertsoyggjarnar. Umframt fløgg, heiðursmerkjapútur og flaggstengur var eisini ein serstakur skulpturur við í góðsinum. Talan er um listaverk, ið ber heitið A Sporting Chance for Peace, sum listamaðurin Donald Brown hevur gjørt.
Verkið hongur uppi forhøllini í Svimjihøllini í Gundadali, og har fer tað at hanga, inntil leikirnir eru av.
Flytigóðsið er komið úr Orknoyggjum til Føroya, og tá ið Betri

Oyggjaleikir í Føroyum eru av í 2027, skulu Føroyar senda Isle of Man útgerðina, tí Man hýsir leikunum í 2029.

## 6.0 Annað virksemi hjá ÍSF

**Farna árið hevur verið sera virkið hjá ÍSF. Vit hava søkt eftir - og sett - nýggjan aðalskrivara, umframt at vit hava hildið hópatals skeið, fyrilestrar og ráðstevnur.**

### 6.1 Gestarøða á aðalfundinum 2025



Á aðalfundinum 2025 var Jonhard Mikkelsen gestarøðari við eini framúrskarandi røðu. Hann segði millum annað:
*Ørskapurin byrjar við, at vit gera slíkt, sum onnur stillisliga hava samtykt, at vit ikki kunnu, vit standa okkum, har vit ikki áttu at kunnað staðið okkum, vit flyta okkum inn í framtíðina á ein hátt, sum vit ikki áttu at havt styrki og mátt til.*
*Stundum verða vit borin saman við provinsbýir í øðrum londum, sum hava 50.000 íbúgvar, men samanburður ber ikki til – tí vit eru eitt land og ikki nakað so litleyst sum ein provins í einum stórum landi. Tað er bara hagtalsfrøðiliga, at 50.000 er 50.000 – munurin millum provins og land er ómetaligur. Og vit eru eitt land.*
*Vit eru eitt lítið land, og vónirnar til eitt lítið land eru ikki stórar, og tí halda onnur, at vit skulu gera tað, sum sømir seg einum lítlum landi. Sama stigskipan sum í øllum øðrum viðurskiftum. Vit mugu ikki  vera hugmóðig og halda, at vit kunnu kappast við tey stóru – tí grundreglan er, at  fleiri merkir betri, flest merkir best.*
*Men tað er, sum um okkara egnu ílegur rópa: Vit góðtaka ikki tykkara premissur – tykkara fortreytir. Vit gera tað, sum okkum hóvar, og stundum fær tað, sum vit vilja og orka, onnur at ógvast við. Vit hava ivaleysa leingi fingið at vita, at vóru ov smá og ov fátæk og ov veik til, at vit kundu rætta ryggin av álvara.*
Øll røðan kann lesast á heimasíðuni hjá ÍSF.

### 6.2 Nevndarskeið fyri ítróttarfeløg

ÍSF hevur tikið stig til at skipa fyri skeiði fyri nevndarlimum í føroysku ítróttafeløgunum.
Skeiðshaldarar vóru Katrin á Neystabø og Andras Nolsøe, ítróttarágevarar hjá ÍSF.
Hetta er partur av aðalmálinum í strategiini at "fjálga um sjálvboðin". Undirtøkan hevur sera góð.
Skeiðið er sett saman av bæði teori og praksis. Teoretiski parturin snýr seg um nevndararbeiði í praksis, meðan tann praktiski parturin er bygdur upp sum ein workshop, har nevndin saman arbeiðir við ymiskum uppgávum, sum eru viðkomandi fyri júst teirra felag.
Trý skeið vóru hildin í 2025 og eitt higartil í 2026.
Frameftir fer ÍSF at bjóða skeiðið við jøvnum millumbilum, tí afturmeldingarnar hava víst, at hetta er eitt viðkomandi og neyðugt skeið. Ætlanin er eisini at halda skeiðið kring landið.

### 6.3 Ítróttatingið 2025 - Venjarin hjá børnunum, breiddini og teimum bestu

27. og 28.mai bjóðaði ÍSF til árligt Ítróttating. Annað varð hildið í Havn og hitt í Klaksvík.
Lokalu gestarøðarnir í Havn vóru Jórun Ludvig, ungdómslandsliðsvenjari hjá HSF og Eli Hentze, samskipari av venjaraútbúgvingunum hjá FSF.
Høvuðsrøðari var Claus Dalgaard-Hansen, ið telist millum royndastu og kendastu venjara- og talentmennarar í Norðurlondum. Hann er kendur fyri at síggja íðkarar sum "heil menniskju" – ikki bara sum ítróttafólk. At skapa trygg, kveikjandi og mennandi venjingarumhvørvi, og at varpa ljósa á týdningin av samstarvi millum feløg, útbúgvingarstovnar, foreldur og sambond fyri at tryggja eina heildarmenning av ungum íðkarum.




Spurningar, ið vórðu viðgjørdir, vórðu millum annað: Hvussu gera vit tað lættari at gerast og vera venjari? Hvussu menna vit dygdargóðar venjarar? Og hvussu skapa vit karmar, har venjarar trívast, mennast og verða virdir, sum lyklapersónarnir í føroyska ítróttafelagsskapunum?
Claus tosaði greidliga um, hvussu vit kunnu tryggja fleiri sjálvbodnar venjarar og tryggja okkum, at tey halda á longri, sum venjarar í felagsskapinum. Eisini kom hann væl inn á møguleikar í at foreldravenjarum, tá ung gerast venjarar og hvussu feløg kunnu arbeiða við venjaratoymum fyri at fáa fleiri uppí.
Til ber at síggja allar fyrilestrarnar frá Ítróttatinginum á okkara Youtube-kanal: ÍSF - Ítróttasamband Føroyar: "Ítróttatingið 2025 - Claus Dalgaard-Hansen: Venjarin hjá børnunum, breiddini og teimum bestu."

### 6.4 Heilsumálaráðið, ÍSF og Heilsustýrið skrivað undir samstarvsavtalu

2. juni skrivaðu Heilsumálaráðið, ÍSF og Heilsustýrið undir samstarvsavtalu, sum hevur til endamáls at styrkja fólkaheilsuna í Føroyum og at skapa góðar karmar fyri heilsugóðum lívi í góðum og tryggum felagsskapum.
Avtalan byggir á eina felags sannføring um, at góð fólkaheilsa er ein fortreyt fyri trivnaði og vælferð, bæði hjá einstaklinginum og í samfelagnum sum heild. Øll skulu kunna liva eitt heilsugott lív, frá barni til ellisár, og hava møguleika at vera virkin í heilsugóðum og tryggum felagsskapum.



**Umhvørvini kring ítróttin**
At íðka ítrótt hevur stóran týdning fyri fólkaheilsuna, og tað er umráðandi, at umhvørvini kring ítróttin eisini stuðla undir heilsugóðan atburð uttanfyri sjálvan ítróttapallin.
Ítróttur snýr seg nevniliga ikki bert um rørslu, men eisini um tey virði og vanar, sum verða skapt kring leikvøllin.
Tí leggja samstarvspartarnir seg eftir at arbeiða fyri, at hvørki innan- ella uttandura ítróttaøki fara at loyva nýtslu av heilsuskaðiligum vørum so sum sigarettum, snúsi, nikotinvørum, orkudrykkjum, rúsdrekka ella rúsevnum. Harumframt er málið, at tað skal gerast lættari hjá øllum í og kring ítróttin at velja heilsugóðan kost.
Samstarvið snýr seg eisini um at arbeiða saman um átøk, sum hava til endamáls at økja um rørslu og betra um sálarligu heilsuna hjá føroyingum.
Við avtaluni vilja partarnir skipa átøk og kunning, har dentur verður lagdur á, at: *skapa trygg og heilsugóð umhvørvi, menna fyribyrgjandi og heilsufremjandi tiltøk saman við ítróttafeløgunum, brúka styrkirnar hjá hvørjum einstøkum samstarvsparti til at røkka góðum og varandi úrslitum.*
Fyrstu átøkini í samstarvinum eru ein Fólkaheilsuráðstevnu og ein Ítrótta- og rørsluviku, sum verða skipað í felag og við einum felags endamálið. Endamálið hetta fyrsta árið er, at savna arbeiðspláss og borgarar í Føroyum um rørslu. At gera rørslu sjónliga í gerandisdegnum. At styrkja trivnað, arbeiðsgleði, felagsskap og liðanda. Og soleiðis seta rørslu á dagsskrá, sum eitt heilsufremjandi leiðsluátak. Tí hetta er ein felags íløga í menniskju og okkara samfelag.
Samstarvspartarnir eru samdir um, at fólkaheilsa er ein felags ábyrgd og fegnast um, at politiski og heilsufakligi myndugleikin nú ganga saman í samstarv við hægsta felagsskapin innan ítróttavirksemi í Føroyum.

### 6.5 Ítróttur er meira enn bara ítróttur - ráðstevna um ítrótt 2026

Triðja árið á rað skipaðu ÍSF og Setrið í felag fyri spennandi ítróttaráðstevnu. Eins og undanfarin ár var skráin full av viðkomandi føroyskum fyrilestrum, framløgum frá útlendskum granskarum og kjaki.
Ráðstevnan hevði heitið: *Ítróttur er meira enn bara ítróttur*, og aftur hesuferð varð støðið tikið í børnunum, breiddini og teimum bestu - býtt upp í trý ymisk evni.
Fyrsta evnið var *»ítróttur og samfelag: sólskinssøgur og veruleiki«*. Hetta evnið tók útgangsstøði í børnunum, og á skránni var nýggj vitan úr Føroyum og úr øðrum londum.
Annað evnið var *»ítróttur sum heilivágur«*, har vit m.a. hoyrdu ein føroying greiða frá, hvussu økt rørsla hevur minkað um heilivágin. Eisini fingu vit sjónarhornið hjá fleiri føroyskum kommununum, og hvussu tær síggja sína ábyrgd, tá tað kemur til ítrótt, ábyrgd og møguleikar.
Triðja evnið var *»úrvalsítróttur – at lyfta føroyska potentialið«*. Her hoyrdu vit A-landsliðsvenjaran hjá monnum og ítróttstjóran í HSF greiða frá, hví tað gongur so væl í løtuni – umframt at vit hoyrdu um útlendska gransking í dátudrivnari styrkivenjing.
Eisini var kjak og høvi at seta spurningar.
Ráðstevnan var ætlað sum íblástur hjá fólki, sum eru virkin í ítrótti, starvast við børnum, eru partur av politisku skipanini ella arbeiða innan kommunala geiran og heilsuverkið.

### 6.6 Politisk valevni á vitjan

Undir valstríðnum til løgtingsvalið 2026 bjóðaði ÍSF politisku flokkunum til eitt kunnandi tiltak. Áhugin var sera stórur.
Vit tóku ímóti í Høllini á Hálsi, har 682 børn vóru til Skúlaleikir - og valevnini sluppu eisini at royna seg.
Síðani fóru vit í Svimjihøllina, har forsetin, Elin H. Joensen, ítróttaráðgevin, Katrin Dam á Neystabø, aðalskrivarin seinastu níggju árini, Petur Mittún, og komandi aðalskrivarin, Marita Debess Magnussen greiddu frá.
Eisini vístu hondbóltsleikararnir, Bjarta Osberg Johansen og Elias Ellefsen á Skipagøtu, á, hví IOC limaskapur má tryggjast - ongantíð ov skjótt.
Valevnini fingu í høvuðsheitum fýra høvuðsboðskapir við sær:

**1. Ítróttur er ein íløga í eitt burðardygt føroyskt samfelag**
Trupulleikin er, at børn og ung uttan sunnar felagsskapir eru í størri vanda fyri at enda á skeivari leið. Kropsligt óvirkni er somuleiðis ein høvuðsorsøk til lívstílssjúkur og sálarligar avbjóðingar. Hetta trýstir bæði heilsuverk, vælferðarskipanir og sosialar skipanir. Tað er dýrt. Men venjing er heilsufremjandi – og sambært løgregluni eru sunnir felagsskapir besta fyribyrgingin ímóti, at børn og ung enda á skeivari kós.

**2. At styrkja breiddina er at styrkja samfelagið innanífrá. Tað er ein íløga í felagsskap, samanhangsmegi og trivnað**
Avbjóðingin er, at føroyskt ítróttalív í stóran mun byggir á sjálvboðið arbeiði og sterk feløg kring landið. Men sum virk-

semið veksur, økist tørvurin á betri kørmum og stuðli. Uttan sterk ítróttafeløg missa vit eina av týdningarmestu sosialu skipanunum í Føroyum - og sterkastu samanhangsmegina.

**3. Úrvalsítróttur er ein íløga í samanhald, tjóðskaparligt erni og menning av føroyskum ítrótti sum heild**

Krøvini økjast, so hvørt, sum altjóða úrslitini gerast betri. Eitt nú til betri úrvalsmenning, sterkari fakliga vitan og bestu karmar. Hartil er tað ein stór forðing, at Føroyar ikki hava limaskap í IOC. Við verandi støðu fáa vit illa skipað menningina av fremstu íðkarum okkara - og nógvir íðkarar noyðast at umboða Danmark, skulu tey kappast altjóða.

**4: Eitt føroyskt Ítróttahús er ein strategisk samfelagsíløga í føroyskan ítrótt, fyribyrging og fólkaheilsu**

Avbjóðingin er, at ÍSF umboðar 26 sambond, 155 ítróttafeløg og nærum allar íðkarar í landinum, men enn hava vit einki fast tilhaldsstað, sum kann savna og menna føroyskan ítrótt. Vantandi karmar til ÍSF merkir vantandi karmar til fyribyrging, felagsskap og samanhangsmegi - og verri líkindi fyri samstarvi og felagsskap millum ítróttagreinar - og verri møguleikar fyri gransking og felags menning.

Tilmæli til valevnini:

- Styrkið játtanina til ÍSF
- Játtið hevtina av metta kostnaðinum til eitt Ítróttahús
- Streingið á fyri at fáa føroyskan limaskap í IOC
- Raðfestið ÍSF sum samstarvsfelaga hjá heilsumyndugleikunum

## 6.7 Heiðurstekin frá ÍSF

**Silvurnálir:**

Á aðalfundinum 24. mai 2025:

- Katrin Jacobsen - BSF
- Gunnvá Wardum - FÍF
- Eydna Maria Debes - ÍSF
- Eva Vilhelm - ÍSF

Á flaggdegnum 25. apríl 2025:

- Petur Hansen - RSF

**Gullnálir:**

Á flaggdegnum 25. apríl 2025:

- Hans Petur Hansen - RSF

30. august 2025:

- Zacharias R. Jakobsen - RF

ÍtróttaFAGNAÐUR 2025 7. februar 2026:

- Jústines Justinussen - STÍF

28. februar 2026

- Petur Mittún - fráfarandi aðalskrivari ÍSF

## 6.8 ÍSF fingið nýggjan aðalskrivara

Áhugin var stórur, tá ið ÍSF søkti eftir nýggjum aðalskrivara. Tá ið avtornaði varð tað Marita Debess Magnussen, sum varð í starv.

Marita Debess Magnussen er 50 ára gomul, útbúgvin PhD í Heilsuvísindi, umframt at hon er kandidatur í Medisinskari Mikrobiologi og Bsc í Lívfrøði. Hon hevur drúgvar royndir bæði frá tí almenna, frá privata vinnulívinum og frá ítróttalívi.

Marita hevur eitt stórt netverk og gott innlit í politiskar og samfelagsligar skipanir. Nógv kenna hana helst frá tíðini við korona, tá ið hon átti og rak rannsóknarstovuna Thetis.

– ÍSF hevur eina lyklarollu í at menna bæði breiddina og úrvalið, og eg síggi ein stóran møguleika at styrkja samstarvið, økja um inntøkurnar og skapa betri karmar fyri feløg, sambond og sjálvboðin. Eg síggi fram til at arbeiða strategiskt og miðvíst, so føroyskur ítróttur stendur enn sterkari, bæði heima og altjóða, sigur nýggi aðalskrivarin í ÍSF.

Elin Heðinsdóttir Joensen, forseti, fegnast um nýggja aðalskrivaran.

– Vit ynsktu ein ágrýtnan og virkisfúsan aðalskrivara, sum áhaldandi kann vera við til at menna ÍSF og føroyskan ítrótt sum heild. Tað eru vit sannførd um, at Marita kann. Hon dugir eisini at síggja týdningin av samspælinum millum breiddina og tey bestu. Vit gleða okkum til fáa Maritu í ÍSF-toymið, sigur Elin Heðinsdóttir Joensen.

Marita Debess Magnussen byrjaði í starvinum sum aðalskrivari í ÍSF 1. mai 2026.




## 7.0 Endi

**Tað er eingin ivi um, at ítróttur er meira enn bara ítróttur.**

Vit eru sannførd um, at íløgur og orka, sum vit leggja í ítrótt, eru við til at menna eitt burðardygt føroyskt samfelag.

Vit vita jú, at lívstílssjúkur, sálarligar avbjóðingar, fleiri óhjálpin eldri - og ung, ið enda á skeivum leiðum - trýsta bæði heilsuverk, vælferðarskipanir og sosialar skipanir. Tað er dýrt. Men venjing er heilsufremjandi. Og sambært løgregluni eru sunnir felagsskapir besta fyribyrgingin ímóti, at børn og ung enda á skeivari kós.

Vit eru sannførd um, at styrkja vit breiddina, so styrkja vit samfelagið innanífrá. Tí breiddin er felagsskapur, samanhangsmegi og trivnaður.

Vit eru sannførd um, at íløgur og orka, sum vit leggja í úrvalsítrótt, rindar seg aftur við betri samanhaldi, tjóðskaparligum erni og menning av føroyskum ítrótti sum heild.

Ítróttur snýr seg eins nógv um fyribyrging, fólkaheilsu og tjóðskaparligt samanhald, sum um rørslu, reglur og úrslit. Ítróttur er jú meira enn bara ítróttur.

Vit hava eina stóra ábyrgd. Tað krevur, at vit skipa okkum væl og samstarva.

Hetta komandi árið fara vit at arbeiða við at menna strategiina víðari. Hon hevur ført okkum langt fram á leið higartil, og vit fara tí at byggja víðari á góða arbeiðið í tøttum samstarvi við sambondini.

Hetta komandi árið fara vit av álvara at merkja, at Betri Oyggjaleikirnir nærkast.

Og hetta komandi árið fara vit áhaldandi at seta fokus á børnini, breiddina og tey bestu.

Tað gera vit í góðum samstarvi við feløg, sambond, politiskar myndugleikar, land og kommunur - og hópatals stuðlar, sum vilja føroyskum ítrótti væl.

Tað er tí við røttum ryggi og góðum treysti, at vit í ÍSF líta fram ímóti ítróttaárinum 26/27.

# Býtið 2023-2026




# 2025: Býtið, Altjóða puljur og Úrval






# Umboðstingið



# Starvsnevndin



# Badminton

Badmintonsamband Føroya / bsf@bsf.fo / Tel 582300 / www.bsf.fo

**Tað, sum stendur eftir fyri 2025, er sjálvandi fantastiska úrslitið á Oyggjaleikunum í Orknoyggjunum.**

## Strategi

**Breidd:**
Hetta kappingarárið hava vit havt tríggjar breiddarvenjingar fyri leikarum úr bólkunum U11, U13, U15 og U17/19. Ætlanin var at skipa eina stuttliga og øðrvísi venjing fyri breiddini, sum eisini kann styrkja samanhaldið og ítróttargleðina millum feløgini.
Vit hava eisini skipaða venjing í parabadminton saman við parasport.

**Úrval:**
Kappingarárið 2024/25 hevur BSF gjørt sáttmála við Wong Fai Yin, landsliðsvenjari. Fyri úrvalsleikarum varð skipað talentvenjing fyri U15-, U17- og U19. Í 2025 høvdu vit fimm talentvenjingar.
BSF skipar eisini fyri kappingum uttanlands fyri bruttolandsliðshópinum og talenthópinum. Eitt mál er at stuðla yngri spælarum, so tey mennast til at fara til Future Series kappingar. Somuleiðis skipa vit savningar fyri bruttohópinum. NB fysioterapi var við okkara landsliði til Oyggjaleikirnar í Orknoyggjunum. Tí byrjaðu vit í seinnu hálvu av 2025 nýtt samstarv við NB fysioterapi, har ætlanin fyrst og fremst er skaðafyribyrging. BSF hevur somuleiðis havt fyrilestur um mentala venjing til tí einu savningina hjá bruttohópinum.

**Sjálvboðin:**
Okkara sjálvbodnu hjálpa til kappingar, sum ferðaleiðarar og annað, sum hevur týdning í badmintonumhvørvinum.
Vónandi fer BSF at kunna uppraðfesta umsitingarliga arbeiðið, sum krevur nógva orku av nevndarlimum, og at vit kunnu fjálga um okkara sjálvbodnu, okkara spælarar og venjarar.

**Ítróttagleði:**
Vit eru partur av Skúlaleikum. Hetta samstarvið er gevandi og skapar nýggj sambond í okkara ítrótti.
BSF stuðlaði undir, at HBF saman við Miriam í Grótinum skipaði fyri Girl Power badmintontiltaki á sumri í 2025. Genturnar høvdu eina góða og stuttliga legu, har ið bæði samanhald, spæl og badmintonvenjing var á skránni.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**
4 FM fyri børn og ung. Tær 4 FM kappingarnar eru í single, FM-lið, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki
4 kappingar í blandaðum tvímansleiki - allir aldursbólkar
4 kappingar í tvímansleiki - allir aldursbólkar
5 Grand Prix kappingar í single fyri bæði børnum, ungum og vaksnum
3 FM fyri seniorar, - tær 3 FM kappingarnar eru í single, double og mix
3 U9 kappingar, har ið øll luttakandi fáa heiðursmerki
**Kappingar í uttanlands:**
Badminton Europe summarlega og lið-kapping saman við Íslandi og Grønlandi í Reykjavík juli 2025
Future series í Reykjavík í januar 2025 - senior
Odense - kapping fyri seniorar í mars 2025
ISI cup - Danmark, kapping fyri leikarum U19 í mars 2025
Farum í mai 2024 ungdómsleikarar U15
Herning mars 2025 fyri U17
Future Series í Norra í oktober 2025
EM fyri lið U17 á Lanzarote í desember 2025
Badminton Europe Summer school fyri fyrsta árs U17 - hesaferð hildin í Danmark í juli 2025
Oyggjaleikir á Orknoyggjunum fyri seniorar í juli 2025

## Virksemi annars

Tað, sum stendur eftir fyri 2025, er sjálvandi fantastiska úrslitið á Oyggjaleikunum í Orknoyggjunum í 2025. Føroyska badmintonlandsliðið gjørdi bart. Vit vunnu gull í øllum einstaklingakappingunum og eisini flott silvur- og bronsuheiðursmerkir. Sera gott avrik frá øllum landsliðshópinum, teirra venjarum og ferðaleiðarum.
Eitt mál hjá BSF hevur verið at fáa eina altjóða kapping til Føroyar. Í 2023 var Small State fyri fyrstu ferð hildið í Malta. Í 2024 var kappingin í Kýpros, og tá avgjørdi nevndin, at vit skuldu royna at søkja um at komandi Small State kappingin verður í Føroyum. Í 2026 hava sjey smátjóðir boðað frá luttøku. Hetta krevur nógva orku av nevndini, men vit eru sera spent at kunna bjóða til so stóra kapping í Føroyum.
Í 2024 eydnaðist tað okkum at taka upp samstarv við Grønland og Ísland um North Atlantic Camp. Legan er stuðlað av Badminton Europe (BEC). Í 2025 var legan í Íslandi. Legan var fyri leikarar í U15 og U17.
Vit senda á hvørjum ári í øllum førum tveir leikarar til Summer School, sum er ein Badminton Europe summarlega. Tó eydnaðist tað okkum í 2025 at fáa tríggjar leikarar við.
Í 2025 sendu vit seniorleikarar til Future Series kapping í Norra. Somuleiðis sendu vit U17 til EM fyri lið. Hetta er partur av ætlanini, sum er, at føroyskir leikarar halda seg fram at kappingum. Sum er, hevur tað eydnast Rúna Øster at skapa samband til Italia, har ið hann hevur verið til royndarvenjingar.
BSF hevur havt forfólkafundir saman við feløgunum nakrar ferðir um árið, so vit vita, hvat rør seg hjá feløgunum.



**Nevndarforfólk:**
Katrin Jacobsen

**Nevndarlimir:**
Mariann Øster, næstforfólk
Dia Lamhauge, nevndarlimur
Sofía Olsen, nevndarlimur/aðalskrivari
Johnny í Grótinum, nevndarlimur
Gunnar Gregoriussen, eykalimur

**Aðrar nevndir:**
**Kappingarnevnd:** Leggur allar kappingar tilrættis sambært galdandi reglugerð.
Rikke Berg Larsen
Arnhold Olsen

**Dómsnevnd:** Viðgerð og tekur avgerðir í kærumálum.
Fróði Hansen
Aksel Poulsen
Magnus Gaard

**Lønt starvsfólk:**
Sofía Olsen, aðalskrivari 0,2
Aksel Poulsen, fíggjarfólk 0,1
Wong Fai Yin, landsliðsvenjari
Venjarar til talent og breiddarlið

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Framtíðarætlanir

Av øðrum ætlanum fyri komandi árini eru hesar tær, sum vit vilja arbeiða við:
- Arbeiða við fyrireikingum til Oyggjaleikir 2027 og Small State 2026 í Føroyum. Dómarar til hesi eru partur av okkara sjálvbodnu, og arbeitt verður við einum dómaraskeiði til tey.
- Sosial átøk fyri sjálvbodnum og spælarum.
- Framhaldandi úrvalsvenjingar við ungdómslandsliðum frá U15, U17 og U19.
- Framhaldandi vikuligar venjingar fyri seniorar.
- Saman við landsliðsvenjaranum skipa nøkur venjaraskeið.
- Luttaka í kappingum í Danmark og aðrastaðni í Evropa.
- Byrja at gera strategiska ætlan fyri arbeiðið hjá BSF komandi fimm árini. Hetta er í samstarvi við BWF.
- Seniorar fara til EM í mixed team í desember 2026.

## Feløg og limatøl

HBF
KBF
MBF
VÍF
Nápur
Badmintonfelagið á Sandi
ÍF (møguliga ikki aktivt komandi ár)

# Bogaskjóting

Bogaskjótisamband Føroya / bskf@bskf.fo / Tel 225077 / www.bskf.fo

**Intensiveraða og miðvísa landsliðsvenjingin heldur fram, og tað sást eisini aftur í fleiri góðum úrslitum í altjóða kappingum í 2025.**

## Strategi

**Breidd:**
Lokalu feløgini norðanfjørðs hava styrkt arbeiðið við teimum ungu skjúttunum. Í Suðuroy gongur meira striltið at hava reguligar venjingar. Styrkta arbeiðið norðanfjørðs sæst aftur í størri undirtøku í innandura vetrarkappingini. Eisini í 2025 luttóku útvaldir skjúttar í í kappingini um norðurlendska ungdómsmeistaraskapin í bogaskjóting, NUM, sum hesa ferð var í Svøríki. BSKF var við í Skúlaleikum, har bogaskjóting var millum ítróttargreinarnar hjá 6. flokkunum. Áhugin var stórur og sást aftur, tá feløgini fóru undir venjingarnar aftur eftir summarfrítíðina og í undirtøkuni í vetrarkappingini. BSKF gjørdi í 2025 av at styrkja ungdómsarbeiðið - millum annað við at skipa fyri venjingarlegum fyri teimum ungu og eisini skipa fyri venjingarlegum, har bæði vaksin og ung eru við.

**Úrval:**
Intensiveraða og miðvísa landsliðsvenjingin heldur fram, og tað sást eisini aftur í fleiri góðum úrslitum í altjóða kappingum í 2025. Serliga compoundskjúttin Jóannes Poulsen gjørdi vart við seg. Beint eftir Oyggjaleikirnar í Orknoyggjum - har hann eisini fekk góð úrslit - vann hann í juli silvur í altjóða kappingini European Grand Prix 2025 í Arnhen í Hollandi. Tað er størsta avrikið higartil í føroysku bogaskjótisøguni. Í mai vann Jóannes eitt áttandapláss í vælumtóktu slovensku kappingini Veronica's Cup. Sámuel Petersen fekk eisini eitt gott úrslit har - eitt 9. pláss í býti við sjey aðrar. Í november fekk Jóannes eisini eitt framúr gott úrslit Í JVD Open í Eindhoven í Hollandi, sum er ein viðurkend og væl umtókt altjóða kapping. Her bleiv Jóannes nummar 46 av 398 compound-skjúttum í heimselituni. Úrvalsskjúttarnir, sum vóru við á Oyggjaleikum, kláraðu seg allir væl, og hópurin vann tilsamans níggju gull- og fýra silvurheiðursmerki.

**Sjálvboðin:**
Feløgini leggja seg eftir at fáa foreldur og systkin hjá skjúttum og onnur at bjóða seg fram sum sjálvboðin. Hetta verður gjørt, tí brúk verður fyri nógvari og skipaðari sjálvbodnari hjálp til Betri Oyggjaleikir í Føroyum í 2027.

**Ítróttagleði:**
Aktiva luttøkan í Skúlaleikum, venjingararbeiðið í feløgunum og BSKF-átakið at skipa fyri fleiri venjingarlegum fyri ungar skjúttar skal vera við til at stimbra undir ítróttargleðina.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**
Innandura vetrarkapping fyri vaksin, ung og børn í vetrarhálvuni - seinna hálva í kappingini 2024/2025 og fyrra hálva í kappingini 2025/2026. Vetrarkappingin byrjar um mánaðarskiftið oktober-november og endar um mánaðarskiftið februar-mars. Kappast verður í bogaflokkunum compound, berboga og recurve. Feløgini skiftast um at avgreiða kappingarnar. Endað verður við FM-kapping. Innleiðandi úrslitini hjá teimum vaksnu gjøgnum veturin eru grundarlag undir Grand Prix-kapping, har vinnarin eisini verður funnin undir FM-kappingini. FM innandura 2025 var í Havn 1. mars (U12) og í Miðvági 15. og 16. mars (U16, U18 og seniorar).
Ongar regluligar kappingar eru gjøgnum seinna partin av várinum og summarið, men FM uttandura verður skotið á fløtuni í Hoydølum seinasta vikuskifti í august - ella har umleið, alt eftir hvussu tað viðrar. FM uttandura 2025 var 23. august.

**Kappingar uttanlands:**
4. januar: Nytårspokalen, innandurakapping í Taastrup í Danmark. Luttakararnir rinda sjálvir, BSKF samskipar.
2. februar: Frederiksborgpokalen, innandurakapping í Hillerød í Danmark. Luttakararnir rinda sjálvir, BSKF samskipar
18.-23. februar: EM innandura, Samsun, Turkaland - Jóannes Poulsen, Nikkel Petersen og Jógvan Niclasen.
22. - 25. mai: Veronica's Cup, Kamnik, Slovenia. Jóannes Poulsen, Jógvan Niclasen og Samuel T. Petersen, allir compound.
3. - 6. juli: NUM (Norðurlendski Ungdómsmeistaraskapurin), Borås, Svøríki - Lilja Strøm Winther, berbogi, Lea Karina H. Haraldsen, recurve, Brandur T. Hansen, recurve, Narvi E. B. Jensen, compound, og Jónas B. Poulsen, compound.
12. - 18. juli: Oyggjaleikir 2025, Orknoyggjar. 11 skjúttar.
21. - 26. juli: European Grand Prix 2025, Arnhem, Holland. Jóannes Poulsen, compound.
5. - 12. september: HM uttandura, Gwangju, Suðurkorea. Jóannes Poulsen, Nikkel Petersen, Jógvan Niclasen, allir compound, og Hans Petur Højgaard, recurve.
7. - 9. november: JVD Open, Eindhoven, Holland: Jóannes Poulsen, compound.

## Virksemi annars

Síðan tað gjørdist greitt, at Føroyar skulu hýsa Oyggjaleikum 2027, er nógv orka hjá BSKF brúkt til fyrireikingar. Nógv fundarvirksemi og samskifti hevur við Vága Kommunu og leverandørar av útgerð, og orka er eisini løgd í at leggja kappingina North Atlantic 2026 til rættis. North Atlantic-kappingin er ein gomul kapping, sum var dottin niður fyri, men bogaskjúttarnir í Orknoyggjum tóku hana upp aftur í 2024, tá tey har brúktu kappingina sum generalprøva til bogaskjótingina á Oyggjaleikum 2025. BSKF ger teimum kynstrið eftir, og North Atlantic 2026 verður skotin á stadion-økinum í Miðvági við nøkulunda somu uppseting, sum verður á Betri Oyggjaleikum 2027.
Nógv orka er eisini brúkt upp á at gera ætlan/strategi fyri at fáa meira privata fígging til vega. Tað er alneyðugt, bæði tí tað er rímiligt, og tí ÍSF-stuðulin í støðugt størri mun verður treytaður av eginfígging.
Ábyrgdin skal tó ikki púra takast frá íðkarunum, og tí er strammað munandi upp við egingjøldunum í sambandi við luttøku í kappingum uttanlands.
Úttøkutreytirnar umfata krøv um aktivitet og avrik – úttøkukappingar. Skjúttar, sum ikki standa royndina í úttøkukappingunum, kunnu, um pláss er, sleppa við til kappingina við at rinda allan kostnaðin sjálvir – ella tann partin av kostnaðinum, sum ikki er dekkaður av beinleiðis stuðli.

## Framtíðarætlanir

Nýggj 5 árs-ætlan er í gerð.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Bogaskjótifelagið Tambar | 40 |
| Bogaskjótifelagið Ørvur | 50 |
| Bogaskjótifelagið Vágaskot | 55 |
| Team Suðurskot | 40 |



**Nevndarforfólk:**
Fróði Heri Poulsen

**Nevndarlimir:**
Jógvan Niclasen, varaforfólk
Nikkel Petersen, nevndarlimur
Pernille Krogh, varalimur

**Lønt starsfólk:**
Ingolf S. Olsen, skrivari/samskipari 0,36

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Borðtennis

Borðtennissamband Føroya / btsf@btsf.fo / Tel 269511 / www.btsf.fo

**Borðtennissamband Føroya hyggur inn í eitt hendingarríkt ár - serliga vegna oyggjaleikirnar næsta ár. Innleiðandi fyrireikingarnar eru longu farnar í gongd.**

## Strategi

**Breidd:**
Feløgini hava víðkað um venjingartilboðið og hava eisini opið hús, har ið minni roynd í øllum aldri kunnu vera við.

**Úrval:**
A- og ungdómslandslið hava havt regluligar venjingarlegur - eisini saman, og hava verið til kappingar uttanlands, ið er ein góð gularót.

**Sjálvboðin:**
Sjálvboðin hava verið á mennandi venjaraskeiði í Brøndby í Danmark, har samanhaldið millum venjararnar í feløgunum varð styrkt.

**Ítróttagleði:**
Hóast kappingarsinnað er GP-skipanin í borðtennis skipað soleiðis, at ein altíð møtir leikarum á egnum stigi, og at eingin fær keðiligar upplivingar.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**
Grand Prix 4 - Tórshavn í januar 2025
Grand Prix 5 - Trongisvágur í januar 2025
Grand Prix 6 - Tórshavn í januar 2025
FM ung - Trongisvágur í mars 2025
FM vaksin - Tórshavn í apríl 2025

**Kappingar uttanlands:**
BH Open - Hafnafjørdur, Ísland í januar 2025
Spar Nord Roskilde Cup - Roskilde, Danmark í februar 2025
Kids Masters - Hald Ege, Danmark í apríl 2025
Aarhus Open - Aarhus, Danmark í oktober 2025

## Virksemi annars

Í mars mánaði var íslendska ungdómslandsliðið á vitjan í Tórshavn og hevði venjingarlegu saman við føroyska ungdómslandsliðnum. Her varð vant saman tríggjar ferðir, áðrenn vikuskiftið endaði við einari innanhýsis vinarkapping. Ellivu íslendskir og ellivu føroyskir leikarar luttóku í hesum felags átaki, ið varð stuðlað av NATA. Í oktober mánaði vóru seks føroyskir venjarar á venjaraskeiði í Brøndby í Danmark, sum Bordtennis Danmark skipaði fyri. Hetta var eitt sera væleydnað átak, sum bjálvaði ungu føroysku venjararnar væl til at taka ímóti tí vaksandi talinum av ungdómsleikarum.

## Framtíðarætlanir

Borðtennissamband Føroya hyggur inn í eitt hendingarríkt ár - serliga vegna oyggjaleikirnar næsta ár. Innleiðandi fyrireikingarnar eru longu farnar í gongd. Fyrst fyri er ein aðalroyndarkapping við útlendskum leikarum í heyst, har ið Borðtennissamband Føroya fer at royna seg sum fyriskipari av einari størri kapping við oyggjaleikunum í huga. Ein áhugabólkur er stovnaður, har ið sjálvboðin til oyggjaleikirnar í borðtennis kunnu melda seg til - og tíbetur hava fleiri longu bjóðað seg fram.

## Sosialir miðlar

Facebook: Borðtennissamband Føroya
Instagram: table.tennis.faroe.islands
Youtube: Borðtennissamband Føroya



**Nevndarforfólk:**
Fróði Fríðason Jensen

**Nevndarlimir:**
Elinborg C. Mortensen, næstforfólk
Teitur Haraldsen Albinus, kassameistari
Pætur Haraldsen Albinus, skrivari
Hallur Thorsteinsson, nevndarlimur

**Kappingarnevnd:**
Peter Hentze Niclasen, forfólk
Vagnur Kjærbech Nolsøe, nevndarlimur
Kai Roest, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Pætur Albinus, fyrisiting, 0,1

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Borðtennisfelagið Tór | 40 |
| Tvøroyrar Borðtennisfelag | 40 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Flogbóltur

Flogbóltsamband Føroya / fbf@fbf.fo / Tel 218766 / www.fbf.fo

**Við stuðli frá FIVB hevur FBF sett fulltíðarvenjara til alla kvinnusíðuna og yngstu dreingirnar.**

## Strategi

**Breidd:**
Flogbóltsskúlin, Skúlaleikir og kidsvolley
**Úrval:**
Sandflogbóltur
**Sjálvboðin:**
Liðleiðarabólkur
**Ítróttagleði:**
Flogbóltsskúlin, Skúlaleikir og barnakappingar

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Lands- og steypakappingar fyri vaksin og allar yngri deildir frá september í 2025 til apríl í 2026
NEVZA U19 fyri kvinnur og menn í oktober í 2025 í høllini á Hálsi í Tórshavn

**Uttanlands:**
CEV Silver League fyri A landsliðini, kvinnur og menn, mai-juni 2025 - Letland, Luxemburg, Ísland og Georgia
NEVZA sandflogbólt U18 M & K, juli 2025 - Andorra og Dublin
CEV Eurovolley sandflogbólt, U20 M & K, august 2025 - Madrid

## Virksemi

Umframt kappingar í øllum deildum frá september í 2025 til apríl í 2026 - landsliðskappingar í Føroyum og uttanlands fyri bæði innanduraflogbólti og sandflogbólti, hevur FBF hildið flogbóltsskúla fyri leikarar í aldrinum U12 - U18 í 2025. Umframt hetta hevur FBF sent venjarar til CEV venjararaskeið í kids-volley, sum er stuðlað av CEV. FBF hevur eisini sett høvuðs-venjara til A-landsliðið hjá kvinnum, øllum U-kvinnum og til alla gentusíðuna. Hetta er stuðlað av FIVB. Venjarin skal eisini hava ábyrgdina av leikaramenning - bæði á landsliðunum og úti í feløgunum - umframt at røkja leikaratilgongd.

## Framtíðarætlanir

Við stuðli frá FIVB hevur FBF sett fulltíðarvenjara til alla kvinnu-síðuna og yngstu dreingirnar.
Við hesum hevur FBF sett gongd á eina munandi menningar-ætlan fyri at hækka stigið á føroyskum flogbólti.
Hetta skal yvir næstu árini síggjast aftur í, at liðini vinna seg víðari í undankappingum. Fyrsta úrslitið av hesum er longu komið. U18 genturnar vunnu seg víðari til 2. undankapping til EM endaspælið

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/fbf.fo

## Feløg og limatøl

TB
B71
Fleyr
KÍF-Flogbóltur
SÍ
Dráttur
Mjølnir
ÍF
Ternan

**Nevndarforfólk:**
Peter Holm

**Nevndarlimir:**
Guðrun L. Joensen, næstforfólk
Jóhan á Mýrini, nevndarlimur

**Aðrar nevndir:**
**Kappingar**
Jana Jacobsen, kappingarstjóri
**Liðleiðaranevnd**
Guðrun L. Joensen
Hanna Helena Weihe Simonsen
Randi Larsen
Lena í Buð
Berit Vilhelmsen

**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Beinir Kristiansen, stjóri | 25% |
| Jana Jacobsen, samskipari | 100% |
| Trina Eysturoy, samskipari | 75% |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Fótbóltur

Fótbóltssamband Føroya / fsf@football.fo / Tel 351979 / www.football.fo / www.fsf.fo

**Føroyskur fótbóltur er í støðugari menning, og ongantíð hevur virksemið verið meira umfatandi. Serliga gleðiligt er at síggja, at luttøkan millum børn og ung er høg - bæði í mun til tal á leikarum og liðum.**

## Kappingar

**Í Føroyum:**
Fótbóltssamband Føroya skipar á hvørjum ári fyri fótbóltskappingum fyri børn, ung og vaksin. Harafturat hevur FSF ellivu landslið, sum eru virkin meginpartin av árinum. Síðani 2021 hevur ítøkiliga málið hjá FSF verið at komandi fimm árini skulu 20 prosent fleiri leggjast afturat teimum íðkandi.

**Uttanlands:**
Fótbóltssamband Føroya hevur ellivu landslið. Á gentu- og kvinnusíðuni eru tey U15-, U16-, U17- og A-landsliðið. Hjá dreingjum og monnum eru tey U15-, U16-, U17-, U19-, U21- og A-landsliðið. Hesi taka á hvørjum ári lut í altjóða kappingum, sum verða fyriskipaðar og spældar bæði í Føroyum og uttanlands.

## Virksemi annars

**Fótbóltsárið 2025**
Føroyskur fótbóltur er í støðugari menning, og ongantíð áður hevur virksemið verið meira umfatandi. Tað er serliga gleðiligt at síggja, at luttøkan millum børn og ung er methøg – bæði í mun til tal av leikarum og liðum

**Landskappingin**
Í fremstu deildini hjá monnum vann KÍ sannførandi gull. HB vann silvur, meðan NSÍ vann bronsu. Aftur í 2025 luttóku átta lið í fremstu deildini hjá kvinnum. KÍ vann meistaraheitið, NSÍ vann silvur og HB vann bronsu.
Í 2025 vóru 509 lið tilmeldað í landskappingunum. Hetta eru væl fleiri enn í 2024. Tilsamans 4146 børn í aldursbólkinum 5 til 17 ár vóru skrásett í 2025 - 1589 gentur og 2557 dreingir.

**Steypakappingin**
Finalan um Løgmanssteypið í 2025 var millum KÍ og Víking. KÍ vann 2-0.
Í steypakappingini hjá kvinnum møttust HB og KÍ. HB vann 1-0.

**Evropeiska luttøkan hjá feløgunum**
Í 2025 luttóku KÍ, HB, Víkingur og NSÍ í UEFA kappingunum fyri feløg hjá monnum.
Í kappingini hjá kvinnum luttók NSÍ sum meistaralið.

**Landsliðsfótbóltur**
A-landsliðini hjá okkum høvdu eitt sera gott kappingarár í 2025. Bæði kvinnurnar og menninir megnaðu at fáa stigamet í farna ári og vóru líka við at spæla seg víðari í HM undankappingin hjá monnum og Nations League kappingini hjá kvinnum.
Í februar tók Eyðun Klakstein við sum venjari hjá A-landsliðnum hjá monnum. Atli Gregersen bleiv settur sum hjálparvenjari.
Í oktober varð Pætur S. Clementsen settur sum A-landsliðsvenjari hjá kvinnum eftir at hava virkað sum fyribilsvenjari síðan seint í 2024. Jacoba Langgaard er hjálparvenjari.
Í 2025 spældi A-landsliðið hjá monnum tíggju landsdystir. Sum úrslitini háttaðu seg, fer hetta árið í søgubøkurnar sum tað besta nakrantíð. Stórur spenningur var í HM undankappingini, tí líka til síðsta dyst vóru Føroyar við í kappingini um at spæla seg víðari til HM endaspælið.
Menninir vunnu helmingin av dystunum í 2025. Í undankappingini til HM í 2026 endaðu Føroyar nummar trý í bólkinum við 12 stigum – beint aftanfyri Kroatia og Kekkia, men væl frammanfyri Montenegro og Gibraltar.
Føroyar vunnu 1-0 í venjingardystinum ímóti Kasakstan.
Kvinnurnar spældu átta landsdystir í 2025. Í UEFA Nations League fingu kvinnurnar tíggju stig og endaðu nummar tvey í bólkinum, og vóru tær tí heilt nær við at spæla seg víðari til play-off dystir. Kvinnurnar luttóku eisini í Baltic Cup í 2025.
U21 landsliðið spældi sjey dystir í 2025 - tríggjar heima og fýra úti. Teir fingu níggju stig í hesum dystum.
Ólavur Mikkelsen varð settur sum venjari hjá U21 landsliðnum í 2025.
Í 2025 leiktu ungdómslandsliðini 43 landsdystir. FSF hevur U15-, U16-, U17- og U19 landslið fyri gentur og dreingir. U15- og U16 liðini spæla venjingardystir/menningarkappingar, meðan U17 og U19 spæla bæði venjingardystir/menningarkappingar og undankappingardystir.

**WU17 2025 – Fyrsta EM endaspæl í Føroyum**
Frá 1. til 17. mai var mest sum øll FSF umsitingin upptikin av at skipa fyri EM endaspælinum fyri U17 landslið við gentum. Talan var um størstu einstøku verkætlanina hjá FSF, ið varð fyrireikað í eitt heilt ár.





**Forseti:**
Christian F. Andreasen

**Nevndarlimir:**
Róin Schrøter, varaforseti
Heri á Rógvi
Maria Jóhannusardóttir Joensen
Anja Rein
Jóannes A. Prestá
Sólrun Hendriksdóttir Sørensen

**Aðrar nevndir:**
www.fsf.fo/fsf/nevndir/

**Feløg:**
07V, AB, B36, B68, B71, EB/Str., FCH, FCS, HB, ÍF, KÍ, MB, NSÍ, Royn, Skála, TB ,Víkingur

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

Fyrsta veruliga tiltakið í sambandi við endaspælið var 26. mars, tá ið lutakast var í Varpinum í Klaksvík, har umboð fyri luttakandi londini sóu umstøðurnar. Umframt Føroyar luttóku Niðurlond, Noregi, Italia, Spania, Frakland, Eysturríki og Pólland. Dystirnir vórðu spældir í Havn og í Klaksvík.

**Grassroots**
Árliga grassrootsvikan var aftur á skránni í 2025. Tiltakið "Bóltur og Spæl", ið nú er blivið eitt afturvendandi tiltak, var eisini á skránni. Endamálið er at geva børnunum eina góða og stuttliga venjing, sum øll kunnu luttaka í. Allir dagsstovnar í Føroyum fingu innbjóðing. Tiltakið varð hildið í Klaksvík, Runavík, Miðvági og í Havn.
450 barnagarðsbørn luttóku saman við umleið 120 starvsfólkum. 130 skúlanæmingar luttóku sum hjálparfólk.
Í samstarvi við Parasport varð eisini skipað fyri fótbóltstiltaki fyri serbreytirnar á miðnámi. Umleið 50 næmingar og lærarar luttóku.

**Skúlaleikir**
Í 2025 legðist fótbóltur afturat Skúlaleikum, ið ÍSF fyriskipar. Ein stórur stevnudagur fyri allar 7. flokkar í Føroyum varð hildin í apríl. Umleið 200 næmingar luttóku á bóltbreytini. Tólv starvsfólk frá FSF stóðu klár at taka ímóti næmingunum.
Fótbóltur verður í skúlaárinum 2025/2026 ein av ítróttargreinunum fyri 6. flokkarnar í Føroyum.

**Disney Playmakers – nýtt tilboð til gentur**
Eftir eitt royndarumfar í 2024, varð Disney Playmakers átakið breitt út til fleiri feløg og gentur í 2025.
Disney Playmakers er rekruteringsátak fyri 5-6 ára gamlar gentur, sum FSF bjóðar út í samstarvi við føroysku feløgini, UEFA og Disney. Eitt umfar fevnir um 8-10 venjingar, har søgugongdin úr einum Disneyfilmi er grundarlag undir venjingum og spølum.
Á vári í 2025 varð átakið boðið út í átta ymiskum støðum kring landið, har søgugongdin úr Disneyfilminum Frozen 2 bleiv víst. Tilsamans 131 gentur luttóku. 73% av teimum høvdu ongar royndir við skipaðum fótbólti frammanundan.
*Ársfrágreiðingin 2025 kann lesast í fullari longd á heimasíðuni hjá FSF.*

## Framtíðarætlanir

Í løtuni verður fyrst og fremst arbeitt eftir tí menningarætlan, sum í 2021 var løgd fyri næstu fimm árini - tað vil siga til 2026. Síðani verður ein nýggj menningarætlan gjørd, ið væntandi eisini fer at fevna um næstu trý til fimm árini.

## Sosialir miðlar

Facebook: www.facebook.com/fsf1979
Instagram: www.instagram.com/fsf1979/
YouTube: www.youtube.com/@FSFVarpid
LinkedIn: www.linkedin.com/company/9332950/admin/dashboard/

# Frælsur ítróttur

Frælsur Ítróttur Føroya / athletics@athletics.fo / Tel 228611 / www.athletics.fo/

**Árið 2025 hevur verið eitt virkið og týdningarmikið ár fyri FÍF, har arbeiðið bæði hevur fevnt um dagligt kappingarvirksemi, landsliðsarbeiði og strategiska menning.**

## Strategi

**Breidd:** Tríggjar stórkappingar og FM eru kappingar fyri úrvals-íðkarar og breidd, og tað eru serliga breiddaríðkararnir, sum fáa gleði av hesum kappingum. Til VU-spelen, ið er stór kapping í Gøteborg í Svøríki, taka vit íðkarar, sum vísa áhuga og hegni til ítróttin, niður í 12 ár, við. Annars eru tað lokalfeløgini, sum fara við allari breiddini til eina kapping á vetri og eina á sumri.

**Úrval:** Stuðul iDMU og iDMsenior. Stuðul til DMU og Dmsenior. Pallas Spelen. VU-spelen. OYL 2025. Stuðla úrvalsvenjingar-legum og einstøkum kappingum. Stuðla servenjing til stafettir. Vit hava havt savning fyri úrvali, har vit varpaðu ljós á ískoyti av ymsum slag, og hvussu hesi ganga hond í hond við ítróttin og antidoping.

**Sjálvboðin:** Í 2025 hava vit brúkt sjálvboðin til allar kapping-arnar. Vit byrja so smátt at lata tey í til OYL 2027. Tó er hetta arbeiðið enn bara í 'kulissunum'.

**Ítróttagleði:** Vit leggja dent á ítróttagleði til allar venjingar í lokalfeløgunum.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

18.01.25: RASKA VK4 (Frælsið)
01.02.25: RAKSA VK5, Sandoy (Bragdið)
22.02.25: RASKA VK6, Norðoyggjar (Treysti)
09.03.25: RASKA VK7, Suðuroy (Hvistan)
22.03.25: RASKA VK8, Runavík (Roysnið)
05.04.25: Skechers Performance Nýggjárshálvmaraton (Roysnið)
25.04.25: Flaggdagsrenning, Tórshavn (Bragdið)
03.05.25: FM Hálvmaraton, Klaksvík (Treysti)
17.05.25: RASKA Stórkapping 1, Tórsbreyt (Hvirlan)
24.05.25: Kvinnurenning, Tórshavn (Bragdið)
31.05.25: Stuttleikir, Tórsbreyt (Hvirlan)
31.05.25: Norðoyastevnurenning, Klaksvík (Treysti)
01.06.25: Tórshavn Maraton, Tórshavn (Bragdið)
22.06.25: RASKA Stórkapping 2, Guttabreyt (Treysti)
06.07.25: TopRun, Kollafjørður (Bragdið)
27.07.25: Ólavsøkurenning, Tórshavn (Bragdið)
03.08.25: BackYard Ultra, Havnardalur (Bragdið)
16.08.25: Ovastevnurenning, Nólsoy (Bragdið)
30.08.25: Faroe Express Stafettin, Tórshavn (Bragdið)
03.09.25: RASKA Stórkapping 3, Tórsbreyt (Bragdið)
06.09.25: Føroya Vakrasta Hálvmaraton, Vágar (Frælsi)
13.09.25: FM ung og FM vaksin á breyt, Tórsbreyt (FíF)
20.09.25: Oyggjarenning, Norðoyggjar (Treysti)
25.10.25: VK1, Sandoy (Bragdið / Tindar)
09.11.25: VK2, Suðuroy (Hvistan)
22.11.25: VK3, Runt Agnið, Runavík (Roysnið)

**Kappingar uttanlands:**

18.01.25: Stórmót, Laugardalshøllin, Reykjavík, IS
25.01.25: Pallas Spelen, Malmø, SE
22.02.25:iDM senior, Odense, DK
01.03.25: iDMU, Skive, DK
26.06.25: DM ugen senior, Herning / Aalborg, DK
26.06.25: VU-spelen, Gøteborg, SE
23.08.25: DMsenior, Hvidovre, DK
06.09.24: DMU, Tårnby, DK

## Virksemi annars

Árið 2025 hevur verið eitt virkið og týdningarmikið ár fyri FÍF, har arbeiðið bæði hevur fevnt um dagligt kappingarvirksemi, landsliðsarbeiði og strategiska menning.
Kappingar hava verið fyriskipaðar kring landið, og dentur hevur verið lagdur á at styrkja bæði breidd og úrval. Landsliðsarbeiðið hevur havt ein týðiligan leiklut við luttøku í altjóða kappingum og miðvísari fyrireiking fram móti Oyggjaleikunum í 2027.
Eitt týðandi stig í 2025 var, at 10 km. rutan í Runavík varð AIMS-góðkend, sum styrkir um føroyskar rennikappingar og lyftir hesa rutuna uppá á altjóða stig. Harumframt hava fýra fólk fingið skeið í rutuuppmáting, so vit sjálvi kunnu arbeiða við DAF-góðkendum rutum í framtíðini.
Nýtt rennifelag, Tindar á Sandoynni, varð stovnað í 2025, og tað hevur longu skipað fyri sína fyrstu kapping í góðum sam-starvi við Bragdið. Hetta vísir ein jaligan vøkstur í frælsum ítrótti kring landið.
Arbeitt hevur eisini verið miðvíst við ætlan um høll til frælsan ítrótt. Fyri at fáa verkætlanina eitt stig víðari, er tilboð fingið frá arkitekti um visualiseringsprojekt, sum kann nýtast í víðari arbeiði at tryggja karmar og fígging.
Fyrisitingarliga hevur sambandið styrkt sítt grundarlag. Praktiskt starvsfólk er sett í parttíðarstarv, og arbeiðið við eini skipaðari úrvalsætlan er farið í gongd. Eisini er samstarvið við MBM sum høvuðsstuðul longt til at fevna um komandi trý árini.
Vit arbeiða víðari við at knýta fleiri stuðlar at virkseminum.
Samanumtikið hevur 2025 verið eitt ár við bæði menning og framtíðarætlanum, har lunnar eru lagdir undir eina sterkari og meira skipaða menning av føroyskum frælsum ítrótti.



**Nevndarforfólk:**
Gunnvá Wardum

**Nevndarlimir:**
Karin Kirke Petersen, skrivari
Jorie Josephsen, kassameistari
Jóhanna Vang, nevndarlimur

**Aðrar nevndir:**
**Dómsnevnd:**
Arnfinn Johannesen
Lovisa Niclasen
Andreas Josephsen

**Kappingarnevnd:**
Starvsnevndin

**Lønt starvsfólk:**
Sølvi Reinert Hansen, samskipari, 0,25

**Feløg og limatøl**

| | |
|---|---|
| Bragdið, Tórshavn | 355 |
| Hvirlan, Tórshavn | 100 |
| Roysnið, Nes | 50 |
| Treysti, Klaksvík | 300 |
| Hvistan, Suðuroy | 40 |
| Frælsi, Vágar | 70 |
| Tindar | 25 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Framtíðarætlanir

FÍF fer komandi árini at arbeiða miðvíst við at styrkja bæði úrval og breidd innan frælsan ítrótt. Dentur verður lagdur á at fullføra og implementera eina skipaða úrvalsætlan, seta av samskipan-arorku til úrvals- og menningararbeiði og at tryggja betri karmar fyri íðkarar og venjarar.
Vit fara at:
- Styrkja samstarvið við feløg og kommunur kring landið
- Menna venjara- og dómarastigið
- Arbeiða víðari við at betra um rennirutur og innandura karmar
- Tryggja burðardygga fígging og langtíðar samstarv við vinnulívið
- Fyrireika føroyskan frælsan ítrótt til Oyggjaleikirnar í 2027

Endamálið er at skapa støðugan vøkstur, hægri ítróttarligt stig og sterkari felagskap kring frælsan ítrótt í Føroyum.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/2002fif
www.instagram.com/athleticsfo/

# Fimleikur

Føroya Fimleikasamband / fimleikur@fimleikur.fo / Tel 919919 / www.fimleikur.fo

**Eitt av okkara fremstu málum er at professionalisera kappingarnar, og her er dómaraverkið ein lyklapartur.**

## Kappingar

**Í Føroyum, 2025:**
25. januar: 1. Steypakapping í estetiskum fimleiki (Havn)
8. februar: 1. Góðkenningardagur og kappingarfyrireiking (Runavík)
22. februar: 2. Steypakapping í estetiskum fimleiki (Klaksvík)
26. februar: Steypakapping í amboð (Runavík)
22. mars: 3. Steypakapping í estetiskum fimleiki (Runavík)
3. mai: Góðkenningardagur og kappingarfyrireiking (Tórshavn)
17.-18. mai: FM í estetiskum fimleiki (við Tjarnir)
24. mai: FM í amboðsfimleiki (Tórshavn)
8.-9. november: Fimleikafagnaðurin 2025 (Tórshavn)
23. november: Liðkapping í amboð (Tórshavn)
**Uttanlands, 2025:**
12.-18. juli: Oyggjaleikir 2025 (Orknoyggjarnar)
24.-25. oktober: North European Championships 2025 (Leicester)

## Virksemi annars

**Amboðsfimleikur:**
**Frágreiðing um virksemi innan amboðsfimleik (kappingarárið 2025/2026)**
Árið hevur verið merkt av stórum virksemi, fakligari menning og góðum úrslitum. Arbeitt hevur verið miðvíst við at hækka stigið á kappingum, dómarum og venjingum, og vit síggja týðulig tekin um, at føroyskur fimleikur flytur seg rætta vegin – bæði heima og uttanlands.

**Miðvís dygdarmenning og kappingarvirksemi:**
Kappingarárið 2025/2026 hevur verið væl fyriskipað við denti á tekniska dygd. Fyri at tryggja, at fimleikararnir eru klárir til kappingarnar, hava vit hildið fast við skipanina við góðkenningardøgum.
- 15. november 2025: Góðkenningardagur í Fimi.
- 22. november 2025: Liðkapping í Fimi.
- 7. februar 2026: Góðkenningardagur í Bylgjuni.
- 21.–22. februar 2026: Steypakapping 1 og 2 í Fimi.

**Altjóða samstarv og dómaramenning:**
Eitt av okkara fremstu málum er at professionalisera kappingarnar, og her er dómaraverkið ein lyklapartur.
- Í november í 2025 vórðu skipað tvey dómaraskeið – eitt fyri kvinnur í Fimi og eitt fyri menn í Bylgjuni.
- Í sambandi við steypakappingarnar í februar í 2026 luttóku tveir altjóða dómarar úr Danmark sum dømdu kvinnusíðuna.

**Føroysk avrik á altjóða palli – NEC Leicester**
Hæddarpunktið í hesum tíðarskeiðinum var luttøkan í Northern European Championship (NEC) í Leicester í oktober í 2025. Luttøkan staðfesti, at føroyskur amboðsfimleikur er vorðin ein náttúrligur partur av norðurevropeiska kappingarumhvørvinum.
- Sterk umboðan: Føroyar luttóku við seks fimleikarum, sum umboðaðu landið við prýði og vístu bæði dygd og breidd í føroyskum amboðsfimleiki.
- Flott úrslit: Tað eydnaðist Føroyum at røkka einum góðum 6. plássi í beinsveiggi.
Samlaða luttøkan í NEC var ein greið ábending um, at føroyskur amboðsfimleikur er í støðugari menning og hevur styrki til at gera vart við seg á altjóða palli.

**Samandráttur**
Virksemið í amboðsfimleikinum ber brá av einari deild í vøkstri. Vit sameina breiddararbeiði og dómaraútbúgving við miðvísari úrvalsmenning, ið gevur úrslit á altjóða pallinum.

**Estetiskur fimleikur**
Í estetiskum fimleiki hava vit arbeitt við at fáa stuðul játtaðan frá ÍSF til, at eitt kvinnulandslið kann umboða Føroyar til World Championships 2026 í Japan.
Avtalað var millum FFS og ÍSF á samstarvsfundi í 2026, at vinnandi kvinnuliðið í estetiskum fimleiki verður virkandi kvinnulandslið. Hesin stuðulin er treytaður av, at øll fimleikafeløg taka undir við honum.
Fleiri føroysk lið luttaka í Easter Cup í Danmark, og nøkur lið hava teknað seg til World Cup-kapping í Fraklandi um mánaðarskiftið apríl/mai.
Avtalan seinastu árini hevur verið, at vinnandi liðini hjá kvinnum og unglingum fáa stuðul frá FFS at luttaka í einari uttanlandakapping, sum er partur av IFAGG-skipanini. Hetta ynskja vit at broyta til, at vinnandi kvinnuliðið verður virkandi landslið.
Steypakapping 1 og 2 hava verið, og hava báðar hilnast væl.
Ein trivnaðarkanning er gjørd í samstarvi við umboð fyri amboðspartin við tí endamáli at fáa betri innlit í trivnaðin hjá kappingaríðkarum. Kanningin er fyri aldurin tólv ár og eldri.





Mynd: Andri Gerðisá

Kanningin skal gerast saman við foreldrum.
Á árliga norðurlandafundinum varð umrøtt við finska fimleikasambandið at fáa tættari samstarv í mun til mannagongdir, tekniska venjing o.a. fyri estetiskar fimleikarar.
Reglugerðin fyri yngru liðini í estetiskum fimleiki, t.e. pinkur, smágentur og gentur, er broytt nakað, og hava Beinta Danielsen og Elna Johannesen havt skeið fyri okkara venjarum um hetta. Arbeitt verður áhaldandi við at fáa fleiri dómarar til estetiskan fimleik.
Vit ynskja at skipa arbeiðið betri í nevndini, so meira orka er til at søkja sponsorar og at seta í verk átøk til frama fyri børn og ung - umframt at vita, um estetiskur fimleikur fær fótafesti í teimum nýggjaru feløgunum.

**Breiddarfimleikur**
Tað hava verið hildin ymisk skeið fyri ávísar lærarar, sum hava eftirspurt vegleiðing í, hvussu tey ymisku amboðini í einari skúlafimleikahøll skulu nýtast á bestan hátt.
Fleiri feløg hava eisini skipað fyri innanhýsis skeiðum og hava bjóðað grannafeløgum við. Føroya Fimleikasamband hevur somuleiðis bygt upp fakliga førleikan og arbeiðir í løtuni við at menna eina skrá fyri venjaraskeið, sum líkist tí, ið ein kennir frá t.d. DGI og GymDanmark.

**Fimleikagalla / Fimleikafagnaðurin**
Í november 2025 varð fimleikafagnaðurin hildin við stórari luttøku og góðum úrsliti. Hetta var ein kapping innan breiddarfimleik, har ið umleið 400 íðkarar luttóku frá.
Støkk, Ljósið, Havnar Fimleikafelag (HF) og Flog.
Til fagnaðin verður serligur dentur lagdur á, at rørsla, ljós, ljóð, búnar og evni passa væl saman, soleiðis, at framførslurnar gerast heildarskapandi og hugtakandi fyri áskoðararnar.
At enda var tað Fimleikafelagið Støkk, sum vann kappingina.

## Feløg og limir:

| | |
|---|---|
| Havnar Fimleikafelag | 1282 |
| Fimleikafelagið Støkk | 957 |
| Fimleikafelagið Flog | 210 |
| Fimleikafelagið Ljósið | 330 |
| Klaksvíkar Fimleikafelag | 390 |
| Tvøroyrar Fimleikafelag | 150 |
| Vága Fimleikafelag | 108 |
| | 3427 |

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/www.fimleikur.fo
www.instagram.com/fimleikasambandid
www.fimleikur.fo

**Nevndarforfólk:**
Pól Esper H. Hansen

**Nevndarlimir:**
Heri Lamhauge, næstforfólk/breiddin
Jákup Svøðstein, amboðsfimleikur
Jóna Kristin Thomsen, estetiskur fimleikur
Tinna Johannesen, fimleikagalla og fagnaðurin

**Lønt starvsfólk:**
Heri Jøkladal, kassameistari
Heidi Davidsen, oyggjaleikafyriskipari

# Hondbóltur

Hondbóltssamband Føroya / hsf@hsf.fo / Tel 231982 / www.hsf.fo

**Hondsbóltslandsliðini savnaðu tjóðina til EM-endaspølini hjá monnum og kvinnum, fjepparagleðin var ovurhondsstór.**

## Strategi

**Breidd:** HSF arbeiðir áhaldandi við at tryggja so stóra breidd sum gjørligt. Kappingar verða skipaðar í fleiri bólkum í hvørjum árgangi fyri at tryggja, at so nógv sum gjørligt spæla á einum hóskandi og mennandi stigi. T.d. eru bæði A- og B-steypakappingar, sum báðar enda við einum finaludegi í Høllini á Hálsi. HSF er av tí áskoðan, at breidd og úrval ikki útiloka hvørt annað, tey hanga saman.

**Úrval:** HSF er av tí áskoðan, at breidd og úrval ikki útiloka hvørt annað, tey hangan saman. Tískil fevnir leikaramenningin hjá HSF breitt, og roynt verður at fáa so nógv sum gjørligt gjøgnum skipanina. Fyri at styrkja um úrvalsumhvørvið, hevur HSF m.a. havt málverjavenjaraskeið, skeið í skaðafyribyrging og havt serskeið fyri lámar og vengur. Umhvørvið við hondbóltsgreining er styrkt við, at felagsavtala er gjørd við greiningarfyritøkuna Sideline XPS, sum ger, at allir dystir í bestu føroysku deildunum verða kliptir, kunnu greinast og nýtast til hagtøl.

**Sjálvboðin**: HSF upplivir, at flestu feløgini eru vælskipað við sjálvbodnum hjálparfólkum, og HSF roynir at hjúkla um hesi fólk við t.d. atgongumerkjum til landsdystir. HSF hevur havt skeið fyri feløgunum, sum snúgva seg um, hvussu tey kunnu fáa fleiri sjálvboðin.

**Ítróttagleði:** Hondsbóltslandsliðini savnaðu tjóðina til EM-endaspølini hjá monnum og kvinnum, fjepparagleðin var ovurhondsstór. HSF ger nógv fyri, at landsliðini eru í eygnahædd við ung og gomul. Landsliðini hava vitjað nógvar skúlar og hitt tey ungu.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

A-Menn: EM-Undankapping vs. Niðurlondum - 13. mars (Við Tjarnir), A-Menn: EM-Undankapping vs. Ukraina (Við Tjarnir)

A-Kvinnur: A-Kvinnur: HM-Undankapping vs. Litava - 9. apríl (Við Tjarnir), EM-undankapping vs. Montenegro 18. oktober (Við Tjarnir), vinardystur vs. Íslandi 22. nov. (Við Tjarnir)

U08-Menn: Nordic Open, Føroyar, Sveis, Týskland og Ísland - 6. - 8. juni (í Runavík + Tórshavn)

U06-Kvinnur: Vinardystir vs. Íslandi 14. - 15. juni (Vestmanna/Við Streymin)

U08-Kvinnur: Vinardystir vs. Íslandi 14. - 15. juni (Vestmanna/Við Streymin)

**Kappingar uttanlands:**

A-Menn: EM-Undankapping vs. Niðurlondum - 16. mars (Almere, Niðurlond) , A-Menn: EM-Undankapping vs. Kosovo - 8. mai (Pristina, Kosovo), Golden League vs. Niðurlondum, Noreg og Danmark 31. oktober - 2. november (Tróndheim, Noreg)

A-Kvinnur: HM-undankapping vs. Litava 13. apríl (Kaunas, Litava), EM-undankapping vs. Íslandi 15. oktober (Ásvellir/Ísland), HM-endaspæl 26. nov - 6. des. (Trier/Dortmund/Týskland)

U2010-Kvinnur: Vinardystir vs. Íslandi 31. juni - 1. mai (Savamýra, Ísland)

U04-Menn: HM-endaspæl 18. juni - 29. juni í Póllandi

U06-Menn: European Open 30. juni + 4. juli (Svøríki), HM-endaspæl 6. - 17. august (Kairo, Egyptaland)

U06-Kvinnur: EM-endaspæl 9. - 20. juli (Podgorica/Montenegro)

U08-Kvinnur: EM-endaspæl 30. juli - 9. august (Podgorica/Montenegro)

## Virksemi annars

Tað var stórhending fyri føroyskan hondbólt, at í februar 2025 stendur glæsiliga stórhøllin við Tjarnir liðug. HSF flutti inn og hevur sína skrivstovu har. Við hesum kann HSF hýsa dystum og kappingum á hægsta stigi. Hondbóltsárið 2025 var eisini enn eitt gott ár í føroyskari hondbóltssøgu, tá ið hugsað verður um altjóða úrslit. Fyri fyrstu ferð luttóku Føroyar í einum HM-endaspæli, tá ið kvinnulandsliðið spældi HM-endaspæl í Trier og í Dortmund. Har megnaðu tær at vinna tveir dystir, spæla ein javnan, og blivu tær við hesum nr. 17 av 32 liðum.

Tað var eisini ein stórhending, at U21-landsliðið hjá monnum vann bronsu í HM-endaspælinum, nr. 3 av 32 liðum. Óli Mittún bleiv toppskjútt, og hann var eisini kosin besti leikari í kappingini.

U19-landsliðið hjá monnum luttók eisini í HM-endaspælinum í Egyptalandi. Teir blivu nr. 19.

Føroyar luttóku eisin í EM-endaspølunum hjá U19- og U17-kvinnum og blivu ávikavist nr. 23 og 24.

Í vetur luttóku føroysk feløg aftur í European Cup. Kvinnu- og mansliðini hjá H71 og mansliðið hjá StÍF luttóku, men tey vunnu seg ikki víðari úr fyrsta umfari.

HSF hevur uppbygt gott samstarv við íslendska hondbóltssambandið, og aftur í 2025 hava fleiri ungdómsvenjingardystir verið landanna millum. Av øðrum virksemi kunnu m.a. nevnast ymisk skeið, sum HSF skipar fyri. Her kunnu nevnast skeið fyri fysioterapeutar, dómaraskeið, venjararskeið, málverjavenjaraskeið og skeið fyri dómaraborð. At luttaka á hægsta stigi er fíggjarliga krevjandi, men HSF fegnast um gott samstarv við stuðlar, nú enn størri avbjóðingar standa fyri framman í 2026.



**Nevndarforfólk:**
Gunn Ellefsen

**Nevndarlimir:**
Jógvan Emil Nielsen, næstforfólk
Durita Thomsen, Heini Ellingsgaard, Kristian Østergaard **Varalimir:** Høgni Vilhelmsen og Birgir Kass

**Dómsnevnd:**
Súsanna Leo, forfólk
Kristian Johansen, Margrið Weihe

**Dómaranevnd:**
Uni Wardum, forfólk
Heini Ellingsgaard, Birita Wardum, Thomas Juul Thomsen, Margrið Weihe

**Kappingarnevnd:**
Høgni Vilhelmsen, forfólk
Jákup Dam, Eyðun Mortensen
**Varalimur:** Ása á Neystabø

**Stuðlanevnd:**
Durita Thomsen, forfólk
Gunn Ellfesen, Heini Ellingsgaard

**Aganevnd:**
Jens Andrias Winther, forfólk
Niels Winther, Hartvig Joensen

**Menningar- og Úrvalsnevndin:**
Ann-Mari Wang forfólk
Hans Jón Thomsen, Helgi Hildarson Hoydal, Birita Mortansdóttir, Hans Andreas Dahl, Kristian Østergaard

**Lønt starvsfólk:**
Andrass Thomsen, stjóri 1
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri 1
Ári Rouch, samskipari 1
Hallur Danielsen, samskipari 1
Nicholas Satchwell, samskipari 0,5
Jens á Skipagøtu, samskipari 1
Pól Hendrikkur Davidsen, styrkivenjing 1

**Feløg og limir:**

| | |
|---|---|
| EB, Eiði | 307 |
| H71, Hoyvík | 523 |
| ÍA, Argir | 237 |
| KÍF, Kollafjørður | 118 |
| Kyndil, Tórshavn | 335 |
| Neistin, Tórshavn | 543 |
| SÍF/Søljan, Sandavágur | 230 |
| StÍF, Strendur | 352 |
| Stjørnan, Klaksvík | 135 |
| Team Klaksvík, Klaksvík | 190 |
| Tjaldur, Runavík | 217 |
| VB, Vágur | 132 |
| VÍF, Vestmanna | 242 |
| Vípan, Sandur | N/A |
| Eydnudeild | 60 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Framtíðarætlanir

HSF arbeiðir áhaldandi við at menna føroyskan hondbólt á fleiri mótum. Eitt av aðalmálunum er, at Føroyar eisini javnan skulu luttaka í EM- og HM-endaspølum fyri menn og kvinnur. Fyri at røkka hesum málinum leggur HSF nógv fyri at menna dygdargóðar leikarar saman við feløgunum, sum kunnu standa seg í altjóða dystum. HSF arbeiðir áhaldandi við at tryggja virksemið fíggjarliga saman við myndugleikum, stuðlum og okkara egna virksemi. HSF ynskir at menna samleikan hjá hondbóltinum í Føroyum. HSF ynskir eisini at menna dygdargóðar nútímans loysnir, sum kunnu virka fyri at breiða hondbóltin út og styrkja um umsitingina hjá feløgunum og sambandinum sjálvum. Hartil ynskir HSF at virka fyri at tryggja nøktandi nútímans karmar til at altjóða hondbóltur kann leikast í Føroyum undir karmum, sum liva upp til krøvini hjá altjóða sambondunum, IHF og EHF.

## Framtíðarætlanir

www.facebook.com/hondboltssambandid/
www.instagram.com/handball_faroe_islands/
www.tiktok.com/@handballfaroeislands

# Judo

Judo Føroyar / judo@judo.fo / Tel 551732 / www.judo.fo

**Nú oyggjaleikirnir vera í Føroyum í 2027, hava vit sjálvsagt sett judo á skránna. Málið hjá okkum er at hava luttakarar í øllum vektbólkum á leikunum - bæði hjá kvinnum og monnum.**

## Strategi

**Breidd:** Í 2025 hevði Judo Føroyar fleiri felagsvenjingar við útlendskum gestavenjarum á altjóða stigi, har venjingarnar vóru fyri øll áhugað. Hesar hava fingið sera góð ummæli. Feløgini skipaðu eisini fyri hugnakvøldum í samband við felagsvenjingar, har øll vóru boðin við.

**Úrval:** Serligur dentur varð lagdur á at styrkja unglingalandsliðini og at menna íðkarar gjøgnum altjóða royndir og venjingarlegur. Føroyskur venjari hevur tikið venjaraprógv frá altjóða judosambandinum.

**Sjálvboðin:** Skipað varð fyri tveimum venjaraskeiðum við altjóða undirvísarum umframt førleikamenning til venjarar, hvørja ferð altjóða serfrøðingar komu til Føroya at undirvísa. Øll áhugað fingu undirvísing frá Anti Doping Føroyar.

**Ítróttagleði:** Nógv orka er løgd í at bjóða rørslugleði gjøgnum judo til øðrvísi málbólkar. Hetta var serliga eyðsýnt við verkætlanini saman við Parasport Føroyar og Landsfelag Pensjónista, har umleið 100 pensjonistar, paraíðkarar og næmingar á sernámi stuttleikaðu sær við judo. Judo luttók eisini á Skúlaítróttadegnum fyri næmingar í 7. flokki kring landið.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

Kapping á Oyrarbakka fyri børn (Sunda Judofelag, 18. januar)
Kapping í Vági fyri børn (Suðuroyar Judo, 15. februar)
FM fyri børn á Giljanesi (Vága Judofelag, 15. mars)
Kontrast FM (FM fyri unglingar og vaksin, Høllin á Hálsi, 26. apríl)
Kapping á Giljanesi fyri børn (Vága Judofelag, 18. oktober)
Kapping í Vági fyri børn (Suðuroyar Judo, 15. november)

**Kappingar uttanlands:**

Reykjavík International Games (fýra unglingar, Reykjavík, Ísland, 25. januar)
British Veterans Open (tveir veteranar, London, Stóra Bretland, 29. mars)
Norðurlendska meistaraheitið fyri unglingar, vaksin og veteranar + venjingarlega (Brøndby, Danmark, tríggir unglingar, ein vaksin, tríggir veteranar, 10.-13. mai)
EM fyri veteranar (Riga, Lettland, tveir veteranar, 23. mai)
Gdansk Get Together Tournament (Gdansk, Póland, ein paraíðkari, 13.-14. september)
Cadets European Cup Riga (Riga, Lettland, tveir mansunglingar, 18.-19. oktober)
HM fyri veteranar (París, Frakland, ein veteranur, 5. november)

## Virksemi annars

Í 2025 royndu yvir túsund fólk judo fyri fyrstu ferð. Judo Føroyar vóru við til upplatingartiltakið við Tjarnir í februar, har fleiri hundrað vitjandi komu á mottuna at kasta hvønn annan. Í apríl vístu 7. floksnæmingar úr øllum landinum síni kynstur í judo, tá ið fyrsta árið í Skúlaítrótti fór av bakkastokki. Og í oktober skipaði Judo Føroyar fyri verkætlan saman við Parasport Føroyar og Landsfelag Pensjónista, sum fekk stuðul frá breiddarpuljuni hjá ÍSF. Tá fingu yvir hundrað pensjónistar, paraíðkarar og næmingar á Sernámi høvi at royna judo. Eftir verkætlanina eru summi byrjað at ganga til judo hvørja viku.
Nógv orka varð løgd í breiddararbeiðið í 2025. Tvey lokalfeløg fingu stuðul frá breiddarpuljuni hjá ÍSF. Suðuroyar Judo skipaði fyri felagslegu í Vági, sum við stuðlinum gjørdist ókeypis fyri allar luttakarar.
Tilsamans luttóku 89 føroyskir judoíðkarar, sum er hægsta luttakaratalið nakrantíð til eitt tiltak í Føroyum. Klaksvíkar Judofelag fekk stuðul at skipa fyri byrjanarskeiði fyri vaksnar nýbyrjarar, har ellivu íðkarar teknaðu seg. Fleiri av teimum vaksnu íðka nú regluliga.
Unglingar, seniorar og veteranar kappaðust í t.d. NM, Europa Cup, EM og HM og kvinnuunglingarnir vóru á altjóða venjingarlegu í Montenegro. Børnini fóru eisini uttanlands, har feløgini skipaðu fyri túri til kapping í Danmark, og sersambandið skipaði fyri túri til venjingarlegu í Sveis. Fyrsti føroyski paraíðkarin luttók í altjóða kapping, ið endaði við einum flottum triðja plássi í Póllandi og harvið fyrsta altjóða bronsuheiðursmerkinum í tillagaðum judo. Umframt at døma FM og NM dømdi føroyskur dómari við altjóða prógvi eisini í Bosnia-Hersegovina.
Sersambandið styrkti um fyrisitingarligu orkuna við at seta aðalskrivara í starv við 25% setanarbroti.

## Framtíðarætlanir

Nógv hendir innan føroyskt judo í 2026. Íðkarar, venjarar og sjálvboðin fyrireika at hýsa Oyggjaleikirnar í 2027, sum verður største kapping, ið judo í Føroyum hevur hildið. Í tí sambandi arbeiðir sersambandið við ætlan um at hýsa eini altjóða kapping og venjingarlegu í Føroyum í 2026 fyri at førleikamenna øll tey, ið fara at hava lyklaleiklutir til Oyggjaleikirnar.
Samstarv er fingið í lag við føroyskan landsliðsvenjara, ið hevur tikið altjóða venjaraprógv. Bruttovenjingar verða gjøgnum árið, har øll, við áhuga at kappast, eru boðin við. Fleiri venjingarvikuskifti við altjóða venjarum eru løgd á skrá. Børn frá øllum feløgunum í landinum fara í 2026 á summarlegu í Svøríki at venja saman við børnum í einum svenskum felagi. Tveir starvsnevndarlimir, ið eru venjarar og altjóða dómari, taka í 2026 altjóða venjaraprógv frá altjóða judosambandinum.



**Nevndarforfólk:**
Petur Sigurð Johannesen

**Nevndarlimir:**
Kristianna Solberg á Túgvu, næstforfólk
Sofus Debes Johannesen, kassameistari
Sanna Nolsøe Djurhuus, skrivari
Andrias Sumberg, nevndarlimur
Myrna Edmundsdóttir Fjallsbak, tiltakslimur
Magnus Pauli Glerfoss, tiltakslimur

**Lønt starvsfólk:**
Sanna Nolsøe Djurhuus, aðalskrivari 0.25

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Annað

Eftir 41 ár í starvsnevndararbeiði fyri Judo Føroyar - harav 37 ár sum formaður - gav Sofus Debes Johannesen í 2025 stafettina víðari til næsta ættarlið. Sofus hevur ótroyttiliga tænt judo í Føroyum, og uttan hansara arbeiðið hevði ítróttin als ikki verið á tí stigi, sum hon í dag kann njóta. Sofus verður tó starvsnevndarlimur eina løtu afturat.
Arbeiðið hjá Judo Føroyum fær stóran ans uttanlands, og serliga evropeiska judosambandið hevur fleiri ferðir skrivað greinar um virksemið í Føroyum og avrikini hjá føroyskum íðkarum uttanlands. Limatalið er støðugt vaksandi tvørtur um øll feløg.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Suðuroyar Judo | 33 |
| Klaksvíkar Judofelag | 51 |
| Havnar Judofelag | 70 |
| Sunda Judofelag | 30 |
| Skálafjarðar Judofelag | 17 |
| Vága Judofelag | 34 |

## Sosialir miðlar

www.instagram.com/judofaroeislands

# Kurvabóltur

Kurvabóltssamband Føroya / kurvabolt@kurvabolt.fo / Tel 590696 / www.kurvabolt.fo

**2025 hevur verið eitt gevandi og mennandi ár fyri KSF. Tann heimliga kappingin hjá bæði kvinnum og monnum gekk sera væl og bleiv skipað á góðum og mennandi stigi.**

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

FM kapping hjá kvinnum, monnum og U17. Ymiskar dagskappingar fyri yngri børn.

**Kappingar uttanlands:**

Juli í 2025 - Ynos Mon skipaði fyri oyggjakapping, tí kurvabóltur var ikki við í oyggjaleikunum, ið vóru í Orknoyggjunum.
Kvinnu- og manslandslið luttóku.

## Virksemi

2025 hevur verið eitt gevandi og mennandi ár fyri KSF. Tann heimliga kappingin hjá bæði kvinnum og monnum gekk sera væl og bleiv skipað á góðum og mennandi stigi. Feløgini hava víst stóra ábyrgd, og kappingarnar hava verið merktar av góðum hugburði og javnari styrki. Skipað varð eisini fyri einari U17-kapping, sum hevur havt stóran týdning fyri menningina av ungum spælarum og fyri at tryggja eina natúrliga og framhaldandi gongd frá barna- og ungdómsarbeiði til vaksnamannadeildirnar.
Serliga gleðiligt er tað, at virksemið fyri børn er vaksið nógv seinastu árini, og 2025 var einki undantak. Barnakappingar verða skipaðar sum dagskappingar, har ið feløgini skiftast um at vera vertir. Hesin leistur hevur víst seg at rigga sera væl, tí hann styrkir samstarvið millum feløgini og skapar eitt jaligt og livandi umhvørvi rundan um yngstu spælararnar. Undirtøkan hevur verið góð frá bæði børnum, foreldrum og feløgum, og tað sæst týðiliga, at áhugin fyri kurvabólti er vaksandi kring landið.
Landsliðini hjá bæði kvinnum og monnum hava eisini verið virkin í 2025. Kurvabóltur var ikki við sum ítróttagrein á oyggjaleikunum í Orknoyggjum, og tí varð skipað fyri alternativari oyggjakapping. Hetta var sera týdningarmikið stig fyri at tryggja, at landsliðini framhaldandi fingu neyðuga altjóða kapping og kundu halda fram við menningini. Slíkar kappingar eru avgerandi fyri bæði samanhald, royndir og ítróttaliga framgongd.
Manslandsliðið stóð seg sera væl og vann fýra av fimm dystum, sum rakk til eitt flott annað pláss í kappingini. Hetta er úrslit, sum vísir, at arbeiðið seinastu árini ber ávøkst. Kvinnulandsliðið vann ein av fýra dystum. Hóast úrslitini ikki vóru eins sterk sum hjá monnunum, so vóru framstig at síggja í spælinum, og liðið vísir jaliga gongd við góðum hugburði og vilja at menna seg víðari.
Við atliti at komandi oyggjaleikum í Føroyum í 2027 er arbeiðið longu farið í gongd. Fyrireikingarnar krevja bæði fyrisitingarliga og ítróttaliga orku, og nógv arbeiði liggur fyri framman. KSF fer at leggja stóran dent á at fyrireika bæði landslið, kappingarskipan og karmar, so Føroyar kunnu hýsa einari væl skipaðari og ítróttaliga sterkari kurvabóltskapping.
Í hesum sambandi verður skeiðvirksemi eisini økt munandi. Serligur dentur verður lagdur á útbúgving og menning av dómarum og teimum, sum manna dómaraborðini. Hesi skeið verða skipað á hægri fakligum stigi enn vanligt og verða fyriskipað í tøttum samstarvi við Dansk Basketbold Forbund. Endamálið er at lyfta førleikastigi, tryggja altjóða góðkendar mannagongdir og at fyrireika okkara fólk til tey krøv, sum fylgja við at hýsa eini altjóða kapping sum oyggjaleikunum.
Við at styrkja dómarastigi og skipanina rundan um dystirnar verður grundarlag lagt fyri einari tryggari, rættvísari og professionellari kapping. Hetta arbeiðið er ein týðandi partur av langtíðarætlanini hjá KSF, har vit ikki bert menna spælarar, men eisini byggja upp eina heildarskipan kring føroyskan kurvabólt.
Samanumtikið hevur 2025 verið eitt ár við menning, vøkstri og fyrireikingum til framtíðina. KSF fer framhaldandi at arbeiða miðvíst fyri at styrkja kurvabóltin í Føroyum á øllum stigum – frá yngstu spælarunum til hægsta altjóða stig.



**Nevndarforfólk:**
John Norðbúð Thomsen

**Nevndarlimir:**
Sára Isfeldt, kassameistari
Anna Jakobsen, skrivari
Magnus Jakobsen, nevndarlimur
Jesper D. Christoffersen, nevndarlimur

**Aðrar nevndir:**
**Kappingarnevnd:**
Kenneth á Argjaboga
Súsanna Mørk
Jónathan Miné Olsen

**Dómsnevnd**
Sigrid Midjord
Rainer Latupeiressa
Pól Jakobsen

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Kurvabóltsfelagið Hamar | 38 |
| Kurvabóltsfelagið Sporðdrekin | 65 |
| Kurvabóltsfelagið Ravnur | 41 |
| Kurvabóltsfelagið Hávur | 70 |
| Kurvabóltsfelagið Falkur | 20 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Parasport

Parasport Føroyar / parasport@parasport.fo / Tel 217975 / www.parasport.fo

**Hjá okkum snýr ítróttur seg ikki bara um úrslit, men eisini um trivnað, menning og góðar upplivingar saman við øðrum.**

## Strategi

**Breidd:** Í 2025 arbeiddi Parasport Føroyar miðvíst við at styrkja breiddarítrótt fyri børn, ung og vaksin við breki ella serligum tørvi. Regluligar venjingar vórðu skipaðar í fleiri ítróttagreinum kring landið, og samstarvið við ítróttafeløg varð ment, so fleiri kundu vera partur av vanligum ítróttaumhvørvi. Eisini vóru skipað tiltøk og kappingar, sum góvu íðkarum møguleika at møtast og fáa góðar upplivingar saman. Málið er greitt. Tað er, at fleiri fáa gleði av ítrótti og felagsskapi.

**Úrval:** Fleiri føroyskir íðkarar hava luttikið í altjóða kappingum, har teir hava fingið virðismiklar royndir og góð úrslit. Dentur er lagdur á at menna íðkarar gjøgnum regluligar venjingar, kappingar og góða leiðslu rundan um íðkararnar. Samstundis verður arbeitt fyri at geva ungum íðkarum møguleika at menna seg og taka næsta stigið móti altjóða kappingum.

**Sjálvboðin:** Dentur er lagdur á at stuðla venjarum og hjálparfólki við ráðgeving, førleikamenning og einum góðum felagsskapi kring ítróttin. Sjálvboðin hava eisini verið við til tiltøk, venjingar og kappingar kring landið.

**Ítróttagleði:** Parasport Føroyar leggur stóran dent á ítróttagleði. Tað er týdningarmikið, at íðkarar kenna seg vælkomnar og uppliva gleðina við at røra seg og vera partur av einum felagsskapi. Hjá okkum snýr ítróttur seg ikki bara um úrslit, men eisini um trivnað, menning og góðar upplivingar saman við øðrum. Málið er, at øll íðka við gleði og kenna, at tey hoyra til.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

Special Olympics FM kappingar í svimjing, boccia og bowling. Leygardagin 29. mars í Klaksvík og í Leirvík
Special Olympics FM kapping í borðtennis, hósdagin 27. mars í Havn
Special Olympics jólakapping, svimjing

**Uttanlands:**

RIG svimjikapping í Íslandi, 24.-26. januar
NM í Boccia í Íslandi, 16.-17. mai
Forbundsmesterskaberne í svimjing í Odense, 7. juni
Poznań World Boccia Challenger í Póllandi. 25.-29. juni
Framerunning international cup, DK, 6.-13. juli
European Para Youth Games, svimjing, í Istanbul. 21.-27. juli
Virtus HM í svimjing í Bangkok. 20.–30. august
Gdansk Get Together Tournament 2025 í Póllandi, 12.-14. september
DM í Goalball í Odense, 31.okt og 1. november
NM í svimjing í Íslandi, 28. og 29. november

## Virksemi

Øll við-verkætlanin skal virka fyri at fleiri børn fáa møguleikan at vera við.
Í Føroyum eru nógv børn, sum hava gleði av ítrótti og felagsskapi. Men fyri nøkur børn kann tað vera torført at finna eitt ítróttatilboð, sum passar til teirra tørv. Tí er verkætlanin "Øll við" sett í verk.
"Øll við" arbeiðir fyri, at fleiri børn, ið bera brek ella hava serligan tørv skulu fáa møguleika at vera partur av ítróttinum. Málið er einfalt. Tað er, at fleiri børn skulu sleppa at vera við í venjing, rørslu og felagsskapi í føroyskum ítróttafeløgum.
Verkætlanin hevur fokus á at byggja brýr millum ítróttafeløg, fakfólk og familjur. Við kunning, samstarvi og royndarverkætlanum verður arbeitt við at finna loysnir, sum gera tað lættari hjá feløgum at bjóða fleiri børnum vælkomnum.
Fyri nógv børn hevur ítróttur stóran týdning. Her læra tey at røra seg, samstarva og kenna seg sum part av einum felagsskapi. Tí er tað eisini umráðandi, at ítrótturin er opin og rúmligur.
Øll við snýr seg tí ikki bara um nýggj tilboð. Tað snýr seg eisini um hugburð. Tá feløg fáa stuðul og vitan, verður tað lættari at laga venjing og umhvørvið, so fleiri kunnu vera við.
Við Øll við verður eitt skipað arbeiði sett í gongd fyri at styrkja inklusjón í føroyskum ítrótti. Málið er, at fleiri børn fáa møguleika at taka lut og at kenna gleðina av at vera partur av einum ítróttafelagsskapi.

## Sosialir miðlar

facebook.com/parasportforoyar
instagram.com/parasportforoyar



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

**Nevndarforfólk:**
Petur Elias Petersen

**Nevndarlimir:**
Hans Karl Højgaard, næstforfólk
Jóhan Lervig, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

**Special Olympics nevnd:**
Petur Elias Petersen, forfólk
Hans Karl Højgaard, national director
Tróndur Ravnsfjall, ítróttastjóri
Jensina Hansen, familjuumboð
Signa Vár Dávadóttir, íðkaraumboð
Jóhan Lervig, nevndarlimur
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Tróndur Ravnsfjall, ítróttaráðgevi
Harriet Durhuus, Verkætlanarleiðari

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Smæran | 30 |
| Svanur | 100 |
| Ljósið | 330 |
| Havnar Svimjifelag | 306 |
| NSÍ | - |
| Havnar judofelag | 70 |

# Ríðing

Ríðisamband Føroya / info@ridisamband.fo / Tel 511618 / www.ridisamband.fo

**Eitt ítøkiligt tekin um, at ungdómsmenningin gevur úrslit, sæst longu í kappríðingini, tí í trimum fylgjandi árum eru tað heilt ungar reiðkvinnur, ið hava vunnið FM í tvíspori.**

## Kappingar

**Í Føroyum**

**FM í kappríðing:**

FM1 14.06. í Vágum
FM2 29.06. við Leynavatn
FM3 29.07. í Havnardali
FM4 16.08. í Havnardali
FM5 30.08. í Vágum

**FM í gonguløgum:**

FM1 17.-19.04.
FM2 8.-10.05.
FM3 29.-31.05.
FM4 19.-21.06.
- allar kappingar í Havnardali

## Virksemi annars

**FM kappingar**

Á hvørjum ári verður skipað fyri regluligum FM kappingum.
Í kappríðing eru vanliga fimm kappingarumfør, har kappast verður um hava skjótasta rossið í fimm ymsum greinum. Hetta eru kappingar, ið byrjaðu fyri 100 árum síðani. Tí er kappríðing millum elstu ítróttargreinar í Føroyum.
Tað eru fimm ymiskar kappingargreinar. Trav, Tølt, Skeið, Tvíspor ung og Tvíspor vaksin. Sostatt eru 25 FM kappríðingar á hvørjum ári. Hetta eru kappingar, ið Ríðisamband Føroya skipar fyri í tøttum samstarvi við feløgini.
Skipað verður eisini fyri fýra kappingum í gonguløgum fyri íslandsross. Hendan kappingin er býtt upp í bólkar fyri tey ymsu gonguløgini og sergreinar í hesum gonguløgum. Vanliga verður kappast í seks greinum, t.v.s., at tað eru í øllum førum 24 kappingar hvørt ár.
Hesar kappingar verða fyriskipaðar eftir altjóða lógarverki, tí hetta er grein, har ross, reiðfólk og dómarar hava møguleika at koma út um landoddarnar at kappast.
Um veturin skipa feløgini eisini hvør í sínum lagi fyri kappingum. Hetta gongur serliga fyri seg í reiðhallunum í Havnardali og nú eisini í Miðvági, har góðir møguleikar eru fyri hesum.

**Havnardalur ein kraftdepil fyri ríðing**

Seinasta árið er nógv hent í Havnardali. Nýggj fjós eru komin, og bæði feløgini arbeiða miðvíst við breytum á teirra økjum. Mest eyðsýnt er tó, at Føroya Ríðingarfelag tók nýggju kappríðingarbreytina í nýtslu. Fleiri enn 1000 fólk vóru møtt ólavsøkudag at síggja kappríðing, tá ið nýggja breytin alment var tikin í nýtslu. Hetta má metast sum stórt framstig fyri felagið, sum fyri fyrstu ferð í søgu felagsins kundi halda kapping á egnum øki. Tað verður vænt at komandi summar, kunnu tríggjar aðrar breytir takast í nýtslu á økinum.

**Ítøkiligt úrslit**

Ungdómsmenningin bleiv eftirmett tíðliga á árinum. Mennari og feløg løgdu í felag ein nýggjan leist fyri hetta arbeiðið. Tað tykist sum, at hetta virkar betri, men tað verður sjálvandi eisini eftirmett seinni. Eitt ítøkiligt tekin um, at ungdómsmenningin gevur úrslit, sæst longu í kappríðingini, tí í trimum fylgjandi árum eru tað heilt ungar reiðkvinnur, ið hava vunnið FM í tvíspori.
Í árinum var eisini gjørt av, at skrivarin, sum vit høvdu í eina royndartíð, skuldi halda fram. Hetta er skipan, sum hevur virkað sera væl, og allir partar eru nøgdir við hana.
Hetta er liður í at hækka stigið á umsitingini, tað skal eisini styrkja um, hvussu sambandið møtir sínum limum.

## Annað

Viðvíkjandi ungdómsmenningini hevur tað eydnast væl við at leggja undirvísingina væl til rættis og at koma út til ymisku feløgini, og undirtøkan hevur verið góð.

## Sosialir miðlar

facebook.com/profile.php?id=100063579280565
instagram.com/ridisambandforoya



**Nevndarforfólk:**
Brandur í Dali

**Nevndarlimir:**
Zacharias R. Jacobsen, næstforfólk
Alexandra Kjeld, nevndarlimur
Kristian Krosstein, tiltakslimur
Andrias Nielsen, tiltakslimur

**Lønt starvsfólk:**
Eyðna Simonsen, skrivari
Nina Brockie, ungdómsmennari

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Føroya Ríðingarfelag, Tórshavn | 400 |
| Føroyskt Íslandsrossafelag, Tórshavn | 150 |
| Vága Ríðingarfelag, Miðvágur | 120 |
| Dalaross, Kollafjørður | 50 |
| Suðurross, Porkeri | 30 |
| Sleipnir, Runavík | 50 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Rógving

Róðrarsamband Føroya / rsf@rsf.fo / Tel 267553 / www.rsf.fo

**Øll feløg undir RSF gera eitt megnar sjálvboðið arbeiði fyri felagsskapin og kappingarnar.**

## Strategi

**Breidd:**
Flestu feløgini undir RSF bjóða øllum áhugaðum møguleika at nýta hølir og bátar til stuttleikavenjing. Hetta verður gjørt uttan krav um kappingarluttøku. RSF skipaði aftur fyri langteinaróðri í heyst.

**Úrval:**
Í januar luttóku ungu íðkararnir í DM, og í februar skipaði RSF fyri felags karmum til talgildu heimsmeistarakappingina í innióðri. Í heyst varð úrvalsarbeiðið styrkt við fleiri felagsvenjingum og vitjanum kring landið, sum gav góð úrslit. Vit luttóku eisini í BRIC, og fyrsti rógvarin fekk úrvalspengar frá ÍSF eftir nýggja leistinum.

**Sjálvboðin:**
Øll feløg undir RSF gera eitt megnar sjálvboðið arbeiði fyri felagsskapin og kappingarnar. RSF er byrjað at skipa fyri ymiskum skeiðum fyri sjálvboðin - eitt nú róðursfólkaskeið og dómaraskeið.

**Ítróttagleði:**
RSF frøðist um, at serliga ung róðrarfólk týðiliga vísa gleði við at hoyra til róðrarumhvørvið. Eisini er tað gleðiligt at síggja, at kappingarluttøkan bara veksur, og hvussu spent øll eru, tá ið tey møta til kapping.

## Kappingar

**Í Føroyum:**
3 ódnartøk í maj - Runavík, Miðvágur, Norðragøta
7 FM kappróðrar í juni/juli
1 langteinaróður í august - Skálafirðið
4 FM/Grand Prix kappingar í innirógving í mars og oktober/november - Oyrabakki, Eiði, Trongisvági og Kambsdali
1 talgild Open Nordic kapping í innirógving, mars - Fuglafirið. 4 dagar við talgildari altjóða HM kapping í innirógving - við Tjarnir og við Gøtugjógv,

**Uttanlands:**
1 DM kapping í innirógving - januar - Gladsaxe
1 British Rowing Indoor Championships - desember - Birmingham

## Virksemi

Sum nakað nýtt er RSF farið undir at skipa arbeiðið í undirnevndir við hvør sínum ábyrgdarøki: kappingarnevnd, menningar- og útviklingarnevnd og altjóða- og úrvalsnevnd. Arbeiðið við at menna og styrkja hesar nevndir heldur fram í 2026.
Árligi aðalfundurin er í mars, og í heyst varð eftirmetingarfundur hildin við feløgunum um kappingarárið 2025. Skipað varð fyri tveimum róðursfólkaskeiðum í Hósvík og í Vági - umframt tveimum dómaradøgum – einum á vári og einum á heysti.
Vit luttóku eisini á Skúlaleikum fyri bæði mið- og hádeild, og arbeitt hevur verið víðari við at menna stroyming av kappingum. Landsliðsvenjarin vitjaði feløg kring landið í heyst og greiddi frá ætlanum fyri kappingarárið og um, hvussu teknisk venjing og programbygnaður kann leggjast til rættis.

## Framtíðarætlanir

Arbeitt verður fram móti at fáa parasport við í inniróður, skipa eitt tilboð til eldri/pensjonistar og halda kappingar við øðrum teinum enn 2000 m. Landsliðsarbeiðið skal mennast og skipast í fasta legu, og uppstartur verður í coastal rowing. Harumframt verður arbeitt víðari við strategiini frá 2025 við einari nágreinaðari 3- og 5-ára ætlan.

## Sosialir miðlar

rsf.fo; innirodur.rsf.fo; urslit.rsf.fo
Instagram: #faroeserowing
Facebook: Róðrarsamband Føroya



**Nevndarforfólk:**
Petur Hansen

**Nevndarlimir:**
Vár Guriardóttir Hansen, næstforfólk
Mira Winther Klit, nevndarlimur
Rebekka Jacobsen, nevndarlimur
Henrik Rahbek, nevndarlimur
Unn Eldevig Petersen, nevndarlimur
Jógvan S. Midjord, eykalimur
Elias Zachariassen, eykalimur

**Kappingarnevnd:**
Mira Winther Klit, kappingarleiðari
Annika Jacobsen, Elias Zachariasen,
Jógvan S. Midjord, Unn Eldevig Petersen

**Menningar og útbúgvingarnevndin:**
Henrik Rahbek, forfólk
Rebekka Jacobsen, Jógvan S. Midjord

**Lønt starvsfólk:**
Ulrik Andersen, teknisk ábyrgd 1/2
Annika Jacobsen, samskipari 1/3

Mynd: Gilli Brend í Høyvík

## Feløg og limatøl

| | | | |
|---|---|---|---|
| Argja Róðrarfelag | 55 | Kvívíkar Róðrarfelag | 20 |
| Árnafjarðar Róðrarfelag | 15 | Miðvágs Róðrarfelag | 35 |
| Eiðis Róðrarfelag | 45 | Norðdepils Hvannasunds Róðrarfelag | 35 |
| Froðbiar Sóknar Róðrarfelag | 35 | Róðrardeild Sandavágs Ítróttarfelag | 35 |
| Havnar Róðrarfelag | 115 | Róðrarfelagið Knørrur | 65 |
| Hósvíkar Róðrarfelag | 45 | Skála Róðrarfelag | 25 |
| Hvalbiar Róðrarfelag | 0 | Strálan, Strendur | 10 |
| Hvalvík- Streymnesar Róðrarfelag | 25 | Sumbiar Ítróttafelag | 10 |
| ÍF Kappróður | 25 | Sørvágs Róðrarfelag | 30 |
| Kappróðrarfelagið NSÍ | 70 | Vágs Kappróðrarfelag | 45 |
| Kappróðrarfelagið Tindur | 60 | VÍF Kappróður | 40 |
| KÍF Kappróður | 25 | Inniróður | 180 |
| Klaksvíkar Róðrarfelag | 70 | **Tilsamans** | **1115** |

SERSAMBANDIÐ FYRI SÚKKLING OG TRIATHLON

# Súkkling og Triathlon

Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon / sst@sst.fo / Tel 216420 / www.sst.fo

**Fyrireikingar til oyggjaleikir í Føroyum fara at fylla heilt nógv komandi tíðina. Harumframt vilja vit styrkja førleikarnar við venjaraskeiðum og dómaraskeiðum.**

## Strategi

**Breidd:**
Vit hava millum anað sett okkum fyri, at vit vilja skapa fleiri tiltøk fyri breiddina. Eitt nú hava vit sett eina “Avbjóðing” í álmanakk-an, sum er ætlað breiddini at luttaka í. Vit hava harumframt sett eitt fólk í starv at menna sambandið. Ein uppgáva hjá starvs-fólkinum er at hjálpa feløgunum við at fáa børn, ung og breidd til feløgini.

**Úrval:**
Tíðliga í 2025 bleiv ein ætlan gjørd fyri landsliðið, og ein brutto-hópur bleiv úttikin til OYL 2025. Hesi hava verið til ymiskar kappingar í 2025.
Í skrivandi stund eru tíggju íðkarar í bruttohópinum. Tvey eru í MTB, tvey eru í TRI og seks eru í súkkling. Fyri at fáa góða grundvenjing var venjingarlegа í Gran Canaria tíðliga í 2026.

**Sjálvboðin:**
Hendan partin hava vit ikki gjørt nóg nógv við.

**Ítróttagleði:**
Tað verðu arbeitt miðvíst við at menna umstøðurnar at íðka súkkling. Hetta er millum annað gjørt við at seta fólk í starv, sum hevur hetta til uppgávu.

## Kappingar

**Í Føroyum:**
FM Tri - OL teinur - 16/8 - Klaksvík
FM Tri - Sprint - 31/8 - Tórshavn
FM veg tíðarsúkkling - 3/9 - Strendur
FM veg vegasúkkling - 14/9 - Hoyvík
FM MTB XCC - 26/9 - Hoyvík
FM MTB XCO - 28/9 - Tórshavn
Tour de Eysturoy (breiddartiltak) - 5/10 - Skála

**Uttanlands:**
MTB kapping í Spania 16/5
Pinseløb - 9/6 - Danmark (Silkeborg, Herning, Hammel)
Jels Tri kapping 14/6 - Danmark
Oyggjaleikir - 5/7 - Orkney

## Virksemi

í 2025 hevur SST sett eina fimm ára ætlan í verk, har SST skal gerast til eitt  sterkt og savnandi sersamband.
Fyrsta stig í ætlanini verður at seta ein arbeiðsbólk, sum arbeiðir fyri at menna hesa ætlanina. Tí eru nú fimm persónar í starvi í SST. Næsta stig verður at skapa betri karmar fyri bæði breidd og elituítrótti. Tíðliga í 2026 bíløgdu vit eitt annlegg, sum tekur tíð, og sum kann geva beinleiðis úrslit frá kappingum. Umframt hetta er gongd sett á at fáa fyrstu MTB-breytina í Føroyum.

**Felagsskapur og limafeløg**
Sterkar røtur í felagsskapinum eru grundarlagið undir øllum arbeiði hjá SST. Tí verður dentur lagdur á at styrkja sambondini við verandi feløg og samstundis at skapa rúm fyri, at nýggj feløg kunnu spretta kring landið. Eitt av høvuðsmálunum er at gera tiltøk, sum geva meining fyri vanliga súkklaran, har bæði nýggir limir og breiddin í SST kann kenna seg heima, og har felagsskapurin er í miðdeplinum. Eitt dømi um hetta er ætlanin um at menna eina crit race-seriu, sum verður á stevn-um fyri børn, vaksin, roynd og elitu. Eitt annað dømi er at fáa Avbjóðingina í gongd aftur.
SST vil eisini styrkja samstarvið við onnur áhugafeløg og netverk so sum Team Rynkeby, Glaðar súkklarar og onnur, sum arbeiða við at fáa fólk á súkklu bæði til frítíð, venjing og vælgerandi endamál.
Saman við hesum verður eisini arbeitt við at stimbra nýggj feløg og at stuðla teimum í at koma fyri seg.

**Ungdómsmenning**
Ungdómsarbeiðið er eitt av høvuðsmálunum í framtíðarætlanini hjá SST.
SST vil tí menna skipað venjingartilboð til børn og ung í øllum feløgunum. Hetta skal tryggja, at øll - óansæð hvar í landinum tey búgva, hava møguleika at royna súkkling og triathlon á egnum stigi.

**Amboð og útgerð**
Vit vilja eisini tryggja, at feløgini hava atgongd til røttu amboðini, tá tað snýr seg um útgerð, venjaramenning og venjingarætlanir.

## Framtíðarætlanir

**2. Visón**
SST skal blíva eitt sterkt og savnandi sersamband, sum:



**Nevndarforfólk:**
Arnfinnur Helmsdal

**Nevndarlimir:**
Andrass Joensen, næstforfólk
Súsanna Skylv, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Torkil Veyhe, dagligur leiðari og landsliðsvenjari 1/4
Sólja Veyhe, stuðulssøkjari 1/8
Lena Hallgren, roknskap 1/8
Jóhann Brend, menning av sersambandinum 1/8
Elsa Jacobsen, samskifti og rakstur 1/8

**Feløg:**
Tórshavnar Súkklu- og Triathlonfelag
Norðstrok
Troy
Fjallasúkklufelagið
Vága súkklufelag

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

- eggjar bæði ungdóminum og teimum vaksnu til at røra seg og skapa tryggar karmar til súkkling og triathlon
- mennir ungdómin innan súkkling og triathlon
- fær 500 føroyingar at súkkla / gera triathlon
- skapar betri rammur fyri bæði breidd og elituítrótt

Hetta er 5 ára ætlan hjá SST.
Vit eru til fyri at geva øllum gleðina av súkkling og triathlon. Vit vilja gera ítróttin atkomuligan fyri øll - ung, vaksin, breidd og elitu.

**3. Virðir**
Vit byggja okkara arbeiði á hesi virðir:
- **Felagsskapur:** SST er fyri øll, og vit gera tað saman.
- **Ábyrgd:** Vit taka ítróttin og ungdómsmenning í álvara.
- **Opinleiki:** Politikkur, mál og tilgongdir skulu altíð síggjast og skiljast uttanífrá.
- **Áhugamál hjá limunum:** Feløg og limir eru altíð kjarnin í arbeiðinum.
- **Dygd:** Vit arbeiða við góðari skipan - bæði til venjing, kappingar og fyriskipan.

**4. Strategisk mál**
SST hevur sett sær nøkur strategisk mál at arbeiða eftir fyri at røkka visjónini. Komandi fimm árini verður dentur lagdur á fýra høvuðsøkir, har vit arbeiða málrættað við einum meginmáli í senn.
- Skipan og leiðsla
- Felagsskapur og limafeløg
- Ungdómsmenning
- Menna ítróttin og fáa hann at vaksa

Endamálið er at byggja eitt sterkt og vælskipað sersamband, sum tryggjar støðugan vøkstur, góðar karmar og eina greiða leið í menningini av føroysku súkklingini og triathlon.

## Annað

**Arbeiðsbólkar og Oyggjaleikir 2027**
Eitt serligt arbeiðsøki komandi árini verður fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar 2027. Til hesa uppgávu verður ein serligur oyggjaleika-arbeiðsbólkur, sum hevur til endamáls at tryggja, at SST er væl fyrireikað til at hýsa teimum kappingum, sum sambandið fær ábyrgdina av.
Yvirskipaði samskiparin og menningarfólkið stýra hesum arbeiðinum í felag og mynda bindiliðið millum SST og oyggja-leikanevndina. Arbeiðsbólkurin fer at savna fólk við royndum innan fyriskipan og ítrótt og seta ábyrgdarfólk fyri hvørja grein, sum SST skipar fyri. Talan verður um sjey kappingargreinar, sum hvør krevur egið samskipandi toymi.

## Sosialir miðlar

instagram.com/sst.fo/
facebook.com/p/Sersambandi%C3%B0-fyri-S%C3%BAkkling-og-Triathlon-61585559982529/

SKJÓTISAMBAND FØROYA

# Skjóting

Skjótisamband Føroya / skot@skot.fo / Tel 244143 / www.skot.fo

**Føroysku landsliðini í leirdúgvuskjóting hava ongantíð áður luttikið í so nógvum altjóða kappingum í einum kappingarári sum í fjør.**

## Strategi

Um okkara altjóða arbeiðið verður av og á spurt, hvørja strategi vit hava. Tá er gott at hava ÍSF-strategiina at vísa á, hóast hon ikki beinleiðis er tilvitaður partur í gerandisdegnum hjá SkF. Hóast vit ikki brúka strategiina tilvitað, verður hon kortini nógv brúkt uttan at vit seta orð á tað frammanundan.

**Breidd**

Tað eru uml. 80 ár millum okkara yngsta og elsta íðkara. Tá tað kemur til úrval, krevur okkara altjóða limaskapur, at vit seta fígging av til at menna okkara landsliðsíðkarar.

**Sjálvboðin**

Allar skjótibreytir í Føroyum eru í dag riknar av sjálvbodnum í limafeløgunum. Uttan hesi sjálvbodnu hevði neyvan nøkur breyt verið í rakstri í dag. Tey sjálvbodnu gera tað, tí tey elska felagið og ítróttina, og ikki tí tey vilja hava nakað afturfyri.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

| | | |
|---|---|---|
| 29/03 | Veiðifelagið Byrsumúli | F80 kappingin |
| 12/04 | Eysturskot | Víkingakaping 2025 |
| 19/04 | Sunda Byrsufelag | 39 ára kappingin |
| 26/04 | Eysturskot | Flaggdagskapping |
| 03/05 | Vestmanna Byrsufelag | Krossmessukapping |
| 10/05 | Veiðifelagið Byrsumúli | 14. Simme Cup |
| 17/05 | Eysturskot | NT kapping |
| 24/05 | Eysturskot | Vármúlakapping |
| 31/05 | Eysturskot | OT kapping |
| 31/05 | Sunda Byrsufelag | Magn við Streymin |
| 14/06 | Eysturskot | F-16 kappingin |
| 14/06 | Sunda Byrsufelag | Summarkappingin |
| 21/06 | Veiðifelagið Byrsumúli | Jóansøkukappingin |
| 21/06 | Vestmanna Byrsufelag | Syftusøkukapping |
| 05/07 | Eysturskot | OT kapping |
| 12/07 | Eysturskot | NT kapping |
| 26/07 | Veiðifelagið Byrsumúli | Tórshamar Open |
| 09/08 | Eysturskot | Eysturoyar Cup |
| 30/08 | Veiðifelagið Byrsumúli | FM OL-trap |
| 30/08 | Sunda Byrsufelag | FM OL-skeet |
| 06/09 | Eysturskot | FM Nordisk Trap |
| 13/09 | Sunda Byrsufelag | Veðrakappingin |
| 27/09 | Veiðifelagið Byrsumúli | Mikkjalsmessukappingin |
| 25/10 | Veiðifelagið Byrsumúli | Harukappingin |

**Uttanlands:**

| | | |
|---|---|---|
| 19/04 | Danmark | Viborg GP |
| 16/05 | Týskland | GP des PSV (Trap 200 WS) |
| 24/05 | Danmark | CPH GP 2025 |
| 07/06 | Danmark | Scandinavia Open 2025 |
| 07/07 | Italia | ISSF World Cup Shotgun |
| 23/07 | Frankaríki | EM Chateauroux |
| 23/08 | Noregi | Landskamp 2025 |
| 27/09 | DanmarkHorsens | Efterårs GP |

## Virksemi

**Altjóða luttøka**

Føroysku landsliðini í leirdúgvuskjóting hava ongantíð áður luttikið í so nógvum altjóða kappingum í einum kappingarári sum í fjør.

Í World Cup hendi tað serstaka, at Alex Johannesen úr Eysturskoti einans misti eina dúgvu seinna dagin í innleiðandi umførunum til finaluna. Hetta er úrslit, ið kann javnstillast við heimselituna, men av tí at fyrri dagurin ikki var líka góður, endaði Alex á einum 112 plássi av 183 íðkarum, sum er sera flott.

Marius F. Joensen úr Sunda byrsufelagi rakti 118 av 125 dúgvum í EM. Vit tí úrslitinum kundu vit errin siga, at Føroyar eiga 35. besta OL-skeetíðkara í Evropa. Tað er ikki langt síðan, at hetta als ikki bar til, tí tá høvdu vit ikki altjóða limaskap.

Altjóða kappingarnar eru á sera høgum stigi. Við at luttaka í hesum kappingum læra okkara íðkarar eina rúgvu. SkF mennist eisini sum sersamband ítróttaliga og ikki minst í logistikki og í at samskipa.

**Limaskapur í ESC endaliga samtyktur**

Skjótisamband Føroya hevur havt treytaðan limaskap í evropeiska skjótisambandinum ESC. Treytin fyri at fáa fullan limaskap var, at aðalfundurin í ESC góðtók limaskapin. Úrslitið av atkvøðugreiðsluni bleiv, at ongin varð ímóti. Tvær vóru blankar og hini atkvøddu fyri.

Við hesum er føroysk skjóting komin á mál við altjóða limaskapum, sum sersambandið setti sær fyri at blíva limur í.

Limaskapirnir eru hesir:

2020: International Shooting Federation (altjóða) (ISSF)

2021: Nordic Shooting Region (norðurlendska) (NSR)

2025: European Shooting Federation (evropeiska) (ESC)

Við hesum kunnu føroyskir íðkarar luttaka í øllum altjóða skjótikappingum undir egnum flaggi á jøvnum fóti við øll onnur lond í heiminum.

**Príshækkingar**

Prísurin á patrónum er hækkaður nógv við inflatiónini. SkF hevur kannað møguleikan fyri at keypa dúgvur og patrónur inn í stórum fyri at fáa prísin niður.

Tíverri hevur SkF ikki fíggjarliga orku til hetta, men limafeløgini hava nú við góðum stuðlum megnað at savna so mikið av peningi saman, at tað ber til at keypa inn í stórum nøgdum. Endaligu prísirnir fyriliggja ikki enn, men vónandi fer tað at fáa prísin á dúgvum og patrónum niður.

**Oyggjaleikir**

Síðan tað bleiv alment, at oyggjaleikir verða í Føroyum í 2027, hevur SkF fyrireikað seg til at skipa fyri skjótingini á leikunum. Nógv tíð verður brúkt til fyrireikingarnar. Krav- og uppgávulistar eru gjørdir, so vit kunnu tryggja eina góða kapping, sum íðkararnir ikki fara gloyma.



**Nevndarforfólk:**
Esmar Joensen

**Nevndarlimir:**
Jón Jacobsen, nevndarlimur
Jónstein Johannesen, nevndarlimur
Jógvan Egholm, nevndarlimur
Tórur Fløtt, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Herleif Hammer, skrivari

**Feløg og limatøl**

| | |
|---|---|
| Eysturskot (EYS), Leirvík | 51 |
| Veiðifelagið Byrsumúli (VBM), Tórshavn | 199 |
| Sunda Byrsufelag (SBF), Norðskáli | 26 |
| Vestmanna Byrsufelag (VBF), Vestmanna | 44 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

**Úrslitini frá samantaldu landskappingunum**

| Kapping | Grein | Vinnari | Unglingakapping |
|---|---|---|---|
| Føroyameistari | OL Trap | Alex Johannesen, VBM | Bartal Klettheyggj, VBM |
| Føroyameistari | Skeet | Tórur Fløtt, SBF | Leivur Joensen, SBF |
| Føroyameistari | N.Trap | Alex Johannesen, EYS | Marius Gaardlykke, EYS |
| Grand Prix | Trap | Alex Johannesen, VBM | |
| Grand Prix | Skeet | Tórur Fløtt, SBF | |
| Føroya Cup | Trap | Alex Johannesen, EYS | |
| Føroya Cup | Skeet | Tórur Fløtt, SBF | |

## Sosialir miðlar

facebook.com/Skjotisamband
twitter.com/skjotisamband
instagram.com/skjotisamband_foroya

# Svimjing

Svimjisamband Føroya / ssf@ssf.fo / Tel 607559 / www.ssf.fo

## Endamálið hjá SSF er altíð, at so nógv sum gjørligt skulu kunna læra at svimja og lívbjarga

### Strategi

**Breidd:**

SSF hevur ikki beinleiðis skipað fyri breiddartiltaki í 2025, men SHF skipaði fyri væleydnaðari rørsluviku í Kvívík. Alsamt fleiri luttaka eisini á serligu barnastevnunum.

**Úrval:**

SSF luttók við liðum í HM, EM og EM í Open Water við máli um at røkka topp-32 ella -16, sum eru krøvini til stig 2 og 1 í úrvalsskipanini hjá ÍSF. Topp-32 varð rokkið í HM, og topp-16 varð rokkið í EM í OW.

**Sjálvboðin:**

Einki beinleiðis virksemi í 2025. Tó eru umstøðurnar vorðnar munandi frægari við nýggju umstøðunum í Havn og í Runavík. Íðkaranevndin skipar fyri felags gallaveitslu.

**Ítróttagleði:**

Størsta framgongdin er, at íðkarar í størri mun eru við í avgerðunum umvegis íðkaranevndina og við ungum fólki í starvsnevndini hjá SSF. Inklusjón og trivnaður eru eisini sett á breddan.

### Kappingar

**Í Føroyum:**

11. - 12. januar 2025 SuSvim Open (50m), Vágur
18. januar 2025 SHF-stevna (16m), Kvívík
1. februar 2025 FLOT-stevna (16m), Toftir
8. - 9. februar 2025 HS Open (50m), Tórshavn
22. - 23. februar 2025 SuSvim Open (50m), Vágur
8. mars 2025 SuSvim-stevna (16m), Vágur
15. - 16. mars 2025 Lions Open (25m), Klaksvík
29. mars 2025 Reysta-stevna (16m), Leirvík
12. apríl 2025 HS-stevna B1-4 (25m), Tórshavn
10. - 11. mai 2025 ABMS (25m), Tórshavn
7. - 9. juni 2025 FML/JML (50m), Vágur
5. - 6. juli 2025 NMU (50m), Tórshavn
6. september 2025 FRO-ISL (25m), Tórshavn
20. september 2025 HS-stevna (25m), Tórshavn
3. - 4. oktober 2025 HS Open (25m), Tórshavn
24. - 25. oktober 2025 Ægir Open (25m), Klaksvík
1. november 2025 SHF-stevna (16m), Kvívík
7. - 9. november 2025 FMS/JMS (25m), Klaksvík
12. - 13. desember 2025 HS Jól (25m), Tórshavn

**Uttanlands:**

28. - 31. mai 2025 EM í Open Water (OW), Kroatia
26. - 28. juni 2025 EM U23 (50m), Slovakia
28. - 29. juni 2025 SMÍ (50m), Ísland
1. - 6. juli 2025 EJM (50m), Slovakia
14. - 17. juli 2025 OyL (25m), Orknoyggjar
27. juli - 3. august 2025 HM (50m), Singapore
28. - 30. november 2025 NM/NJM (25m), Ísland
2. - 7. desember 2025 EMS (25m), Pólland

### Virksemi

SSF skipar regluliga fyri felags fundum, har nevndarfólk, venjarar og onnur úr feløgum og sambandi umrøða aktuell evni og ætlanir um nú- og framtíðina. Hetta tykist at betra munandi um samhoyri og kósina í føroyskari svimjing.
Landsliðsvirksemið hjá SSF varð endurskoðað í 2024. Hetta bleiv m.a gjørt á fundi við feløgini á heysti í 2024 og síðani við starvsnevndarviðgerð í 2025. Lagt varð um til skipan við landsliðssamskipara, sum eisini hevur nýggju úrvalsskipanina um hendi.
Íðkaranevndin hjá SSF er rættiliga virkin. Hon er hoyringspartur, og forfólkið er fullgildur limur í starvsnevndini hjá SSF. Tey skipa eisini fyri gallaveitsluni hjá SSF, har ársins svimjari v.m. verður kosin.
SSF skipaði hin 5. og 6. juli í 2026 fyri Norðurlendsku Meistarastevnuni fyri Ung, har umleið 100 svimjarar úr Íslandi, Føroyum, Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi, Estlandi, Lettlandi og Litava luttóku.
SSF skipaði eisini fyri felags venjingarlegu og landsdysti í Havn hin 5. til 7. september í 2025, har ungdómslandslið hjá Íslandi og Føroyum vandu, dystaðust og hugnaðu sær saman. Hetta er tiltak, sum vónandi verður á hvørjum ári, har Føroyar og Ísland skiftast um at skipa fyri.
Bylgjan í Runavík varð vígd hin 29. desember 2025. Tað betrar munandi um møguleikan at svimja við Skálafjørðin. Ein beinleiðis avleiðing av hesum er, at nýggja svimjifelagið Neptun er komið afturat limahópinum hjá Svimjisambandi Føroya.
SSF er rættiliga virkið her heima og uttanlands við so vítt gjørligari uppmøting, har ynski er um tað. Forfólkið er nevndarlimur í European Aquatics við svimjifrálæru, miðling og uppbygging av dátusavni sum uppgávuøki.
Í 2025 vóru fundarboðini m.a. til aðalfund og inklusjóns-ráðstevnu hjá European Aquatics - umframt tiltak um gjøgnumskygni í Bruxelles í juni 2025. Kunnandi fundir hjá World og European Aquatics um komandi átøk vóru eisini á skránni.
Í Føroyum hava góð prát verið við fólk innan skúlaverkið um møguligt samstarv í sambandi við lívbjarging og svimjifrálæru.
Endamálið hjá SSF er altíð, at so nógv sum gjørligt skulu kunna læra at svimja og lívbjarga.



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

**Nevndarforfólk:**
Rókur í Jákupsstovu
**Nevndarlimir:**
Alvi Hjelm, næstforfólk
Bjørg O. Jensen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Annika J. Olsen, nevndarlimur
Signhild Rannváardóttir, nevndarlimur, íðkaraumboð
H. Rúni Gaardbo, tiltakslimur
**Dómsnevnd:**
Anni á Hædd, forfólk
Jórun Eið Johannesen, nevndarlimur
Monika H. Rasmussen, nevndarlimur

**Íðkaranevnd:**
Signhild Rannváardóttir, forfólk
Natanael A. Matras, næstforfólk
Barbara Debes, skrivari
Rói Bech, nevndarlimur
Bjørg Ólavsdóttir, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
H. Rúni Gaardbo, landsliðssamskipari 1/6

### Framtíðarætlanir

https://ssf.fo/felagsskapur/aetlanir/

### Annað

Sum liður í 'Good Governance' átakinum hjá World Aquatics síðani 2021 arbeiðir SSF áhaldandi við at betra um sín fyrisitingarsið. Átøk í 2025 vóru serliga at betra um gjøgnumskygni í SSF. Ynskið um javnstøðu í starvsnevndini hjá SSF varð rokkið á aðalfundinum í 2024 og aftur í 2025. SSF undirskrivaði í 2025 felags inklusjóns-yvirlýsing hjá European Aquatics og roynir enn at fáa í lag felags fráboðanarskipan og etiska nevnd undir ÍSF - umframt at eggja til betringar umvegis átakið Tryggur Ítróttur hjá ÍSF.

### Sosialir miðlar

www.facebook.com/svimfor
www.instagram.com/svimfor/

### Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Svimjifelagið FLOT | 192 |
| Svimjifelagið Hellufossur | 92 |
| Ægir | 400 |
| Suðuroyar Svimjifelag | 130 |
| Havnar Svimjifelag, Tórshavn | 306 |
| Svimjifelagið Neptun | 115 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) | 53 |
| Svimjifelagið Reysti (Reysti) | |
| Íalt | 1288 |

# Billard

Billardssamband Føroya

Billardsamband Føroya / billardsambandforoya@gmail.com / Tel 288701 / www.billard.fo

**Ætlanin er at fáa fleiri fólk at íðka billard. Ein møguleiki, sum vit halda okkum síggja, er, at áhugin fyri billardítrótti er størri enn núverandi virksemi.**

## Strategi

**Breidd:** Fokus er á at fáa fleiri fólk at íðka billard. Vit hava roynt at stroymt dystir - umframt at eggja til fleiri fólksligar eindagskappingar. Arbeitt verður tó við fleiri ætlanunum til næsta ár.
**Úrval:** Fyri at styrkja úrvalsítróttin hava vit gjørt royndir við skeiðsvirksemi.
Vit stroyma eisini dystir. Tað gera vit fyri at kunna læra av dystunum.
**Sjálvboðin:** Vit hava ikki havt nakra beinleiðis ætlan til sjálvboðin hetta árið.
**Ítróttagleði:** Vit ikki havt nakra beinleiðis ætlan til ítróttagleði hetta árið.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

FM fyri lið - liðkapping, sum er yvir veturin og inn í 2026. Hon er skipað í tríggjar deildir, har ið hvørt lið hevur heimadyst og útidyst móti hinum liðunum í deildunum.
FM einstaklingar verður í apríl 2026, einstaklingarkapping, ið verður skipa í hølunum hjá Tvøroyrar Billardfelag.

**Uttanlands:**

Vit hava ikki skipað fyri nakrari kapping uttanlands í ár. Vit hava skipað fyri kapping saman við donskum felagi annað hvørt ár. Næstu ferð verður í 2026.

## Virksemi annars

Í ár hava vit roynt at havt fokus á at fáa stroymt allar dystirnar. Hetta hevur ikki borið á mál, og hetta má tí styrkjast. Vit halda, at hetta kann loysast við góðari leiðbeining og við at leggja ein fastan leist fyri, hvussu hendan stroymingin skal fara fram.
Á sumri í 2025 var ætlanin at hava tvær sonevndar skoma'er kappingar á ávikavist Varmakeldu og Eystanstevnu. Tann á Eystanstevnu datt tíverri niðurfyri vegna samanfallandi tiltøk.
Hesar kappingarnar hava feløgini skipað fyri fyrr. Vit halda, at tað er upplagt at hava hesar á stevnum, av tí at hesar kappingarnar eru væl dámdar og fáa góða undirtøku - eisini millum fólk, sum ikki vanliga spæla billard.
Vit hava eisini roynt at skipa fyri skeiðvirksemi í ár. Hetta fyrsta árið valdu vit at skipa fyri einum fyrilestri við fokusi á úrvalsítrótt. Hetta halda vit hevur eydnast væl, men í eftirmetingini meta vit, at um vit skulu fáa mest burtur úr hesum, so síggja vit, at tørvur er á at samantvinna fyrilestrar við praktisk skeið - til dømis við billardinstruktørum.
Umframt hesum hava feløgini eisini skipað fyri tveimum kappingum í vetur. Klaksvíkar billardfelag hevur skipað fyri Haldor Holm kup, sum er ein cup kapping, ið er yvir eitt vikuskifti. Vinnarin í ár gjørdist Kristian Suni Høgnesen. Hin kappingin er Lions Kup, sum verður fyriskipað av Tvøroyrar Billardfelag. Kappingin er skipað soleiðis, at bert spælarar við minni enn 15 í snitt sleppa at luttaka. Tað vil siga, at hendan kappingin er ætlað breiddini. Vinnarin í ár gjørdist Tórdur Wiberg Holm.

## Framtíðarætlanir

Ætlanin er at fáa fleiri fólk at íðka billard. Ein møguleiki, sum vit halda okkum síggja, er, at áhugin fyri billardítrótti er størri enn núverandi virksemi. Ein av avbjóðingunum, sum vit síggja, er, at ítrótturin er ov lítið atkomiligur. Tað eru ov fá fólk, sum koma inn í billardfeløgini. Ætlanin næstu árini er at leita eftir møguleikum fyri at fáa billardborð inn á almenn pláss. Tað vil siga vertshús, ungdómshús, skúlar og líknandi.
Í framtíðini ætla vit eisini at bjóða undirvísingartilfar til feløgini. Hetta tilfarið finst, so tað einasta sum skal til við hesum er at fáa avtalur í lag og gera hetta atkomuligt. Vit ætla eisini at víðka skeiðsvirksemi, sum vit hava havt, til at umfata billardinstruktørar, sum vit ætla at bjóða út í komandi ári. Hetta er í fyrstu atløgu ætlað til úrvalsleikarar, men um hetta eydnast væl, hugsa vit at leggja meira dent á byrjanarspælarar.

## Sosialir miðlar

facebook.com/groups/267668119918738
facebook.com/Billardsambandforoya



**Nevndarforfólk:**
Marius Thomassen

**Nevndarlimir:**
Ólavur Kjølbro, kassameistari
Oskar Eiriksson, skrivari
Urbanus Knud Olsen, nevndarlimur
Jákup Arnholdt Lambaa, nevndarlimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Skálafjarðar Billardfelag | 10 |
| Klaksvíkar Billarfelag | 18 |
| Billardfelag Fuglafjarðar | 18 |
| Havnar Billardfelag | 14 |
| Tvøroyrar Billardfelag | 12 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Boksing

Boksisamband Føroya / boksisambandforoya@gmail.com / Tel 255215

**Arbeitt verður við einari stevnu í Føroyum í september í 2026. Arbeitt verður við diplomkapping í Føroyum í 2027.**

## Strategi

**Breidd:**
Venjaraútbúgving. Bæði kamp- og motiónsboksing

**Úrval:**
Ungdómslandslið - talentmenning

**Ítróttagleði:**
Menningartúrar í Danmark. Venjarahjálp til FO. Sosial tiltøk eftir venjingarlegur

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Eingin

**Uttanlands:**
Greifen Box Cup, juni 2025, Rostock í Týsklandi.

## Virksemi

Venjaraútbúgvingar. Talentmenning í Danmark - tveir túrar á vári í 2025. Altjóða limaskap í World Boxing.

## Framtíðarætlanir

Arbeitt verður við einari stevnu í Føroyum í september í 2026. Arbeitt verður við diplomkapping í Føroyum í 2027. Arbeitt verður eisini við at fáa hølini hjá Klaksvík Boksing liðug skjótast gjørligt. Vit leggja okkum eftir at fáa tað klárt í mars-mai.

## Sosialir miðlar

facebook.com/profile.php?id=100090670122144

**Nevndarforfólk:**
Johannes Klein

**Nevndarlimir:**
Martin Meng, næstforfólk
Beinta Johannessen, kassameistari
Bjartur René Nielsen, tiltakslimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavn Boksing | 59 |
| Klaksvík Boksing | 16 |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Dart

Dartsamband Føroya / dartsamband@gmail.com / Tel 584608

**Tað er góð samvera til kappingar. Vit hava fingið kappingarnar at rigga betri, sum ger, at fólk eru meira jalig.**

## Strategi

**Breidd:**
Í 2025 bleiv stórur dentur lagdur á ungdómsdart. Fleiri ungdómskappingar hava verið bæði í Føroyum og uttanlands.

**Úrval:**
Dart er vaksi nógv í seinastuni, og tað ger, at fleiri bygdir og býir hava spurt um kappingar, tilfar og tílíkt.

**Sjálvboðin:**
Vit hava bjóðað sjálvbodnum máltíðir og tílíkt, tá ið vit eru líðug at fyrireika ella kappingar eru lidnar.

**Ítróttagleði:**
Tað er góð samvera til kappingar. Vit hava fingið kappingarnar at rigga betri, sum ger, at fólk eru meira jalig.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
10 einmanskappingar
10 tvímanskappingar
8 ungdómskappingar
Stóri FM dagurin

**Uttanlands:**
26.-27. apríl: Iceland Open - Reykjavík
15.-17. august: Swedish Open - Malmø
23. oktober-2. november: World Master's - Budapest
28. oktober: HM í Suðurkorea

## Virksemi

Á hvørjum ári verður skipað fyri regluligum FM kappingum, og í 2025 var einki undantak. Skipað bleiv fyri tíggju kappingum, sum vóru handaðar út til flestu feløgini, sum eru limir hjá DSF. Umframt hesar einmanskappingarnar bleiv eisini skipað fyri fleiri ungdómskappingum, double-kappingum, firmakappingum og mix-kappingum.
Tað eru framvegis nógv dartfeløg, sum skipa sínar egnu, smáu kappingar. Tey gera eitt megnar arbeiði í sínum dagliga virksemi.

**Gongd er sett á EM 2026.**
Í 2025 bleiv ein EM-nevnd sett á stovn, sum skuldi byrja at fyrireika EM í 2026. Nevndin legði fyri við at seta seg í samband við ÍSF, gistingarhús, Atlantic Airways og ymiskar kommunur, sum kunnu hýsa einari tílíkari kapping. Allir partar hava verið ótrúliga jaligir, sum ger, at tað verður gjørligt at skipa fyri kappingini. Tilmeldingarskjøl og líknandi skuldu sendast út til londini í februar í 2026.

**World Master's í Ungarn.**
Síðst í oktober fóru fýra ungir dreingir - Eli, Jóni, David og Dávur til Budapest í Ungarn - at kappast í World Master's. Dreingirnir høvdu sjálvir spælt seg til kappingina, sum ikki ein og hvør megnar.

**Føroyingar til Iceland Open.**
Tað er mest sum blivin fastur siður, at føroyingar fara í hópatali til Iceland Open í Reykjavík. Tað hevur verið eitt vaksandi tiltak millum føroysku leikararnar, og heili 45 leikarar fóru til Ísland í 2025.

**HM í Suðurkorea.**
Átta leikarar vóru við í HM í 2025 í Suðurkorea - fýra kvinnur og fýra menn. Har bleiv spælt í einmansleiki, tvímansleiki og liðleiki. Avrikini vóru ikki tey, sum vit høvdu vónað, men HM gav heilt sikkurt innlit í nøkur ting, sum landsliðsleikararnir kunnu arbeiða víðari við.

## Framtíðarætlanir

Dart er í støðugari menning. Ætlanin er at skipa fyri tólv einmanskappingum í 2026. Í juli verður EM fyri ungdómi. Í hesum sambandi arbeiðir Dartsambandið við at senda nakrar ungar leikarar til Limerick í Írlandi. Vit eru eisini í gongd við fyrireikingarnar til EM í 2026, sum verður hildið við Tjarnir í september/oktober. Í 2027 hava vit møguleika fyri at skipa fyri Nordic Cup, sum vit eisini stremba eftir at fáa til landið. Vónandi fáa vit eisini møguleika fyri at senda ungdómin til World Master's í 2026.

## Sosialir miðlar

facebook.com/dartsamband.f.roya

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Havnar Dartfelag - Tórshavn | 53 |
| D9 Dartfelag - Skála | 67 |
| Vága Dartfelag - Miðvágur | 30 |
| Eiðis Dartfelag - Eiði | 16 |
| Klaksvíkar Dartfelag - Klaksvík | 9 |
| Dart Sandoy - Sandoy | 10 |
| Pílar & Skot - Fuglafjørður | 11 |
| Suðuroyar Dartfelag - Suðuroy | 18 |
| Argja Dartfelag - Argir | 22 |




**Nevndarforfólk:**
Petur Bláberg

**Nevndarlimir:**
Kristian Joensen, næstforfólk
Marjus Hansen, kassameistari
Bogi Arge, skrivari
Annfinn Hjaltalin, nevndarlimur

**Ungdómsnevnd:**
Uni Árting, forfólk
Haraldur Eliassen, næstforfólk
Marjus Hansen, nevndarlimur

**EM-nevnd:**
Annfinn Hjaltalin, forfólk
Jens Albert Simonsen, næstforfólk
Uni Árting, nevndarlimur
Petur Bláberg, nevndarlimur
Bogi Arge, nevndarlimur

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Golf

Golfsamband Føroya / ingisam@gmail.com / Tel 222273

**Roynt verður framhaldandi at finna avbjóðingar til okkara bestu leikarar. Hetta má ganga fyri seg uttanlands. Sæð verður eisini fram til, at Tórshavnar Golffelag fer undir eina miðvísa ætlan at betra um umstøðurnar á Glyvursnesi.**

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Tórshavnar Golffelag skipar javnan fyri kappingum á fyribils golfbreytini á Glyvursnesi.

**Uttanlands:**
Seks golfleikarar luttóku á oyggjaleikunum í Orknoyum 2025.

## Virksemi annars

Umframt kappingarnar á Glyvursnesi varð í vetur farið undir regluligar innandurakappingar við simolatorútgerðini hjá Simgolf.fo, har ið limirnir nú eisini hava góðar møguleikar at venja innandura alt árið.

## Framtíðarætlanir

Roynt verður framhaldandi at finna avbjóðingar til okkara bestu leikarar. Hetta má ganga fyri seg uttanlands. Sæð verður eisini fram til, at Tórshavnar Golffelag fer undir eina miðvísa ætlan at betra um umstøðurnar á Glyvursnesi. Í fyrstu atløgu við betri venjingarviðurskiftum, men roynt verður eisini - við fíggjarligum stuðli frá Tórshavnar kommunu - at betra um verandi breyt, ásannandi at ætlanirnar um eina veruliga golfbreyt í Føroyum tíverri eru útsettar í eitt ókent áramál.

**Nevndarforfólk:**
Ingi Samuelsen

**Nevndarlimir:**
Bárður Højgaard, peningarøkil

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Golffelag | 78 |
| Eysturoyar Golffelag | 15 |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Klintring

Klintrisamband Føroya



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Pool

Poolsamband Føroya / info.npaf@psf.fo / Tel 255229

**Alt arbeiðið hevur verið sjálvboðið, og vit virka fyri at drívandi megin eru fólk, ið brenna fyri ítróttini og felagsskapinum.**

## Strategi

**Breidd:**

PSF hevur sett sær fyri at gera eina menningarætlan til ár 2029, har ið ungdómurin verður settur í fremstu røð.

**Úrval:**

Fyrst í árinum vóru tvey feløg í tveimum hølum. Annað felagið misti hølini, men fekk tó nýtt høli seinast í árinum. Arbeitt hevur verið miðvíst við at finna betri umstøður til bæðið feløgini og nýggj feløg.

**Sjálvboðin:**

Alt arbeiðið hevur verið sjálvboðið, og vit virka fyri at drívandi megin eru fólk, ið brenna fyri ítróttini og felagsskapinum.

**Ítróttagleði:**

2025 var eitt trupult ár fyri feløgini og sambandið. Tó hava vit megnað at hildið fyrsta FM endaspælið í føroyskari søgu. Nú vaksa bæði feløgini aftur.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

FM 2025 í 8-ball undanumfør februar til apríl

FM 2025 í 8-ball endaspæl í november

## Virksemi annars

EC2025 - EC2025 Seniors - EC2025 Standing Disabled Athletes. Til hesar kappingar høvdu vit ein ella tveir altjóða, góðkendar, føroyskar dómarar við. Teir vóru Shehan Andrew Wanniya Bandara og Cesar Hora Quezada. Til EC2025, ið var hildið í Tallin í Estonia, var Andrew valdur at døma í kappingini. Hetta var eisini fyrstu ferð, at PSF var við til aðalfund hjá evropeiska poolsambandinum. Har luttóku Arnfinn í Bartalsstovu og Hans Kristian Eyðunsson Hansen.

Hóast sambandið er ungt, hevur ferðin higartil víst bæði vilja, áræði og førleika til at menna eina haldføra og skipaða framtíð fyri pool í Føroyum. Í byrjanini av 2024 gjørdist PSF fyribils limur í European Pool and Billiard Federation (EPBF), og sama summar gjørdist felagið eisini limur í Ítróttasambandi Føroya (ÍSF). Hetta var eitt týdningarmikið stig, sum gav føroyskum pool eina formella støðu bæði innanlands og uttanlands.

Í 2025 var útbúgvingarskeið fyri dómarar fullført sambært krøvum frá EPBF og WPA. Hetta bleiv stuðlað av ÍSF og EPBF. Hetta hevði við sær, at átta føroyskir dómarar blivu góðkendir, og teir hava nú EPBF/WPA-dómaraprógv. Longu hetta sama árið hava føroyskir dómarar verið valdir at døma í evropameistarakappingum, sum er eitt týðandi tekin um framgongd og álit millum altjóða poolfelagsskapir.

Somuleiðis hava vit sent okkara hægst metta leikara úr Føroyum til WPA Champion of Champions-kappingina í Avstralia, sum bleiv hildin í september í 2025, har ið hann umboðaði Føroyar heiðurliga og gjørdist millum 64 tey bestu. Hetta var ein søgulig løta fyri føroyska poolsambandið á altjóða pallinum.

Vit eru eisini errin av, at vit í ár hava skipað fyri fyrstu føroyameistarakappingini í 8-ball, og at vit 15. november í 2025 hýstu bæði hálvfinalum og finaluni. Hetta er søguligt stig fyri føroyskt pool og eitt sterkt tekin um, at ítrótturin nú hevur fingið fótafesti í Føroyum. Hóast mótgongd - eitt nú tá Havnar Poolfelag í byrjanini av árinum misti sítt felagshús - hevur felagsskapurin víst dirvi og samanhald. Í november er nýtt høli fingið til vega, og tað er við til at tryggjað, at virksemið kann halda fram, og at bæði ung og vaksin hava góðar karmar at venja undir. Hetta er bert byrjanin

## Framtíðarætlanir

Menningarætlanin Ung fyrst 2026-2028: Við hesi menningarætlan tekur Poolsamband Føroya eitt stórt stig móti einari haldførari, skipaðari og altjóða framtíð fyri føroyskt pool. Við stuðli frá ÍSF, feløgum, komunum og eldsálum, verður eitt fast grundarlag lagt undir eina ítróttagrein, sum hevur savnan, tolsemi og sosialt samanhald.

Hendan menningarætlan vísir leiðina til eina framtíð við ungdómsmenning, venjarauppbygging, kappingum, altjóða luttøku og vøkstri kring alt landið.

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar Poolfelag | 18 |
| Havnar Poolfelag | 14 |

## Sosialir miðlar

facebook.com/profile.php?id=61565014385142

instagram.com/poolsambandfo/



**Nevndarforfólk:**

Shehan Andrew Wanniya Bandara

**Nevndarlimir:**

Hans Kristian Eyðunsson Hansen, skrivari

Arnfinn í Bartalsstovu, kassameistari

Cesar Hora Quezada, nevndarlimur

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Seyðahundar

Seyðahundasamband Føroya / minhundur@gmail.com / Tel 217214 / www.hundar.fo

**Seyðahundasambandið er sjónligt í fjølmiðlunum, og av tí at vit hava fleiri feløg undir okkum, er hetta við til at eggja og menna ítróttin kring landið.**

## Strategi

**Breidd:**
Seyðahundasambandið er sjónligt í fjølmiðlunum, og av tí at vit hava fleiri feløg undir okkum, er hetta við til at eggja og menna ítróttin kring landið. Vit uppliva, at áhugin er vaksandi. Tað eru góðir 35 hundar, sum kappast, og hetta er sera gott í okkara ítrótti. Vit hava í vár gjørt fýra útvarpssendingar í Alduni, har vit hava tosað um søguna hjá seyðahundinum, hvussu ein byrjar at venja ein seyðahund, og har djóralæknin hevur givið hundavenjarunum vegleiðing um Border Collie.

**Úrval:**
Sambandið hevur skipað fyri felagsvenjing fyri okkara úrvalsíðkarum, ið skulu luttaka uttanlands, soleiðis, at tey verða betri fyrireikað til hesar uppgávurnar..

**Sjálvboðin:**
Øll eru sjálvboðin - frá Seyðahundasambandið Føroya til lokal feløg - og til kappingar eru hjálparfólk til at gera kaffi og at baka. Fólk skulu í hagan eftir seyðinum hjá bóndanum, og fólk skulu eisini hjápa við at seta seyðin út til luttakararnar, dómaran og skrivaran. Bóndin letur seyð og lendi til kappingarnar.

**Ítróttagleði:**
Undir sambandinum eru seks seyðahundafeløg, og tey arbeiða við at hava felags venjingar, skeiðir og tiltøk til limirnar. Vit síggja, at hetta eydnast sera væl, tí tað er tilgongd av limum og fólki, ið møta til kappingar.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
25.10.2025. Seyðahundakapping 1 - Norðoyar seyðahundafelag - Viðareiði - klassi 3.
01.11.2025. Seyðahundakapping 2 - Eysturoyar seyðahundafelag - Funningsbotnur - kvalifikatiónskapping 1. - Klassi 3., 2. og 1
08.11.2025. Seyðahundakapping 3 - Sandoyar seyðahundafelag - Húsavík - kvalifikatiónskapping 2. - klassi 3., 2. og 1.
15.11.2025 Seyðhundakapping 4 - Vága seyðahundafelag - Vágadali Kvalifikatiónskapping 2. - klassi 3., 2. og 1.
24.11.2025 Seyðahundakapping 5 - Sundalags seyðahundafelag - Saksunardalur - kvalifikatiónskapping - klassi 3., 2. og 1.
07.03.2026. Seyðahundakapping 6 - Suðurstreymoyar seyðahundafelag - Vatnaskørðum - kvalifikatiónskapping 3. - klassi 3.
14.03.2026 Seyðahundakapping 7 - Seyðahundasambandið - Viðareiði - innleiðandi kvalifikatiónskapping - klassi 3.
15.03.2026. Seyðahundakpping 8 - Finalan- Sum internationalt so skal hundurin heinta 2 sett av seyðum

**Uttanlands:**
NM í Norra 28.08-31.08-2025 nsg.no/gjeterhund/gjeterhund-prover/nordisk-mesterskap/timetable/
EM í Kekkin 18.09-21.09-2025 cscweb.site/2025-timetable

## Virksemi

Uttanlands: NM - Nordisk Mesterskap – Norra. Føroyar fingu ein finalist til NM. Tað var Anna Sofía Fjallheim við tíkini Midge. Hon fekk eitt flott 7. pláss av 44 hundum, og hon er samstundis fyrsta føroyska kvinna, sum er komin í eina finalu í altjóða kapping.
Seyðahundarnir í Føroyum eru í stórari framgongd. Seinastu fýra árini hava føroysku hundarnir verið í fýra finalum í EM og NM. Kappingarárið hjá Seyðahundasambandinum er frá apríl í 2025 til apríl í 2026. Tá ið kappingarárið er liðugt, fáa luttakararnir at vita, hvør hevur vunnið sær pláss til kappingar uttanlands. EM verður í Belgia í døgunum 27.-30. august í 2026. Til EM eru 108 hundar. Føroyar hava fýra hundar við.
HM verður í Huntington Farm í býnum Lauder í Skotlandi, ið liggur tætt við markið til Ongland. Skotar siga, at Border Collie kemur heim.
Kappingin verður frá mikudegnum 16. september til sunnudagin 20. september. Til kappingina koma yvir 300 hundar úr 34 londum. Fyriskipararnir vænta meira enn 30.000 vitjandi hesar dagarnar og ein eyka umsetning til økið upp á tíggju milliónir pund. Í Lauder búgva umleið 2000 fólk. Føroyar hava tríggjar hundar við.
Vága seyðahundafelag hevði skeið yvir tveir dagar. Skeiðið bleiv hildið 2. og 3. februar, har tey høvdu fingið heimsstjørnuna, Ricky Hutchinson, til Føroyar. Ricky Hutchinson hevur vunnið nógvar av teimum stóru kappingunum. Skeiðsluttakararnir vóru væl nøgdir við skeiðið.
Faroe National verður fyri fyrstu ferð skipað yvir tveir dagar. Ein innleiðandi dagur og ein finaludagur. Sjey teir fremstu koma í finaluna, og tað verður skipað sum til tær stóru kappingarnar kring heimin. Tvey sett av seyði, har hundurin fyrst heintar annað setti av tíggju seyðum og rekur til hundaføraran, har hann biður hundin hyggja aftur um seg og renna avstað eftir hinum tíggju seyðunum. Síðani skal hundurin reka tjúgu seyðir kring vøllin. Har standa tvey portur, sum hundurin skal reka allar seyðirnar gjøgnum í so beinari linju sum møguligt. Síðani kemur seyðurin inn í ein ring, sum er 32 metur í diametur, og her skulu hundaførarin og hundurin halda øllum seyðunum í ringinum og skilja sundur, soleiðis, at fimm merktar eru eftir, ið skulu í rættina.



**Nevndarforfólk:**
Jónstein Petersen

**Nevndarlimir:**
Tummas Jacobsen, næstforfólk
Anna Sofía Fjallheim, skrivari
Tóki Berg Mikkelsen, kassameistari
Sigtór Dam, nevndarlimur
Ketty A.V Hentze, tiltakslimur
Hanus Højgaard, tiltakslimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Norðoyar Seyðahundafelag | 19 |
| Eysturoyar Seyðahundafelag | 8 |
| Sunda Seyðahundafelag | 6 |
| Suðurstreymoyar Seyðahundafelag | 20 |
| Vága Seyðahundafelag | 13 |
| Sandoyar Seyðahundafelag | 10 |

**Sosialir miðlar**
facebook.com/profile.php?id=61576637513700
facebook.com/groups/1546713152270946

Mynd: Finnur Justinussen

## Framtíðarætlanir

Menningarætlan: Ungdómur sum framtíðar seyðahundavenjarar
Høvuðsendamál
At økja áhugan hjá ungdómi (10–25 ár) at gerast seyðahundavenjarar og at skipa fyri eini røð av møguleikum, sum tryggja, at tey fáa kunnleika, møguleikar og felagsskap til at trívast í ítróttini.
Vit vilja eisini arbeiða fyri at fáa ein young handler (undir 25 ár ) til altjóða kappingar. Í seyðahundakappingum eru allar kappingar, sum eru fyri tey, ið eru undir 25 ár, ungdómskappingar.

# Styrki

Føroya Styrkisamband / fss@fss.fo / Tel 223336 / www.fss.fo

**FSS arbeiðir nú miðvíst fram móti at gerast eitt veruligt sersamband og at fáa fastar venjingar út í feløgini kring landið. Hetta verður eitt týðandi stig í víðari menningini av føroyskum styrkiítrótti.**

## Strategi

**Breidd:**
FSS arbeiðir framvegis miðvíst við at styrkja breiddina og at skapa karmar, sum gera tað møguligt at veita eitt skipað og dygdargott breiddartilboð kring landið. Eitt nýtt felag er komið afturat, ÍF Tvørmegi í Havn, og Runavík-projektið er framvegis í gongd. Harumframt er samstarvið við Runavíkar skúla virkið, sum styrkir arbeiðið at fáa styrkiítrótt út til yngri aldursbólkar. Alt bendir á, at styrkiítróttur spakuliga breiðir seg út, og málið er at kunna bjóða skipaða styrkivenjing um alt landið.

**Úrval:**
FSS hevur fingið limaskap í IF3, altjóða sambandið fyri funktionella fitness - umframt teir limaskapir sum áður eru fingnir innan olympiska vektlyfting. Hetta styrkir altjóða støðuna hjá Føroyum og gevur betri karmar fyri menning, luttøku og samstarvi. Landsliðsarbeiðið er styrkt, og ein skipaður landsliðsstrukturur er við at verða liðugur. Vónin er, at skipanin kann roynast í 2026 og setast endaliga í verk í 2027.

**Sjálvboðin:**
Arbeitt verður við at menna eina fastari og greiðari kappingarskipan. Ætlanin er, at feløgini skiftast um at skipa fyri kappingum, so ábyrgdin verður javnari býtt, og fleiri verða virkin í fyriskipanini.
Í dag verða tvey FM hildin, sum eisini styrkir kappingarvirksemið og gevur fleiri íðkarum møguleika at luttaka.

**Ítróttagleði:**
Felagsskapurin er ein hornasteinur í styrkivenjing. Ítrótturin er merktur av longum venjingum, og tí hevur samanhald og sosialur stuðul stóran týdning – bæði fyri trivnað og úrslit.
FSS arbeiðir nú miðvíst fram móti at gerast eitt veruligt sersamband og at fáa fastar venjingar út í feløgini kring landið. Hetta verður eitt týðandi stig í víðari menningini av føroyskum styrkiítrótti.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
FM í Vekt- og Styrkilyfting - 19/04 - Burn Klassik, Tórshavn
Skansi Cup í Vektlyfting - 08/11 - Tvørmegi, Tórshavn
Steypakapping í Styrkilyfting - 29/11 - Burn Klassik, Tórshavn

**Uttanlands:**
**Vektlyfting**
Copenhagen Weightlifting Cup - 25/01 - Keypmannahavn, Danmark
B-DM - 01/02 - Herning, Danmark
DM Masters - 22-23/02 - Valby, Danmark
DM Senior - 14-15/03 - Fredericia, Danmark
Small Nations Tournament - 22-23/03 - Malta
EM Masters - 02-10/05 - Kavajë, Albania
DVF 5-Kamp - 07-08/06 - Keypmannahavn, Danmark
DM Hold - 23-29/06 - Aalborg, Danmark
Women Grand Prix - 22-23/08 - Baden, Eysturríki
HM Masters - 04-13/09 - Los Angeles, USA
Aalborg Cup - 04-05/10 - Aalborg, Danmark
EM U23 og Junior - 28/10-04/11 - Tirana, Albania
NM Senior - 15-16/11 - Garðabær, Ísland
NM Junior / Unglingar - 29-30/11 - Halmstad, Svøríki
Malta Open - 04/12 - Malta
**Styrkilyfting**
NM Junior & Sub-Junior (1-kamp) - 12-14/09 - Ísland
NM Junior & Sub-Junior (3-kamp) - 12-14/09 - Ísland

## Virksemi

2025 hevur verið eitt ár við greiðari framgongd og víðari menning av føroyskum styrkiítrótti. Arbeitt verður miðvíst við at skapa fastar og varandi karmar kring landið, so breidd og úrval kunnu mennast samstundis. ÍF Tvørmegi er nýtt felag, og arbeiðið í Runavík er komið væl ávegis við málinum, sum er at fáa støðugar og haldførar umstøður. Ein týðandi avtala er gjørd við Runavíkar Kommunu um at veita upplæring í olympiskari styrkivenjing til allan ítrótt í kommununi - við serligum denti á skúlarnar. Hetta er stórt stig í arbeiðinum at menna grundleggjandi styrki hjá ungum íðkarum. Samstundis víðkar vektlyfting seg til Kollafjarðar, og virksemið í Runavíkar skúla og hinum feløgunum gongur sera væl.
Í styrkilyfting vóru 9 luttakarar til FM, sum varð hildið í páskafrítíðini. Seinni í árinum var ein onnur kapping við 13 luttakarum. Hetta vísir, at áhugin er vaksandi, og at grundarlagið fyri breiðari luttøku er til staðar. Til FM í vektlyfting vóru 11 luttakarar. Kappingin var merkt av góðum huglagi og sterkum avrikum, hóast hon eisini varð ávirkað av páskafrítíðini. Fleiri persónlig met vórðu sett, og stig blivu tikin í menningini av eini meira skipaðari



**Nevndarforfólk:**
Heini Hátún

**Nevndarlimir:**
Niels Áki Mørk, samskipari
Rói Hjaltalin, ábyrgdarpersónur fyri olympiskari vektlyfting
Hjalmar Berthelsen, ábyrgdarpersónur fyri styrkilyfting
Sonni Eliassen, ábyrgdarpersónur fyri kúlulyft
Maibrit Reynheim Petersen, tiltakslimur
Gudmundur Danielsen, tiltakslimur
Jákup Súni Berg, tiltakslimur

**Dómaranevnd / Ábyrgdarbólkur:**
Gudmundur Danielsen, forfólk
Petur Fróðason
Sonni Eliassen

**Lønt starvsfólk:**
Frank Petersen, Menningarleiðari í styrkiverkætlanini í Runavík 0,5

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

og javnari kappingarskipan.
Í vektlyfting hava føroyskir íðkarar luttikið í Small Nations, DM, NM fyri vaksin, NMJ í bæði vekt- og styrkilyfting og EM U23 fyri fyrstu ferð. Niels Áki Mørk vann silvur í NM fyri vaksin, setti danskt met og luttók til EM U23 undir føroyskum flaggi – eitt søguligt stig fyri føroyska vektlyfting.
Landsliðsstrukturin er nú um at vera liðugur og verður væntandi royndur í 2026 við ætlan um at seta hann í verk í 2027.
Altjóða hevur FSS víðkað virksemið - m.a. við limaskapi í IF3, og arbeiðið við at styrkja Føroyar sum styrkiítróttartjóð heldur fram við greiðari kós.

## Framtíðarætlanir

Okkara ætlan er býtt í trý. Vit vilja arbeiða fyri altjóða arbeiðið/úrval, tí breiða í í Føroyum - har vit eisini breiða styrkiítróttin út, og triði partur er at gerast eitt sersamband undir ÍSF.
Úrvals virksemi hevur verið í gongd í langa tíð, og tað veksur eisini so við og við. Vit hava nú stabiliserað tað, so tað næstan koyrir sjálvirkandi undir okkara samskipara. Tó mangla enn fleiri limskapir, so at vit kunnu kappast undir Merkinum til allar kappingar vit megna.
Í 2024 í samband við NM í Olympiskari vektlyfting hava vit fingið styrkivenjing í gongd í Runavík. Hetta tilboðið er byrjað í framhaldsdeildini í Runavíkar skúla. Orsaka av hesum er fimta felagið sett á stovn, ið hevur heimstað í suður-Eysturoy. Vit vóna, at komandi árini fara vit at fáa feløg í Suðuroy, Vágum, Sandoy og í norðoyggjum.
Tíðliga í 2025 vóru vit ikki langt frá at blíva sersamband undir ÍSF. Tað bleiv mett, at vit mangla tað síðsta í sambandi við ungdómsarbeiðið. Komandi árið og árini vilja vit gera fleiri átøk fyri at kunna menna styrkiítróttina millum ung, so vit koma á mál við hesum.

## Felag og limatal:

| | |
|---|---|
| Megingjørð Styrkifelag | 10 |
| Styrkifelagið Stoyt | 18 |
| Burn Íðkarar | 45 |
| Trúðheimur | 10 |
| Full Power Kúlulyft | 3 |
| Ítróttafelagið Tvørmegi | 8 |

## Sosialir miðlar

facebook.com/ForoyaStyrkisamband/
instagram.com/foroyastyrkisamband/

# Taekwondo

Taekwondosamband Føroya / faroeislands.taekwondo@gmail.com / Tel 598187

**Dagar við hugna, svimjing, spæli, kappingum, fagnaði og bara at vera saman, er tað, sum gevur mest ítróttagleði.**

## Strategi

**Breidd:**
Tvær venjingarlegur, jólafrokost fyri børn og vaksin, set-venjingar byrjan niður í 5 ár

**Úrval:**
Høgni hevur verið til níggju kappingar og tvær venjingarlegur. Kampliðið hevur eisini sparrað saman við øðrum norðurlondum.

**Sjálvboðin:**
Øll sjálvboðin skiftast um at fáa onkra gávu, men tað ber altíð til at gera meira.

**Ítróttagleði:**
Dagar við hugna, svimjing, spæli, kappingum, fagnaði og bara at vera saman, er tað, sum gevur mest ítróttagleði. Fyri samanhaldið er ofta gott at gera okkurt annað enn venjing.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Vit hava havt eina summarkapping í kampi og poomse í juni FM í desember. Av tí at vit bert hava eitt felag, verður tað rættiliga innanhýsis

**Uttanlands:**
Januar 2025: Vit fóru til NM í Norra. 11 vóru við. Vit vunnu 3 bronsur og 2 silvur
Februar 2025: Vit fóru til Esbjerg Kup - øll kundu koma við, og vit fóru 22 avstað. Vit vunnu 5 bronsur, 4 silvur og 6 gull
Mars 2025: Høgni og Mathias fóru til Belgium Open - manglaðu at vinna ein kamp fyri at vinna bronsu (vunnu 3 kampar)
Apríl 2025: Høgni vann bronsu í Talinn Open
Mai 2025: Høgni vann tveir kampar í Svøríki Open
Juli 2025: 37 av okkara vóru á venjingarlegu í Ry - Høgni og Mathias vóru instruktørar
Oktober 2025: Kampliðið var til Riga Open og Small Nations, og vit fingu nógvar góðar plaseringar
Oktober 2025: Høgni var til HM í Wuxi í Kina, har hann stríddist manniliga móti heimsmeistaranum úr Kroatia

## Virksemi

Í februar 2025 vandu vit fram móti framsýsing til ÍtróttaFAGNAÐIN 2024 hjá ÍSF, og tað var stuttligt. Vit vístu tað sama fram í SMS og í mentanarvikuni í Runavík. Vit stóðu eisini fyri matinum til Laksatorgi, høvdu Runutusk og ruddaðu Tangagarðin. Vit hava sligið gras allastaðni í Runavík og á Skála, og hetta eru vit nú eftirhondini kend fyri. Í 2026 fara vit til ellisheim at vísa teimum taekwondo, og vit fara at søkja stuðul til breiddina og breiða okkum enn longur út.

**Nevndarforfólk:**
Noomi Kunoy Heradóttir

**Nevndarlimir:**
Gurið Lómfelli, næstforfólk
Tórheðin Jensen, kassameistari
Dávur Kunoy Høgnason, nevndarlimur
Dávid Im, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Mathias Gabrielsen, landsliðsvenjari

**Feløg og limatøl:**
Hwarang Føroyar 114



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Tennis

Tennissamband Føroya / tennis@tennis.fo / Tel 264636 / www.tennis.fo

**2025 hevur verið eitt fantastiskt ár hjá TSF og ein varði í føroyskari tennissøgu. Føroyar fingu játtað limaskap í Tennis Europe og International Tennis Federation (ITF) í 2025.**

## Strategi

**Breidd:**
Vit hava luttikið í Skúlaleikum 2025, og vit luttaka eisini í 2026. Skeið verður bjóðað til nýbyrjarar og tey, sum hava fingið nakað av venjing. Vit hava fingið avtalu í lag við útlendskan venjara til summarskeiðið í 2026.

**Úrval:**
Vit hava arbeitt fyri altjóða limaskapi og fingið limaskap í Tennis Europe og ITF. Avtala er fingin í lag við útlendskan venjara til summarskeiðið 2026. Vit luttóku á óalmennum oyggjaleikum á Isle of Man á sumri 2025.

**Sjálvboðin:**
Hava gjørt íløgur í Tennishúsið og umhvørvið kring vøllirnar í Gundadali.

**Ítróttargleði:**
Hava havt nógvan aktivitet á tennisvøllunum alla summarhálvuna 2025.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Leygardagskapping fyri nýbyrjarar og lættari vand, mars 2025
Mixed-double kapping á tennisvøllunum í Gundadali, mai 2025
Várkapping á tennisvøllunum í Gundadali, juni 2025
FM á tennisvøllunum í Gundadali, juli 2025
Heystkapping á tennisvøllunum í Gundadali, august/sept. 2025

**Uttanlands:**
Óalmennir oyggjaleikir á Isle of Man, juni 2025
Vinardystir í Reykjavík, U12 og U14, á heysti 2025

## Virksemi

2025 hevur verið eitt fantastiskt ár hjá TSF og ein varði í føroyskari tennissøgu. Føroyar fingu játtað limaskap í Tennis Europe og International Tennis Federation (ITF) í 2025. Hesir limaskapir lata fleiri dyr upp og føra til økt virksemi, nú bæði børn og vaksin kunnu luttaka í altjóða kappingum, har tey umboða Føroyar. Eitt nú the Junior Tour, Small States Championships og Masters event 30+, 35+, 40+,45+ osfr.

Føroyar luttóku á óalmennum oyggjaleikum á Isle of Man í 2025, og hetta var fyrstu ferð, at Føroyar vóru umboðaðar við bæði mans- og kvinnulandsliði. Føroyar vunnu liðkappingina hjá monnum á fyrsta sinni og vunnu harumfram plate-(b)-kappingina hjá kvinnum. Í samstarvi við HTF setti TSF útlendskan venjara á sumri í fjør, og virksemið á tennisvøllinum hevur neyvan nakrantíð verið so stórt sum farna summar.
Viðtøkur felagsins vórðu tillagaðar á eykaaðalfundi í august 2025, og TSF fevnir nú eisini um ítróttargreinarnar padel & pickleball. Fyrireikingarnar til Betri Oyggjaleikirnar 2027 byrjaðu í 2025 og halda fram í 2026.

## Framtíðarætlanir

Føroyar og TSF fáa offisielt limaskap í Tennis Europe pr. 1. januar 2026 og luttaka við U12 gentum og U14 dreingjum í innandura-vetrarkapping hjá Tennis Europe í januar/februar mðr. 2026. Ætlanin er støðugt at byggja víðari á arbeiðið við landsliðum hjá børnum/ungum og vaksnum. TSF arbeiðir eisini við at styrkja sambandið og samstarvið við norðurlendsku tennissambondini.

## Sosialir miðlar

instagram.com/tennis.fo/?utm_source=ig_web_button_share_sheet

**Nevndarforfólk:**
Ingi H. Højsted

**Nevndarlimir:**
Barbara á Rógvi, aðalskrivari
Jón Brekku, kassameistari
Janus Rein, nevndarlimur
Durita Johansen, nevndarlimur
Stefan í Skorini, nevndarlimur

**Feløg og limatøl:**
Havnar Tennisfelag 247



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Ítróttasamband Føroya

**Eystara Bryggja 30, Postsmoga 223, FO-110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2025

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann /

____________________________

Fundarstjóri



## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2025** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2025 hjá Ítróttasamband Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2025 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 21. apríl 2026

**Daglig leiðsla**

Petur Mittún
aðalskrivari

**Starvsnevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Elin Heðinsdóttir Joensen<br>forseti | Magnus Tausen<br>varaforseti | Kerstin Laksáfoss<br>nevndarlimur |
| Anna Maria Toftegaard<br>nevndarlimur | Edna Maria Debes<br>nevndarlimur (íðkaranevnd) | Eva Vilhelm<br>nevndarlimur |



## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til limafeløgini í Ítróttasamband Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ítróttasamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2025 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2025 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.





Tórshavn, tann 21. apríl 2026

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Ítróttasamband Føroya<br>Eystara Bryggja 30<br>Postsmoga 223<br>FO-110 Tórshavn | |
| | Telefon: | 312606 / 599779 |
| | Heimasíða: | www.isf.fo |
| | V-tal: | 333603 / 614343 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Starvsnevnd** | Elin Heðinsdóttir Joensen, forseti<br>Magnus Tausen, varaforseti<br>Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur<br>Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur<br>Edna Maria Debes, nevndarlimur (íðkaranevnd)<br>Eva Vilhelm, nevndarlimur | |
| **Daglig leiðsla** | Petur Mittún, aðalskrivari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |



## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Ítróttasamband Føroya er greiddur samsvarandi viðtøkunum um uppseting av ársroknskapinum og ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki A. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur, í mun til undanfarna ár. Uppseting og notur eru tillagaðar virksemi ÍSF's.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**

Inntøkan er allur játtaður og útgoldin stuðul og aðrar inntøkur í árinum.

**Kostnaður**

Ítróttasamband Føroya er partvís meirvirðisgjaldsskrásett.

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá Ítróttasambandi Føroya.

**Fyrisitingarkostnaður**

Fyrisitingarkostnaður fevnir um kostnað, sum knýtir seg til umsitingina av Ítróttasambandi Føroya, herundir avskrivingar v.m., sum ikki knýta seg til høvuðsraksturin.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til felagsrakstur, fyrisiting, hølir og tap uppá áogn.

## Nýttur roknskaparháttur

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

### Fíggjarstøðan

**Niðurskriving av støðisogn**

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Áður innroknaðar niðurskrivingar verða afturførdar, tá ið grundarlagið fyri niðurskrivingini ikki er longur.

**Fíggjarlig støðisogn**

**Onnur virðisbrøv og kapitalpartar**

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, ið ikki eru skrásett á virðisbrævamarknaði, verða innroknað til kostprís. Um endurvinningarvirðið er lægri enn kostprísur, verður niðurskrivað til lægra virði.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparárið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Skuld**

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.



## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 32.056.691 | 27.291.668 |
| | **Inntøkur tilsamans** | **32.056.691** | **27.291.668** |
| | Ítróttaferðing | -341.490 | -393.369 |
| | Trygging av ítróttafólki | -629.933 | -623.824 |
| 2 | Antidoping | -500.000 | -500.000 |
| 3 | ONF | -118.503 | -456.733 |
| 4 | Felagsútreiðslur | -5.185.714 | -2.582.645 |
| 5 | Umsiting av ÍSF-húsinum | -579.782 | -560.463 |
| 6 | Skrivstovuútreiðslur | -258.674 | -317.885 |
| 7 | Starvsfólkakostnaður | -2.411.380 | -2.183.693 |
| | **Útreiðslur tilsamans** | **-10.025.476** | **-7.618.612** |
| 8 | Stuðul til sersambond | -16.411.000 | -14.911.000 |
| 9 | Stuðul til altjóða kappingar | -2.450.000 | -2.450.000 |
| 10 | Stuðul til Úrvalsítrótt | -2.250.002 | -2.000.000 |
| | **Stuðul tilsamans** | **-21.111.002** | **-19.361.000** |
| | Rentur netto | 207.196 | 49.140 |
| | **Ársúrslit** | **1.127.409** | **361.196** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 1.127.409 | 361.196 |
| **Býtt tilsamans** | **1.127.409** | **361.196** |

**OGN**

| Nota | | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 11 | Kapitalpartar í atknýttum feløgum | 100.000 | 100.000 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 100.000 | 100.000 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **100.000** | **100.000** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 307.655 | 264.780 |
| | Millumrokning, Oyggjaleikir | 1.954.842 | 1.687.763 |
| | Millumrokningar við sambond | 2.270.734 | 1.367.663 |
| | Millumrokning við Skúlaleikir | 636.681 | 0 |
| | Áogn tilsamans | 5.169.912 | 3.320.206 |
| | Tøkur peningur | 14.442.480 | 11.866.148 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **19.612.392** | **15.186.354** |
| | **OGN TILSAMANS** | **19.712.392** | **15.286.354** |







**SKYLDUR**

| Nota | | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 12 | Flutt úrslit | 9.000.223 | 7.872.814 |
| | **Eginogn tilsamans** | **9.000.223** | **7.872.814** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 71.385 | 48.100 |
| 13 | Avsetingar | 10.640.784 | 7.365.440 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 10.712.169 | 7.413.540 |
| | **Skuld tilsamans** | **10.712.169** | **7.413.540** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **19.712.392** | **15.286.354** |

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **1. Inntøkur** | | |
| Landskassastuðul | 15.100.000 | 15.100.000 |
| Landskassastuðul til Antidoping Føroyar | 500.000 | 500.000 |
| Landskassastuðul til altjóða kappingar | 500.000 | 500.000 |
| Landskassastuðul til Úrvalsítrótt | 800.000 | 800.000 |
| Inntøkur, Oyggjaleikir | 2.321.500 | 280.000 |
| Inntøkur, skúlaleikir | 1.354.539 | 1.118.615 |
| Ítróttavedding | 10.461.000 | 8.461.000 |
| ONF | 500.000 | 500.000 |
| Aðrar inntøkur | 81.995 | 32.053 |
| Inntøkur Ítróttarfagnaður | 437.657 | 0 |
| | **32.056.691** | **27.291.668** |
| **2. Antidoping** | | |
| Dopingroyndir, fundir v.m. | 113.910 | 296.152 |
| Dopingroyndir, herundir løn | 389.736 | 257.976 |
| Avsett, Antidoping | -3.646 | -54.128 |
| | **500.000** | **500.000** |
| **3. ONF** | | |
| ONF | 68.503 | 356.733 |
| Løn | 50.000 | 100.000 |
| | **118.503** | **456.733** |





| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **4. Felagsútreiðslur** | | |
| Regulering MVG part, netto | -170.686 | -151.849 |
| Ferðing og koyring | 3.295 | 4.608 |
| Norðurlandafundir | 42.913 | 27.372 |
| Felags limaskipan | 127.559 | 58.060 |
| Oyggjaleikir | 2.305.289 | 77.343 |
| Breiddarpuljan | 291.110 | 206.499 |
| Íðkanarnevnd | 22.353 | 97.046 |
| Felagstiltøk | 341.086 | 300.496 |
| Ítróttafagnaður | 432.065 | 540.517 |
| Skeiðsútreiðslur | 120.283 | 91.487 |
| Gávur og graveringar | 3.181 | 30.238 |
| Skeið og ráðstevnur | 61.835 | 24.624 |
| Starvsnevndarfundir | 40.319 | 23.124 |
| Tryggur ítróttur | 64.813 | 31.564 |
| Umboðsting og aðalfundir | 112.945 | 83.962 |
| Limagjøld til felagsskapir | 32.815 | 18.939 |
| Skúlaleikir | 1.354.539 | 1.118.615 |
| | **5.185.714** | **2.582.645** |

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **5. Umsiting av ÍSF-húsinum** | | |
| Viðlíkahald | 10.710 | 4.950 |
| Húsaleiga | 425.000 | 427.100 |
| El og hiti | 39.770 | 36.651 |
| Trygging | 5.113 | 5.035 |
| Reingerð og vask | 99.189 | 86.727 |
| | **579.782** | **560.463** |

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **6. Skrivstovuútreiðslur** | | |
| Skrivstovuhald | 60.520 | 59.123 |
| Postgjald | 3.801 | 2.068 |
| Lýsingar | 0 | 14.959 |
| KT, Tól og innbúgv | 46.891 | 79.315 |
| Telefon og internet | 45.854 | 49.358 |
| Bókhald og roknskaparhjálp | 43.437 | 27.300 |
| Grannskoðan og sakførarakostnaður | 26.500 | 24.375 |
| Konsulenthjálp | 20.000 | 44.000 |
| Heimasíða | 11.671 | 17.387 |
| | **258.674** | **317.885** |

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **7. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Lønarendurgjald, starvsnevnd | 25.365 | 45.000 |
| Løn | 2.056.201 | 1.660.660 |
| Alm gjøld | 108.205 | 141.681 |
| Eftirlønargjøld | 196.079 | 313.288 |
| Trygging av starvsfólki | 25.530 | 23.064 |
| | **2.411.380** | **2.183.693** |

Umframt lønarendurgjald til starvsnevndina á kr. 25.365, hava starvsnevndarlimirnir fingið løn frá Ítróttavedding á kr. 193.140 í árinum.

Lønir bókaðar á ávís økir og eru ikki við í lønarnotuni.
Í árinum eru goldnar kr. 255.494 til Úrval, kr. 218.230 til Antidoping, kr. 660.298 til Skúlaleikir, kr. og kr. 50.000 til ONF. Samlaðu lønarútgjaldingarnar í árinum eru kr. 3.240.223.





| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **8. Stuðul til sersambond** | | |
| Fótbóltssambandið | 1.750.000 | 1.550.000 |
| Hondbóltssambandið | 3.137.790 | 2.674.901 |
| Flogbóltssambandið | 1.594.518 | 1.473.554 |
| Róðrarsambandið | 891.683 | 786.168 |
| Fimleikasambandið | 1.095.207 | 974.031 |
| Svimjisambandið | 999.936 | 1.067.724 |
| Judo Føroyar | 569.809 | 581.014 |
| Parasport | 780.144 | 743.066 |
| Badmintonsambandið | 707.462 | 724.920 |
| Borðtennissambandið | 543.202 | 532.580 |
| Sambandið Fyri Súkkling og Triathlon | 563.520 | 468.810 |
| Frælsur Ítróttur Føroya | 671.580 | 610.313 |
| Skjótisambandið | 583.573 | 549.078 |
| Bogaskjótisambandið | 551.417 | 504.020 |
| Kurvabóltur | 384.280 | 335.613 |
| Ríðisambandið | 586.879 | 535.208 |
| **Tilsamans** | 15.411.000 | 14.111.000 |
| Stuðul til menningarsambond | | |
| Boksisamband Føroya | 120.000 | 120.000 |
| Føroya Seyðahundafelag | 110.000 | 110.000 |
| Taekwondasamband Føroya | 130.000 | 130.000 |
| Billiardsamband Føroya | 50.000 | 50.000 |
| Golfsamband føroya | 60.000 | 60.000 |
| Styrkisamband Føroya | 110.000 | 110.000 |
| Tennissamband Føroya | 132.000 | 120.000 |
| Dartsamband Føroya | 130.000 | 130.000 |
| Poolsamband Føroya | 35.000 | 20.000 |
| Klintrisamband Føroya | 40.000 | 0 |
| Altjóða nevndararbeiði | 47.709 | 0 |
| Afturført stuðul til ser- og menningarsambond | 0 | -50.000 |
| Avseting, stuðul til menningarsambond | 35.291 | 0 |
| **Tilsamans** | 1.000.000 | 800.000 |
| Útlutaður stuðul tilsamans | 16.411.000 | 14.911.000 |

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **9. Stuðul til altjóða kappingar** | | |
| Dartsambandið | 124.325 | 92.955 |
| Hondbóltsambandið | 1.175.634 | 806.953 |
| Styrkisamband Føroya | 54.454 | 200.479 |
| Flogbóltsambandið | 1.171.046 | 1.042.393 |
| Badmintonsambandið | 140.440 | 106.386 |
| Svimjisambandið | 348.650 | 150.100 |
| Skjótisambandið | 162.539 | 66.396 |
| Bogaskjótisamband Føroya | 124.835 | 112.508 |
| Taekwondosambandið | 6.434 | 84.882 |
| Róðrarsambandið | 0 | 5.139 |
| Seyðahundasambandið | 88.453 | 62.087 |
| Ríðisambandið | 0 | 144.254 |
| Fimleikasambandið | 61.997 | 150.020 |
| Frælsur ítróttur Føroya | 8.034 | 0 |
| Judo Føroyar | 37.238 | 0 |
| Poolsamband Føroya | 25.304 | 0 |
| Tennissamband Føroya | 113.013 | 0 |
| Kurvabóltur í Føroyum | 268.781 | 0 |
| Parasport Føroyar | 72.055 | 0 |
| Avseting, netto | -1.533.232 | -574.552 |
| | **2.450.000** | **2.450.000** |





| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| **10. Stuðul til Úrvalsítrótt** | | |
| Hondbóltsamband Føroya | 844.316 | 520.000 |
| Styrkisamband Føroya | 171.861 | 225.000 |
| Svimjisambandið | 283.499 | 300.000 |
| Badmintonsamband Føroya | 0 | 20.000 |
| Bogaskjótisamband Føroya | 181.000 | 100.000 |
| Frælsur Ítróttur | 105.000 | 200.000 |
| Sersamband fyri Súkling og Triathlon | 0 | 100.000 |
| Fimleikasamband Føroya | 30.000 | 70.000 |
| Flogbóltsamband Føroya | 0 | 20.000 |
| Taekwondo | 56.000 | 75.000 |
| Fótbóltsamband Føroya | 140.746 | 0 |
| Lønar- og umsitingarkostnaður | 359.715 | 140.602 |
| Afturgoldin stuðul | -489.665 | -190.589 |
| Broytingar í avsetingum | 567.530 | 419.987 |
| | **2.250.002** | **2.000.000** |
| **11. Kapitalpartar í atknýttum feløgum** | | |
| Útveganarvirði, primo | 100.000 | 50.000 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 50.000 |
| **Útvegnarvirði ultimo** | **100.000** | **100.000** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **100.000** | **100.000** |
| **12. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit primo | 7.872.814 | 7.511.618 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 1.127.409 | 361.196 |
| | **9.000.223** | **7.872.814** |

| | 31/12 2025 kr. | 31/12 2024 kr. |
|---|---|---|
| **13. Avsetingar** | | |
| Avsett Antidoping Føroyar | 322.438 | 326.105 |
| Oyggjaleikir í Føroyum | 147.600 | 147.600 |
| Altjóða kappingar | 1.125.615 | 3.008.325 |
| Avsett samstørv | 300.000 | 580.000 |
| Avsettur stuðul, inntøkur frá Ítróttarvedding | 5.240.000 | 200.000 |
| Stuðul til Úrvalsítrótt | 567.451 | 0 |
| Stuðul til menningarsambond | 119.423 | 84.132 |
| Avseting til nýtt ÍSF hús | 2.818.257 | 2.818.258 |
| Avsett til skúlaleikir | 0 | 201.020 |
| | **10.640.784** | **7.365.440** |





## Uppskot til býti, lagt fyri aðalfundin hjá Ítróttasambandi Føroya 9. mai 2026

| | Uppskot 2026 | Býti 2025 | Býti 2024 | Býti 2023 | Býti 2022 | Býti 2021 | Býti 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fótbóltssamband Føroya** | 1.950.000 | 1.750.000 | 1.550.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.300.000 |
| **Hondbóltssamband Føroya** | 3.497.200 | 3.137.790 | 2.674.901 | 2.523.716 | 2.346.634 | 2.346.634 | 2.513.007 |
| **Flogbóltssamband Føroya** | 1.737.501 | 1.594.518 | 1.473.554 | 1.251.781 | 1.271.820 | 1.271.820 | 1.316.037 |
| **Róðrarsamband Føroya** | 897.089 | 891.683 | 786.168 | 756.241 | 678.423 | 678.423 | 752.067 |
| **Fimleikasamband Føroya** | 1.152.163 | 1.095.207 | 974.031 | 980.397 | 975.294 | 975.294 | 1.145.239 |
| **Svimjisamband Føroya** | 1.075.734 | 999.936 | 1.067.724 | 1.080.082 | 1.042.364 | 1.042.364 | 1.096.061 |
| **Judo Føroyar** | 612.630 | 569.809 | 581.014 | 540.594 | 558.103 | 558.103 | 539.473 |
| **Parasport Føroyar** | 841.154 | 780.144 | 743.066 | 839.721 | 838.038 | 838.038 | 909.612 |
| **Badmintonsamband Føroya** | 743.999 | 707.462 | 724.920 | 769.692 | 837.806 | 837.806 | 868.311 |
| **Borðtennissamband Føroya** | 546.838 | 543.202 | 532.580 | 543.687 | 501.615 | 501.615 | 510.935 |
| **Súkkling og Triathlon** | 560.645 | 563.520 | 468.810 | 392.978 | 366.984 | 366.984 | 83.883 |
| **Frælsur Ítróttur Føroya** | 651.167 | 671.580 | 610.313 | 580.036 | 550.527 | 550.527 | 566.406 |
| **Ríðisamband Føroya** | 642.862 | 586.879 | 535.208 | 486.019 | 491.534 | 491.534 | 522.416 |
| **Skjótisamband Føroya** | 616.887 | 583.573 | 549.078 | 519.095 | 491.074 | 491.074 | 500.876 |
| **Bogaskjótisamband Føroya** | 565.483 | 551.417 | 504.020 | 490.583 | 478.633 | 478.633 | 508.418 |
| **Kurvabóltur í Føroyum** | 394.649 | 384.280 | 335.613 | 317.378 | 300.000 | | |
| **Menningarsambond** | 1.000.000 | 1.000.000 | 800.000 | 800.000 | 693.152 | 793.152 | 617.258 |
| | **17.486.001** | **16.411.000** | **14.911.000** | **14.172.000** | **13.722.001** | **13.522.001** | **13.749.999** |

Loysnir tel 214452

Ítróttasamband Føroya

Eystara Bryggja 30 / Postsmoga 223 / Tel 31 26 06 / isf@isf.fo / www.isf.fo